# Ætlan fyri Fólkaheilsustýri í Føroyum

2022 – 2028



Heilsumálaráðið

September 2021

# Ætlan fyri Fólkaheilsustýri í Føroyum

2022 – 2028

Heilsumálaráðið

September 2021

**Ætlan fyri Fólkaheilsustýri í Føroyum 2022 – 2028**
© Heilsumálaráðið 2021
Forsíðumyndin er frá: Guide to Faroe Islands.fo
Umbrotið, prentað og heft: Føroyaprent
ISBN 978-99918-884-1-5

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

Formæli 7

1. Inngangur 9

1.1. Inngangur 9
1.2. Arbeiðssetningur 10
1.3. Verkætlanarskipan 10
1.4. Tíðarætlan 12

2. Samandráttur og tilmælir 13

2.1. Inngangur 13
2.2. Kapittul 3 - Uppgávur hjá verandi stovnum og ráði 13
2.3. Kapittul 4 - Heilsumyndugleikar í Norðanlondum 14
2.4. Kapittul 5 - Innihaldið í Fólkaheilsustýrinum og tilmælir 15
2.5. Kapittul 6 - Uppgávur hjá stovnum og ráði, sum kunnu flytast til Fólkaheilsustýrið 23
2.6. Kapittul 7 - Íverksetan og tíðarætlan 24
2.7. Kapittul 8 – Fíggjarlig lýsing 24
2.8. Kapittul 9 – Lógarverk og lógarbroytingar 25

3. Uppgávur hjá stovnum og ráði á heilsuøkinum 26

3.1. Inngangur 26
3.2. Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu 26
3.3. Fólkaheilsuráðið 27
3.4. Ílegusavnið 28
3.5. Landsapotekarin 30
3.6. Heilsutrygd 31
3.7. Sjúkrahúsverkið 31
3.8. Landslæknin 32
3.9. Fróðskaparsetur Føroya – Deildin fyri Heilsu- og sjúkrarøktarvísindi – heilsugransking 32
3.10. Depilin fyri Heilsu- og Almannagransking 34

4. Heilsumyndugleikar í Norðanlondum 35

4.1. Inngangur 35
4.2. Danmark 35
4.3. Ísland 39
4.4. Noreg 41

## 5. Innihald í einum Fólkaheilsustýri 44


**5.1. Inngangur** .......... 44
**5.2. Hugtakið „heilsa“** .......... 44
**5.3. Innihald í Fólkaheilsustýrinum** .......... 44
5.3.1. Gera tilmæli um ráðlegging innan heilsuverkið .......... 45
5.3.2. Fólkaheilsuarbeiði, heilsufremjan og fyribyrging .......... 45
5.3.3. Heilsufaklig ráðgeving og vegleiðingar .......... 46
5.3.4. Luttøka í altjóða og norðurlendskum heilsufakligum samstarvi .......... 49
5.3.5. Heilsutilbúgving .......... 50
5.3.6. Dygdarmenna heilsuøkið .......... 51
5.3.7. Eftirlit við apoteksverkinum, rúsviðgerðarstovnum og viðtaluhølum .......... 52
5.3.8. Eftirmeting - tilboð og skipanir .......... 53
5.3.9. Góðkenna rúsviðgerðarstovnar og tilskot til heilivág .......... 52
**5.4. Grundarlag undir arbeiðinum hjá Fólkaheilsustýrinum** .......... 54
5.4.1. Hagtøl .......... 54
5.4.2. Heilsuskráir .......... 57
Skráir innan Sjúkrahúsverkið .......... 57
Skráir hjá Ílegusavninum .......... 59
FarGen verkætlanin og persónlagað medisin .......... 61
Skráir hjá Heilsutrygd .......... 62
Skráir, ið Apoteksverkið umsitur .......... 63
Skráir, ið Landslæknin umsitur .......... 64
Danskar skráir .......... 66
Nýggjar skráir í Fólkaheilsustýrinum .......... 70
Niðurstøða um heilsuskráir .......... 72
5.4.3. Heilsugransking .......... 73
Heilsugransking í dag .......... 73
Skipan av heilsugranskingini í Føroyum .......... 75
Í hvønn mun kann heilsugransking vera partur av Fólkaheilsustýrinum .......... 77
Ílegugransking .......... 78
5.4.4. Kunningar tøkni .......... 79
**5.5. Stovnseta Fólkaheilsustýrið** .......... 79


## 6. Uppgávur hjá stovnum og ráði, sum kunnu flytast til Fólkaheilsustýrið 80


**6.1. Inngangur** .......... 80
**6.2. Uppgávur, sum kunnu flytast** .......... 80

## 7. Íverksetan og tíðarætlan 82

7.1. Inngangur 82
7.2. Íverksetan undir einum 82
7.3. Íverksetan í stigum 82
7.4. Fólkaheilsustýrið og heilsugranskingareindin mugu stovnsetast samstundis 89

## 8. Fíggjarlig lýsing 90

8.1 Inngangur 90
8.2 Játtan til verandi eindir – Løgtingsins fíggjarlóg 2021 90
8.3 Játtan til Fólkaheilsustýrið 90
8.3.1 Stig 1 – 1. januar 2022 – 31. desember 2023 91
8.3.2 Stig 2 – 1. januar 2024 – 31. desember 2025 93
8.3.3 Stig 3 – 1. januar 2026 – 31. desember 2027 94

## 9. Lógarverk og lógarbroytingar 96

9.1. Inngangur 96
9.2. Lógaruppskot um Fólkaheilsustýri 96
9.3. Lógarbroytingar í mun til Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu 96
9.4. Lógarbroytingar í mun til Fólkaheilsuráðið 96
9.5. Lógarbroytingar í mun til Ílegusavnið 98
9.6. Lógarbroytingar í mun til Landsapotekaraembætið 98
9.7. Lógarbroytingar í mun til stovnar, ið veita rúsviðgerð 98
9.8 Lógarbroytingar í mun til kommunulæknaskipanina 98
9.9. Lógarbroytingar í mun til barna- og ungdómstannrøkt 99
9.10. Tilmæli 99

## 10. Fylgiskjøl 101

Fylgiskjal 1 Tilmælir – eitt samlað yvirlit 101
Fylgiskjal 2 Virkisøki hjá myndugleikastovnum og stýrum undir stjórnarráðum 105

# FORMÆLI



Eitt av teimum málum, ið eg setti mær fyri, tá ið eg varð settur sum landsstýrismaður, var at skipa eitt føroyskt Fólkaheilsustýri. Vit mangla ein føroyskan myndugleika, sum kann ráðgeva landsstýrinum og øðrum í heilsufakligum spurningum, umframt at hava um hendi fólkaheilsu, heilsutilbúgving og annað.

Sum er, finst einki sjálvstøðugt stýri við fakligum myndugleikauppgávum innan heilsuøkið í Føroyum. Í fleiri umførum hevur verið arbeitt við at skipa ein fólkaheilsumyndugleika í Føroyum, men hetta hevur higartil ikki borið á mál.

Serliga í coronakreppuni stóð tað greitt fyri mær, at stórur tørvur er á at fáa ein sterkan fakmyndugleika á heilsuøkinum, sum er staðsettur í Føroyum og sum hevur serligan kunnleika til føroysk viðurskifti.

Coronatíðin hevur víst okkum, at vit ikki altíð hava somu avbjóðingar í Føroyum, sum í Danmark, og at tað er neyðugt at hava ein myndugleika; eina samlaða eind at ráðgeva landsstýrinum og øðrum um viðurskifti á heilsuøkinum.

Tað er týdningarmikið at savna orkuna innan heilsuøkið og leggja uppgávurnar frá fleiri smærri stovnum í ein stovn, so verandi tilfeingi á økinum kann verða nýtt meira skynsamt og soleiðis, at tað ikki verða fleiri smáar eindir innan heilsuøkið. Saman kunnu smáu stovnarnir fáa ágóðan av vitanini og royndunum hjá hvør øðrum.

Eftir mínari meting er tað av sera stórum týdningi at styrkja arbeiðið við heilsuskráum og hagtølum, so at politiski myndugleikin kann fáa ráðgeving á haldgóðum grundarlagi. Stovnsetanin av Fólkaheilsustýrinum, má skipast soleiðis at heilsugranskingin í Føroyum, sum í dag er í rívandi menning, eisini verður skipað í tryggum kørmum.

Harumframt liggur tað mær nær at hjartanum at styrkja fólkaheilsuarbeiðið í Føroyum, so at vit kunnu styrkja fólkaheilsu føroyinga og fyribyrgja lívsstílssjúkum.

Eg gleðist um, at Fólkaheilsustýrið nú verður veruleiki. Við hesum verður føroyska heilsuverkið ført eitt stórt stig fram á leið. Tað er mín vón, at Fólkaheilsustýrið fer at vera ein viti, ið lýsir vegin fram til frama fyri fólkaheilsu føroyinga.

**Kaj Leo Holm Johannesen**

*landsstýrismaður í heilsumálum*



# 1. INNGANGUR

## 1.1 INNGANGUR

Í londunum kring Føroyar er heilsuøkið skipað við einum stjórnarráði, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna á økinum, herundir orða lógaruppskot, gera fíggjarlóg v.m. Undir stjórnarráðnum eru eitt ella fleiri stýri, ið hava fakligar og rakstrarligar uppgávur, sum millum annað veita ráðgeving, gera vegleiðingar, hava eftirlit o.a. Stýrini veita tænastur til bæði politisku leiðsluna í heilsuverkinum og primera og sekundera geiran í heilsuverkinum.

Í Føroyum er tað landsstýrisfólkið og Heilsumálaráðið, ið hava ovastu leiðsluna á heilsuøkinum. Men tað er einki sjálvstøðugt stýri við heilsufakligum myndugleikauppgávum undir stjórnarráðnum, men hóast hetta røkja nakrir stovnar ávísar myndugleikauppgávur á heilsuøkinum, og verður hetta gjørt sum partur av teirra virkisøki annars. Orsøkin til, at einki sjálvstøðugt stýri er undir Heilsumálaráðnum, er partvíst, at heilsuøkið ikki er fult yvirtikið sum føroyskt málsøkið. Tað eru donsku Styrelsen for Patientsikkerhed, Sundhedsstyrelsen, Styrelsen for Patientklager og Sundhedsdatastyrelsen sum røkja hesar uppgávur fyri bæði Danmark og Føroyar.

Tørvur er á, at tað verður skipað eitt Fólkaheilsustýri, ið savnar yvirskipaðu heilsufakligu uppgávurnar í Føroyum í einum stýri. Einum Fólkaheilsustýri, sum við hollum kunnleika til føroysk heilsuviðurskifti og samfelagsviðurskifti sum heild, kann loysa eina røð av heilsufakligum uppgávum. Hollur kunnleiki til, hvussu alt heilsuverkið starvar, er ein fortreyt fyri at eitt Fólkaheilsustýri kann røkja sínar uppgávur. Hetta er eisini í samsvari við orðingar í samgonguskjalinum:

„Heilsuverkið skal virka sum ein eind við sjúklinginum í miðdeplinum. [...] Fyri at veita heilsutænastur á hægsta stigi er umráðandi, at heilsufakligu stavsfólkini hava góðar umstøður. [...] neyðugt er at stuðla einum mennandi fakligum umhvørvi innan heilsuverkið [...] Heilsuverkið skal í størri mun vera við í fyribyrgjandi arbeiði, m.a. við at leggja dent á fólkaheilsutiltøk og kunning. Dentur eigur at verða lagdur á rørslu, heilsugóðan kost o.a.“

Politisk avgerð er tikin um, at Landslæknaembætið ikki verður partur av arbeiðinum at skipa Fólkaheilsustýrið. Landslæknaembætið er danskt málsøkið. Undir føroyskum málsræði eru tó umsiting og lóggáva innan Sjúkrahúsverkið, Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, kommunulæknaskipanina, Heilsutrygd, Gigni, barna- og ungdómstannrøktina, Apoteksverkið, Ílegusavnið, Fólkaheilsuráðið og heilsutilbúgving. Undir coronakreppuni var tørvur á at skipa eitt heilsufakligt ráðgevaratoymi í Heilsumálaráðnum, sum virkaði í tøttum samstarvi við landslæknan. Uppgávurnar hjá ráðgevaratoyminum vóru m.a. at stuðla undir smittuverjuarbeiðinum herundir at skipa og fylgja gongdini viðvíkjandi sóttarhaldsviðurskiftum og yvirskipa ráðgeving svarandi til COVID-19 m.a. í sambandi við coronalinjuna og kunning til almenningin.

Neyðugt er at menna ein heilsufakligan myndugleika í Føroyum, sum kann hava á leið somu heimildir, sum tey heilsufakligu stýri, ið eru skipað undir stjórnarráðnum í hinum Norðanlondunum. Av tí, at Føroyar er eitt land við umleið 50.000 íbúgvum, er skilabest at gagnnýta teir fyrimunir, ið eru við at vera eitt lítið land og samskipa tær heimildir, sum liggja hjá omanfyristandandi stovnum og ráði í eitt stýri. Harumframt eru tað ein røð av uppgávum, sum ikki verða røktar í dag. Hesar uppgávurnar eiga eisini at verða lagdar til hetta stýrið, sum tá verður eitt veruligt stýri: eitt føroyskt Fólkaheilsustýri. Á hendan hátt ber eisini til at styrkja yrkisførið innan heilsuøkið, sum í dag er spjatt á fleiri ymiskar stovnar.

Sambært arbeiðssetninginum skal Fólkaheilsustýrið skipast sum ein sjálvstøðugur stovnur undir Heilsumálaráðnum.

## 1.2 ARBEIÐSSETNINGUR

Landsstýrismaðurin hevur á landsstýrisfundi í januar 2021, fingið undirtøku fyri at skipa eitt Fólkaheilsustýri við m.a. hesum innihaldi:

- Eitt Fólkaheilsustýri verður skipað sum ein sjálvstøðugur stovnur undir Heilsumálaráðnum. Hugsað verður ikki um at stovnseta nýggjan stovn, men at leggja uppgávurnar frá ymiskum stovnum saman í ein stovn. Hetta soleiðis, at verandi tilfeingi á økinum kann verða nýtt meira skynsamt og soleiðis, at tað ikki verða fleiri smáar eindir innan heilsuøkið.

- At høvuðsuppgávurnar hjá Fólkaheilsustýrinum í fyrstu atløgu vera hesar:
  - Yvirskipaðar uppgávur
    - gera tilmælir til landsstýrisfólki innan ymsu økini um tiltøk at seta í verk
  - Heilsufaklig ráðgeving
    - til landsstýrisfólk, kommunur, primera og sekundera heilsugeiran
  - Fólkaheilsa
    - hava um hendi fólkaheilsuarbeiði, upplýsing, gransking, tiltøk innan fólkaheilsu sum heild og styrkja fyribyrgjandi partin av arbeiðinum við fólkaheilsu
  - Lýsingar og greiningar
    - Gera lýsingar og greiningar av heilsustøðuni hjá íbúgvum í Føroyum
  - Kunning til borgarar og almenning
    - upplýsing til ávísar bólkar og almenningin um heilsuviðurskifti sum heild
  - Heilsutilbúgving
    - umsita tilbúgvingina í heilsuverkinum

Í verkætlanartilgongdini verður tikin støða til, hvørjar aðrar uppgávur skulu liggja hjá Fólkaheilsustýrinum.

Harumframt verður lýst, hvørjar lógarbroytingar eru neyðugar til tess at skipa Fólkaheilsustýri, umframt fíggjarligar og fyrisitingarligar avleiðingar hesum viðvíkjandi, herundir avleiðingar fyri tey starvsfólk, ið flyta til Fólkaheilsustýrið.

## 1.3. VERKÆTLANARSKIPAN

Arbeiðið at orða eitt uppskot til innihald í Fólkaheilsustýrinum er skipað í fimm bólkar: leiðslubólkur, samskipanarbólkur, serfrøðingabólkur, hoyringarbólkur og politiskur fylgibólkur. Harumframt hava onnur luttikið í arbeiðinum eftir tørvi.

### *Limir í bólkunum:*

- ***Leiðslubólkur***
  - Turid Arge, aðalstjóri, Heilsumálaráðið, forkvinna
  - Jan Simonsen, deildarstjóri, Heilsumálaráðið
  - Hansa Sørensen, deildarleiðari, Heilsumálaráðið

- *Samskipanarbólkur*
  - Birita Ludvíksdóttir, løgfrøðiligur ráðgevi, Heilsumálaráðið, verkætlanarleiðari
  - Katrin Gaard, fulltrúi, Heilsumálaráðið

- *Serfrøðingabólkur*
  - Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu – Pál Weihe, leiðari, yvirlækni
  - Fólkaheilsuráðið – Magni Mohr, formaður
  - Sjúkrahúsverkið – Tummas í Garði, varastjóri við læknafakligari bakgrund
  - Heilsumálaráðið – Bjarni á Steig, yvirlækni og virkandi ráðgevi í corona-tilbúgvingini
  - Landslæknaembætið – Lars Fodgaard Møller, landslækni
  - Landsapotekaraembætið – Hjalti Gunnarstein, landsapotekari
  - Heilsutrygd – Egil á Bø, stjóri
  - Ílegusavnið – Guðrið Andorsdóttir, stjóri
  - Fróðskaparsetur Føroya – May-Britt Skoradal, varadekanur

- *Hoyringarbólkur*
  - Almenn ráð og nevndir:
    - Sjúklingaráðið
    - Etiska ráðið
    - Vísindasiðseminevndin
    - Farsóttarnevndin (Føroya Landfúti, formaður)
    - Granskingarráðið
  - Stovnar:
    - Sjúkrahúsverkið (Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús)
    - Apoteksverkið
    - Gigni
    - Dátueftirlitið
    - Hvíldarheimið Naina
  - Kommunur:
    - Kommunufelagið
  - Fakfeløg:
    - Læknafelag Føroya
    - Serlæknafelag Føroya
    - Kommunulæknafelag Føroya
    - Felagið fyri Yngri læknar
    - Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
    - Bioanalytikarafelagið
    - Ergoterapeutfelagið
    - Fysioterapeutfelag Føroya
    - Radiografar
    - Føroyskir Sálarfrøðingar
    - Heilsuhjálparafelag Føroya
    - Heilsurøktarfelagið
    - Kost- og føðslufelagið
    - Ljósmøðrafelag Føroya
    - Tannlæknafelagið
    - Tannrøktarafelagið
    - Pharmadanmark
    - Farmakonomforeningen
    - Kiropraktorar



- Viðgerðarstovnar:
    - Heilbrigdi
    - Frælsi
    - Blákrossheimið
- Sjúklingafeløg:
    - MEGD
    - Krabbameinsfelagið
    - Javni

- ***Politiskur fylgibólkur***
    - Løgtingsins trivnaðarnevnd og umboð fyri teir flokkar, ið ikki eru umboðaðir í nevndini

- ***Onnur***
    - Maria Skaalum Petersen, leiðari á Deplinum fyri Heilsu-og Almannagransking

## 1.4. TÍÐARÆTLAN

Samskipanarbólkurin fór undir arbeiðið í mars 2021. Arbeiðið verður handað landsstýrismanninum í heilsumálum í september 2021.

# 2. SAMANDRÁTTUR OG TILMÆLIR

## 2.1. INNGANGUR

Landsstýrismaðurin hevur á landsstýrisfundi í januar 2021 fingið undirtøku fyri at skipa eitt Fólkaheilsustýri. Mett verður, at tørvur er á at seta á stovn eitt Fólkaheilsustýri, sum við hollum kunnleika til føroysk heilsuviðurskifti og samfelagsviðurskifti kann veita eina røð av heilsufakligum tænastum. Herundir hava um hendi heilsufakligar og rakstrarligar uppgávur, veita granskingargrundaða og heilsufakliga ráðgeving; menna og skipa hagtøl og skráir á økinum. Við at savna hesar førleikar í Føroyum á einum stað, ber til at styrkja yrkisførið á heilsuøkinum, sum í dag er spjatt á fleiri ymiskar stovnar.

### Bygnaður

Í Føroyum eru myndugleikastovnar undir fleiri av stjórnarráðunum, tó er eingin sjálvstøðugur myndugleikastovnur undir Heilsumálaráðnum. Undir virkisøkinum hjá Heilsumálaráðnum eru rakstrarstovnar og aðrir stovnar umframt ein røð av nevndum og ráðum. Stovnarnir eru Sjúkrahúsverkið, sum fevnir um  trý sjúkrahús, harumframt eru Apoteksverkið, Heilsutrygd, Ílegusavnið, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Hvíldarheimið Naina og teir tríggir rúsviðgerðarstovnarnir, Heilbrigdi, Blákrossheimið og Frælsi.  Sum áður nevnt hava nakrir stovnar myndugleikauppgávur, sum verða røktar sum partur av virkseminum hjá stovninum, teir eru t.d. Landsapotekarin og Heilsutrygd. Landsapotekarin røkir myndugleikauppgávur sum part av virkisøkinum hjá landsapotekaraembætinum. Landsapotekarin er bæði myndugleiki á heilivágsøkinum og stovnsleiðari á Apoteksverkinum. Heilsutrygd hevur nakrar myndugleikauppgávur innan kommunulæknaskipanina og á rúsviðgerðarstovnum. Hóast hetta, er ongin myndugleikastovnur undir Heilsumálaráðnum, sum røkir myndugleikauppgávur fyri heilsuøkið sum heild.

Tá Fólkaheilsustýrið verður skipað, fer hetta at hava við sær, at bygnaðurin innan heilsuøkið verður broyttur. Fólkaheilsustýrið kemur afturat, meðan Ílegusavnið, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Fólkaheilsuráðið verða flutt til nýggja Fólkaheilsustýrið. Undir Heilsumálaráðnum verður økið skipað soleiðis: Sjúkrahúsverkið (við trimum sjúkrahúsum, serviðgerð uttanlands, herundir Sjúklingahotellið í Keypmannahavn), Apoteksverkið, Heilsutrygd og Fólkaheilsustýrið. Harumframt koma tríggir rúsviðgerðarstovnar, Hvíldarheimið Naina og ráð og nevndir.

Fólkaheilsustýrið verður  ein stovnur undir Heilsumálaráðnum, men talan verður um ein myndugleikastovn, sum ikki hevur fyrisitingarligar heimildir mótvegis stovnum, ráðum og nevndum undir Heilsumálaráðnum, t.v.s. til dømis Sjúkrahúsverkinum, Apoteksverkinum og Heilsutrygd. Fólkaheilsustýrið fer sambært arbeiðssetninginum at veita heilsufakliga ráðgeving v.m. til Heilsumálaráðið, stovnar og ráð undir Heilsumálaráðnum, almenningin o.s.fr.

## 2.2. KAPITTUL 3 – UPPGÁVUR HJÁ VERANDI STOVNUM OG RÁÐI

Í sambandi við, at Fólkaheilsustýrið verður sett á stovn, er ætlanin ikki stovnseta ein nýggjan stovn, men at leggja uppgávur hjá ymiskum stovnum saman í ein stovn. Hetta so, at verandi tilfeingið á økinum kann verða nýtt meira skynsamt og soleiðis, at tað ikki verða fleiri smáar eindir innan heilsuøkið.

Teir stovnar og ráð á heilsuøkinum, ið kunnu hugsast at hava uppgávur, ið kunnu flytast til

Fólkaheilsustýrið eru hesir: Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Fólkaheilsuráðið, Ílegusavnið, Landsapotekarin, Heilsutrygd, Sjúkrahúsverkið, Landslæknin og Fróðskaparsetur Føroya.

Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu hevur sum uppgávu at kanna einstaklingar fyri sjúku ella mein av arbeiðsávum; at meta um arbeiðsførleika, at ráðgeva í arbeiðsmedisinskum spurningum, at skipa fyri sjúkufyribyrgjandi arbeiði og at fremja granskingarvirksemi innan arbeiðs- og almannaheilsu. Fólkaheilsuráðið hevur til uppgávu at styrkja tiltøk fyri heilsufremjan, sjúku- og vanlukkufyribyrging, ráðgeva myndugleikum í sambandi við heilsufremjandi tiltøk og stimbra gransking innan fyribyrgingarøkið. Ílegusavnið er tann føroyski biobankin sum, tá ið ræður um ílegugransking, knýtt at ættartrøum, umsitur allar upplýsingar um blóðroyndir, vevnaðarroyndir, staðfestir sjúkur og ættarbond hjá føroyingum. Ílegusavnið tryggjar, at upplýsingarnar eru rættar, verða væl vardar og goymdar trygt. Landsapotekarin er bæði stjóri fyri Apoteksverkið og hevur myndugleikauppgávur, t.v.s., at hann hevur eftirlit við, at apotekslógin og ásetingarnar við heimild í lógini verða hildnar. Heilsutrygd umsitur m.a. skipanina við heilsutrygdarveitingum og heilsukanningarskipanina, Kommunulæknaskipanina, Økisheilsuskipanina og fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung. Sjúkrahúsverkið: Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús, umframt serviðgerð uttanlands, herundir Sjúklingahotellið, hevur til uppgávu at kanna, røkta, viðgera og venja sjúklingar. Landslæknin hevur eftirlit við bæði heilsufakliga virkseminum, ið løggildug heilsustarvsfólk útinna í Føroyum og við viðgerðarstøðum v.m.

Á Fróðskaparsetri Føroya fer heilsugransking fram á Deildini fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi. Harumframt fer heilsugransking fram innan Sjúkrahúsverkið og heilsugransking er staðsett á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Ílegusavninum. Eitt samstarv um heilsugransking: Depilin fyri Heilsu og Almannagransking, er skipað millum Fróðskaparsetrið, Landssjúkrahúsið, Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Ílegusavnið.

## 2.3. KAPITTUL 4 – HEILSUMYNDUGLEIKAR Í NORÐANLONDUM

Fyri at fáa íblástur til, hvat innihaldið í einum føroyskum Fólkaheilsustýri kann verða, hevur verið hugt eftir, hvussu ávís Norðanlond skipa seg á hesum øki. Hóast Føroyar og hini Norðanlondini eru ógvuliga ymisk á nógvum økjum, ber til at fáa íblástur frá teimum um virkisøkið hjá Fólkaheilsustýrinum.

Í hesum kapitli eru uppgávurnar hjá donsku stovnunum lýstar: Sundhedsstyrelsen, Sundhedsdatastyrelsen, Styrelsen for Patientsikkerhed, Lægemiddelstyrelsen, Statens Institut for Folkesundhed og Nationalt Genomcenter. Sundhedsstyrelsen ráðgevur og vegleiðir heilsumálaráðharranum og øðrum myndugleikum um heilsufaklig viðurskifti og fólkaheilsu v.m.; Styrelsen for Patientsikkerhed veitir heilsustarvsfólkum løggilding, hevur eftirlit við løggildum heilsustarvsfólkum og heilsustovnum og ráðgevur um smittandi sjúkur v.m.; Sundhedsdatastyrelsen hevur til uppgávu at útvega samanhangandi heilsudáta og talgildar loysnir, sum skulu vera til gagns fyri sjúklingar og heilsustarvsfólk, og sum harumframt skulu nýtast í sambandi við gransking og fyrisitingarlig endamál í heilsuverkinum. Herundir umsitur Sundhedsdatastyrelsen „Landspatientregisteret“. Lægemiddelstyrelsen góðkennir og kannar heilivágsfyritøkur og heilivág, umframt hevur eftirlit við medisinskari útgerð v.m. Statens Institut for Folkesundhed er ein danskur granskingarstovnur, sum granskar innan fólkaheilsufrøði. Nationalt Genomcenter hevur til uppgávu at útvega grundarlag fyri at menna betri diagnostik og meira málrættaðar viðgerðir við at brúka genomsekventering. Harumframt skal stovnurin vera við til at tryggja, at borgarar og sjúklingar verða tiknir við í menningina innan persónlagað medisin í Danmark.

Heilsustýrið í Íslandi verður nevnt Embætti Landslæknis. Landslæknaembætið er ein stovnur við bæði heilsufakligari gransking, ráðgeving, umsiting og eftirliti. Umframt hetta, hevur Landslæknin ábyrgd av at virka fyri og kunna um fyribyrging og heilsufremjandi átøkum kring landið. Harumframt er ein Fólkaheilsugrunnur skipaður í Íslandi. Fólkaheilsugrunnurin hevur til endamáls at styrkja fyribyrgjandi og heilsufremjandi arbeiði í samfelagnum. Hetta arbeiðið verður gjørt í samsvari við tær ætlanir, ið landið hevur fyri fólkaheilsuøkið. Peningurin í grunninum skal harumframt nýtast til fyribyrgjandi og heilsufremjandi starvsemi hjá Landslæknaembætinum. Sambært reglugerðini kann upp til 35 % av peninginum í grunninum nýtast til stuðul til umsóknir uttanífrá og annars til at umsita grunnin. Í minsta lagi 65 % av peninginum skal nýtast til fólkaheilsu- og fyribyrgjandi starvsemi hjá Landslæknanum ella til aðrar verkætlanir, ið verða framdar fyri Landslæknan. Heilivágsstýrið í Íslandi verður nevnt: Lifjastofnum. Stovnurin hevur áleið somu uppgávur, sum Lægemiddelstyrelsen í Danmark.

Í ætlanini eru uppgávurnar hjá norsku stovnunum: Helsedirektoratet, Statens Helsetilsyn, Folkehelseinstituttet og Legemiddelverket lýstar. Uppgávurnar hjá Helsedirektoratet fevna m.a. um at veita óhefta fakliga ráðgeving, íverkseta samtyktan politikk, og fyrisita lógir og reglur innan heilsuverkið. Harafturat hevur Helsedirektoratet ábyrgdina fyri heilsutilbúgvingini í Noregi. Statens Helsetilsyn er statsligi myndugleikin í Noregi, ið hevur eftirlit við heilsu- og umsorganartænastum, sosialum tænastum og barnavernd. Á fylkisstøði er Fylkesmannen eftirlitsmyndugleiki við somu økjum, ið eru løgd til Statens Helsetilsyn. Virkisøkið hjá Folkehelseinstituttet er at framleiða, savna saman og miðla vitan, sum hevur til endamáls at virka fyri einum góðum fólkaheilsuarbeiði og góðum heilsu- og umsorganartænastum. Legemiddelverket hevur um hendi uppgávur knýttar at umsiting, eftirliti, kunning og vegleiðing viðvíkjandi heilivági og medisinskari útgerð. Stovnurin skal tryggja góða góðsku í heilivágsviðgerð og at heilivágur er so bíligur, sum gjørligt.

## 2.4. KAPITTUL 5 – INNIHALDIÐ Í FÓLKAHEILSUSTÝRINUM OG TILMÆLIR

Við støði í ynskinum hjá landsstýrismanninum um at skipa ein heilsumyndugleika í Føroyum, eitt Fólkaheilsustýri og arbeiðssetninginum í verkætlanini, verður í kapitli 5 mælt til, at virksemið hjá Fólkaheilsustýrinum tekur støði í heilsuhugtakinum hjá WHO og at innihaldið í Fólkaheilsustýrinum verður sum lýst niðanfyri:

- ***Heilsuhugtakið.*** WHO allýsir hugtakið „heilsa“ soleiðis: „Health is a state of complete physical, mental and social well-being, and not merely the absence of disease or infirmity.“ Umsett til føroyskt, ljóðar hugtakið áleið soleiðis: Heilsa er ein støða við fullkomnari likamligari, sálarligari og sosialari vælferð, og ikki bert frávera av sjúku ella heilsubreki.

> *Mælt verður til, at komandi Fólkaheilsustýrið í sínum arbeiði heldur seg til WHO allýsingina um heilsu.*

- ***Gera tilmælir til politiska myndugleikan um ráðlegging innan heilsuverkið.*** Ein týdningarmikil uppgáva hjá Fólkaheilsustýrinum er at gera tilmæli til politiska myndugleikan um ráðlegging innan heilsuverkið. Hetta kann t.d. vera tilmæli um, hvørji og hvussu nógv starvsfólk skulu vera innan heilsuverkið, og hvussu hesi kunnu fáast til føroyska heilsuverkið. Um politiski myndugleikin hevur tørv á tí, eiga metingar eisini at verða gjørdar um, hvørjar viðgerðir skulu raðfestast í føroyska heilsuverkinum; hvørjar viðgerðir tørvur er á, og hvørjar

viðgerðir hava jaligt úrslit á sjúklingin v.m. Til dømis kann Fólkaheilsustýrið kanna, hvørjar viðgerðir hava jaligt úrslit fyri sjúklingin í øðrum londum, so hetta kann verða tikið við í avgerðir um, hvørjar viðgerðir skulu veitast í Føroyum. Talan kann bæði vera um stutttíðarmetingar og langtíðarmetingar.

*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið ger tilmæli til politiska myndugleikan um ráðlegging innan heilsuverkið.*

- ***Hava um hendi fólkaheilsuarbeiðið, heilsufremjan og fyribyrging.*** Tað vil siga, fólkaheilsuarbeiðið, upplýsing og tiltøk innan fólkaheilsu sum heild og styrkja heilsufremjandi og fyribyrgjandi partin av arbeiðinum við fólkaheilsu. Fólkaheilsustýrið eigur at arbeiða við vísindaliga grundaðum tiltøkum, hvørs endamál er at virka fyri at betra um fólkaheilsuna og virka fyri at fyribyrgja sálarligar, somatiskar sjúkur og ílegusjúkur og skaðar við miðvísum átøkum tvørtur um tænastur, geirar og fyrisitingarløg. Hesi tiltøk eiga eisini regluliga at verða eftirmett. Hetta kann stýrið gera við støði í uppgávuni sum fak- og myndugleikastovnur, ið m.a. merkir, at stýrið skal vera heilsufakligur ráðgevi, og at seta í verk heilsupolitikkin hjá landsstýrinum. Politiskt ynski er um at uppraðfesta fólkaheilsuarbeiðið sum heild, við tí endamáli at fremja fólkaheilsu og fyribyrgja lívsstílssjúkum.

*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið skal hava um hendi fólkaheilsuarbeiðið, upplýsing og tiltøk innan fólkaheilsu sum heild og styrkja heilsufremjandi og fyribyrgjandi partin av arbeiðinum við fólkaheilsu. Herundir er eisini, saman við Heilsumálaráðnum og øðrum pørtum, at leggja til rættis og regluliga eftirmeta eina heildarætlan fyri heilsufremjan og fyribyrging fyri allar Føroyar. Mælt verður til, at fólkaheilsuøkið verður styrkt komandi árini.*

- ***Veita heilsufakliga ráðgeving.*** Hetta er heilsufaklig ráðgeving svarandi til bæði føroyska og danska lóggávu. Stórur partur av heilsulóggávuni er føroysk. Hetta er heilsutrygdarlógin, sjúkrahúsverkslógin, ílegulógin, kommunulæknalógin, lóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, apoteksverkslógin v.m. Heilsufaklig ráðgeving er í hesum sambandi veitt Heilsutrygd, kommunulæknum, heilsufrøðingum, sjúkrahúsverkinum og apoteksverkinum. Hin parturin av heilsulóggávuni er danskur, herundir koma t.d. Sundhedsloven, autorisationsloven, lov om klage- og erstatningsadgang, psykiatriloven, lov om smitsomme sygdomme v.m. Sambært sundhedsloven kunnu føroyskir myndugleikar fáa ráðgeving um reinføris-, umhvørvis- og sosialmedisinsk viðurskifti. Landslæknin fylgir heilsuviðurskiftunum og heldur seg støðugt kunnaðan um verandi fakligu vitanina á heilsuøkinum. Landslæknin kunnar almenningin, tá ið serlig heilsulig viðurskifti gera tað neyðugt. Mett verður, at tað ikki er nakað til hindurs fyri, at bæði Landslæknin og Fólkaheilsustýrið veita heilsufakliga ráðgeving, tí fleiri ymiskir stovnar í Føroyum veita longu heilsufakliga ráðgeving. Í løtuni veita Landslæknin, Fólkaheilsuráðið, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Heilsutrygd og Ílegusavnið heilsufakliga ráðgeving. Í coronu-tíðini hevur Heilsumálaráðið eisini veitt heilsufakliga ráðgeving, tá spurningar eru svaraðir á coronulinjuni og umvegis coronuráðgevingina, ið er staðsett undir Arbeiðseftirlitinum. Áheitanir viðvíkjandi lógarbundnum uppgávum, sum Landslæknin varðar av, eiga at verða vístar til Landslæknan. Hetta er galdandi viðvíkjandi

m.a. áheitanum um smittandi sjúkur, áheitanir um eftirlit og rættarmedisin. Tætt samstarv eigur at vera ímillum Landslæknan og Fólkaheilsustýrið um heilsufakligu ráðgevingina.

Uppgávan við heilsufakligari ráðgeving krevur, at tey, ið koma at starvast í Fólkaheilsustýrinum eru vælskikkað og hava viðkomandi fakligar førleikar umframt royndir. Hetta krevst, fyri at Fólkaheilsustýrið kann fáa tað tyngd og virðing, ið Fólkaheilsustýrið eigur at hava. Umframt at hava røttu starvsfólkini, eigur Fólkaheilsustýrið harumframt at hava tætt samstarv við Landslæknan og tætt samstarv við heilsufakligar myndugleikar í hinum Norðanlondunum, so Fólkaheilsustýrið kann menna sínar førleikar at veita heilsufakliga ráðgeving til myndugleikar, stovnar o.o. í Føroyum.

*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið veitir heilsufakliga ráðgeving til landsstýrið, kommunur, primera og sekundera heilsugeiran. Hendan ráðgeving eigur at vera gjørd í tøttum samstarvi við Landslæknan.*

- ***Tilevna heilsufakligar vegleiðingar.*** Arbeitt verður støðugt við at dagføra og bøta um lógarverkið á heilsuøkinum. Løgtingslógir, lógarbroytingar og kunngerðir verða tilevnaðar í samstarvi við føroyskar myndugleikar o.o., ímeðan danskar lógir og kunngerðir verða dagførdar í samstarvi við Sundhedsministeriet. Av tí, at lógarverkið er stórt, er orka bert til at dagføra lógir og kunngerðir á heilsuøkinum. Heilsumálaráðið hevur ikki orku til at tilevna vegleiðingar til føroyska og danska lógarverkið. Í hinum Norðurlondunum er tað heldur ikki vanligt, at tað er sjálvt stjórnarráðið, ið ger vegleiðingar. Hendan uppgáva liggur oftast hjá undirliggjandi heilsufakligum myndugleika. Í Danmark liggur hendan uppgáva í høvuðsheitum hjá Sundhedsstyrelsen og Styrelsen for Patientsikkerhed.

  Ein ørgrynna av donskum vegleiðingum er galdandi á heilsuøkinum í Danmark. Fyri at hesar vegleiðingar kunnu setast í gildi fyri Føroyar, er neyðugt, at vegleiðingarnar verða lagaðar til føroysk viðurskifti. Hetta er til dømis, at tær ásetingar, sum eru yvirtikin málsøki, verða strikaðar úr vegleiðingunum; at ásetingar, ið ikki hóska til føroysk viðurskifti, somuleiðis verða strikaðar, og at danskir myndugleikar verða broyttir til føroyskar myndugleikar.

*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu, saman við føroyskum myndugleikum, at tilevna vegleiðingar til føroyska heilsulóggávu. Mælt verður eisini til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu, í samstarvi við Landslæknan, at tillaga vegleiðingar til donsku heilsulóggávuna í Føroyum til føroysk viðurskifti, so hesar vegleiðingar kunnu setast í gildi fyri Føroyar.*

- ***Kunning til borgarar og almenningin.*** Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at kunna borgarar og almenning um heilsufaklig viðurskifti. Harumframt verður mælt til, at ein talgildur heilsuportalur við tíðini verður mentur, har føroyingar fáa kunning um heilsuviðurskifti sum heild og fáa atgongd til sínar egnu heilsuupplýsingar talgilt. Hetta við tí endamáli, at heilsuupplýsingar verða lættari atkomuligar hjá borgaranum, og borgarin fær størri innlit í síni heilsuviðurskifti. Mælt verður til, at hesin heilsuportalur verður staðsettur í Sjúkrahúsverkinum ella Fólkaheilsustýrinum.

- ***Umboða Føroyar í altjóða og norðurlendskum heilsufakligum samstarvi.*** Bæði undir Norðurlendska Ráðharraráðnum og WHO eru ein røð av heilsufakligum samstørvum, sum Føroyar hava møguleika at luttaka í. Føroyar luttaka í norðurlendska samstarvinum á hagtalsøkinum og innan heilsutilbúgving. Luttøka í norðurlendskum og altjóða heilsufakligum samstørvum er týdningarmikil fyri Føroyar. Við at luttaka í slíkum samstørvum, ber bæði til at fáa vitan um tey mál, sum onnur arbeiða við, knýta virðismikil sambond og til ber, at Føroyar kunna onnur um heilsustøðu føroyinga og um viðurskifti á heilsuøkinum. Hendan vitan kann verða nýtt til at menna heilsuøkið í Føroyum og til at veita ráðgeving innan økið í Føroyum.

> *Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið luttekur í altjóða og norðurlendskum samstarvi innan heilsufakliga økið.*

- ***Umsita heilsutilbúgvingina.*** Heilsutilbúgvingin verður sett í gongd í sambandi við vanlukkur, álvarsamar smittusjúkur, yvirgangsatsóknir v.m. Heilsuverkið hevur, sambært sjúkrahúslógini, skyldu til at veita hjálp og sjúkraflutningstænastu til persónar, ið brádliga hava tørv á hesum, vegna óhapp ella brádliga íkomnari sjúku v.m. Í samsvari við Tilbúgvingarætlan Føroya frá 2003, hevur verið arbeitt við at skipa eina tilbúgving uttanfyri sjúkrahúsverkið. Uppgávan at gera yvirskipaðar tilbúgvingarætlanir á heilsuøkinum og at skipa tilbúgvingina uttanfyri Sjúkrahúsverkið, hevur higartil ligið hjá Heilsumálaráðnum. Heilsumálaráðið hevur røkt hesa uppgávuna eftir avtalu og í samstarvi við uttanhýsis veitarar. Føroyar luttaka eisini í norðurlendskum samstarvi innan heilsutilbúgving. Arbeiðið fer fram í sokallaða Svalbardbólkinum.

> *Mælt verður til, at heilsutilbúgvingin og játtanin á fíggjarlógini til tilbúgvingina verður flutt til Fólkaheilsustýrið at umsita.*

- ***Dygdarmenna føroyska heilsuøkið.*** Sjúkrahúsverkið arbeiðir støðugt við at dygdarmenna tey trý sjúkrahúsini. Samstarvið og arbeiðið ímillum tey trý sjúkrahúsini gongur sera væl, og mett verður, at hetta er eitt arbeiði, ið eigur at liggja í Sjúkrahúsverkinum. Størsti parturin av dygdarmenningini av heilsuverkinum gongur fyri seg í Sjúkrahúsverkinum, og mett verður, at tað ikki er ráðiligt at flyta hetta til Fólkaheilsustýrið. Hóast hetta, verður mett, at tørvur er á, at yvirskipaðar ætlanir um dygdarmenning av øllum heilsuverkinum eiga at vera ein uppgáva hjá Fólkaheilsustýrinum.

> *Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at tilevna yvirskipaðar ætlanir til politiska myndugleikan um dygdarmenning innan heilsuverkið sum heild.*

- ***Greiningar og frágreiðingar.*** Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at gera greiningar og heilsufrágreiðingar, herundir m.a. at gera eina árliga heilsulýsing um heilsustøðu føroyinga, umframt javnan at gera heilsufrágreiðingar innan serstøk økir, t.d. um serstakar sjúkur.

- ***Hava eftirlit við apoteksverkinum, rúsevnisstovnum og viðtaluhølum***
Eftirlit við apoteksverkinum er eitt yvirtikið málsøkið, ið er reguleráð í løgtingslóg um apoteksverk og heilivág. Sambært lógini hevur Landsapotekarin eftirlit við, at lógin og ásetingar í lógini verða hildnar. Í øðrum londum er tað vanliga ein heilsufakligur stovnur undir stjórnarráðnum, ið fremur eftirlit við undirliggjandi stovnum. Í Danmark er tað t.d. Lægemiddelsstyrelsen, ið hevur eftirlit við danska apoteksverkinum. Umframt hetta, hevur Heilsutrygd í løtuni eftirlit við, at rúsevnisstovnar lúka krøv í góðkenning teirra og eftirlit við, at viðtaluhølini hjá kommunulæknum eru í nøktandi standi. Mett verður, at hesar eftirlitsuppgávur eru yvirskipaðar uppgávur, ið eiga at verða fluttar til Fólkaheilsustýrið.

  Eftirlit við heilsustarvsfólki og heilsufakligum stovnum er eitt ikki yvirtikið málsøkið. Málsøkið er reguleráð í „autorisationsloven" og „sundhedsloven" og er tað Landslæknin, ið hevur eftirlit við heilsustarvsfólki og heilsufakligum stovnum. Av tí, at politisk avgerð er tikin um, at Landslæknaembætið ikki er partur av hesum arbeiði, verður hetta eftirlit ikki ein partur av uppgávunum hjá Fólkaheilsustýrinum.

  > *Mælt verður til, at eftirlitið við ávikavist Apoteksverkinum, rúsviðgerðarstovnum og viðtaluhølum hjá kommunulæknum, sum frálíður, verður flutt til Fólkaheilsustýrið.*

- ***Gera eftirmetingar og góðkenna stovnar og skipanir***
Í løtuni er tað Heilsutrygd, ið eftir umsókn, kann góðkenna rúsviðgerðarstovnar. Heilsutrygd góðkennir viðgerðarstovnar eftir serstøkum leisti. Landsapotekarin viðger í løtuni umsóknir um tilskot til heilivág. Tilskot verður veitt til heilivág, sum av Landsapotekaranum er lýstur at vera heimilaður tilskot. Mett verður, at góðkenning av rúsviðgerðarstovnum og góðkenning av umsóknum um tilskot til heilivág eru yvirskipaðar uppgávur, ið, sum frálíður eiga at liggja hjá Fólkaheilsustýrinum.

  Í hinum norðanlondunum verður stórt arbeiði lagt í at eftirmeta m.a. skipanir og viðgerðartilboð. Í Føroyum verða skipanir og viðgerðartilboð sjáldan eftirmett. Eitt dømi er tó um eftirmeting í sambandi við tilboð um sálarfrøðiliga viðgerð og stovnar, ið veita rúsviðgerð. Mett verður, at uppgávan viðvíkjandi eftirmetingum, er ein yvirskipað uppgáva, ið eigur at liggja hjá Fólkaheilsustýrinum. Hetta er ein stór uppgáva, ið krevur nógva orku. Fyri ikki at gloypa um ov stóran bita, verður mett, at tað er skilabest at byrja við at skipa uppgávuna at eftirmeta rúsviðgerðarstovnar og tilboð um sálarfrøðiliga viðgerð undir Fólkaheilsustýrinum.

  > *Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið, sum frálíður, fær til uppgávu at góðkenna rúsviðgerðarstovnar og umsóknir um tilskot til heilivág, umframt at eftirmeta rúsviðgerðarstovnar og tilboð um sálarfrøðiliga viðgerð.*

## Grundarlag undir arbeiðinum hjá Fólkaheilsustýrinum

Eitt munadygt fólkaheilsuarbeiði má byggja á eitt vísindaligt støði. Eitt sterkari fakligt kjølfesti í fólkaheilsuarbeiðinum kann hava við sær betri úrslit og skilabetri orkunýtslu. Staðfestast

kann, at tað finst ikki nóg neyv og skipa vitan um fólkaheilsuna hjá føroyingum sum heild. Tað er tí neyðugt at fáa til vega vitan um, hvussu heilsustøðan hjá føroyingum er og lýsa gongdina á økinum. Henda vitan skal brúkast sum grundarlag undir teimum heilsupolitisku avgerðum, sum fara at verða tiknar, og er somuleiðis fyritreytin fyri at kunna málrætta tiltøkini fólkaheilsuni at frama.

Fyri at kunna røkja omanfyristandandi uppgávur, er neyðugt, at Fólkaheilsustýrið mennir og skipar neyðugar føroyskar heilsuskráir og hagtøl og ikki minst, at arbeiðið hjá Fólkaheilsustýrinum er granskingargrundað. Í hesari ætlan verður tí mælt til, at Fólkaheilsustýrið skal standa fyri at skipa, viðgera og menna heilsuskráir og hagtøl, umframt veita granskingargrundaða myndugleikatænastu. Niðanfyri er ein samandráttur av hesum tilmælum.

***Hagtøl.*** Ein fortreyt fyri at kunna fáa vitan um gongdina á fólkaheilsuøkinum er, at góð og álítandi hagtøl eru til taks. Ásannast má, at stórt trot er á hagtølum í Føroyum, tá tað snýr seg um heilsuviðurskifti og um viðurskifti, ið ávirka heilsuna. Hetta hevur við sær ta óhepnu avleiðing, at tað finst ikki nóg góð vitan um fólkaheilsustøðu føroyinga sum heild. Tann vitanin, sum fæst til vega, er ofta spjødd og óskipa. Av somu orsøk, verða donsk hagtøl ofta nýtt, tá støðan í Føroyum verður viðgjørd. Men av tí, at støðan í Føroyum og Danmark á mongum økjum er ymisk, kann tað geva eina misvísandi mynd av støðuni í Føroyum, um donsku hagtølini verða brúkt. Tørvur er tí á at fáa føroysk hagtøl.

*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at skipa hagtøl á heilsuøkinum, gera lýsingar og greiningar av heilsustøðuni hjá íbúgvum í Føroyum; at gera, viðgera og menna hagtøl innan heilsuøkið. Mælt verður samstundis til, at menningin av hagtølum, ið fer fram innan Sjúkrahúsverkið, heldur fram óbroytt.*

***Heilsuskráir.*** Um Fólkaheilsustýrið skal gera tilmælir til politiska myndugleikan um ráðlegging innan heilsuverkið; veita heilsufakliga ráðgeving; hava um hendi fólkaheilsusarbeiði; gera vegleiðingar til heilsuverkið; veita kunning til borgarar og almenning v.m, er neyðugt, at tær yvirskipaðu skráirnar í Føroyum verða staðsettar í Fólkaheilsustýrinum. Í kapitli 5 eru tær heilsuskráir lýstar, ið eru í Føroyum í løtuni. Mett verður, at tað ikki tænir endamálinum, at allar hesar heilsuskráir verða fluttar til Fólkaheilsustýrið. Heldur verður mett, at arbeitt eigur at verða fram ímóti, at yvirskipaðar skráir verða staðsettar í Fólkaheilsustýrinum.

Í hesum sambandi verður mælt til, at ein nýggj Landssjúklingaskrá verður bygd upp og staðsett í Fólkaheilsustýrinum. Hugsað verður her um eina skrá, líknandi danska „Landspatientregisteret“. Í skránni eru neyvar, skipaðar upplýsingar úr sjúklingajournalum um allar danir, herundir diagnosur, aktiónsdiagnosur, hjádiagnosur, kanningar, skurðviðgerðir og føðingar hjá øllum dønum. Við støði í Landssjúklingaskránni, kann Fólkaheilsustýrið gera tilmælir til politiska myndugleikan um ráðlegging innan heilsuverkið, veita heilsufakliga ráðgeving v.m. Slík skrá er eisini neyðug til tess, at granskarar í Føroyum kunnu hava eitt haldgott undirstøðukervi at granska í.

*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at uppbyggja og menna eina Landssjúklingaskrá, og at upplýsingar í hesi skrá verða fingnar til vega úr teimum skráum, ið longu eru í Føroyum, umframt úr danska: „Landspatientregisteret“.*

Í Diagnosuskránni á Ílegusavninum verða goymdar upplýsingar um tær diagnosur og aðrar heilsuupplýsingar, ið verða latnar til verkætlanir innan ílegugransking. Diagnosuskráin er ein

skrá við diagnosum hjá føroyingum kring alt landið. Í Ættarbandsskránni á Ílegusavninum verða goymdar upplýsingar um ættarbond. Hendan skráin er somuleiðis ein landsumfatandi skrá um ættarbond hjá føroyingum. Mett verður, at hesar skráir hóska væl til uppgávurnar hjá Fólkaheilsustýrinum at menna hagtøl og Landssjúklingaskrá. Mett verður tí, at hesar skráir eiga at liggja í Fólkaheilsustýrinum. Møguliga kann diagnosuskráin við tíðini mennast til eina Landssjúklingaskrá. Vevnaðarskráin er biobankin hjá Ílegusavninum. Mett verður, at av tí, at tær tríggjar skráirnar hjá Ílegusavninum hanga neyvt saman og talan er um yvirskipaðar skráir, eiga allar tríggjar skráirnar at verða fluttar til Fólkaheilsustýrið.

*Mælt verður til, at Ílegusavnið við sínum skráum: Diagnosuskráin, Ættarbandsskráin og Vevnaðarskráin, verða fluttar til Fólkaheilsustýrið at umsita. Mælt verður til, at tann parturin av FarGen verkætlanini, sum inniber gransking, verður staðsettur í tí heilsugranskingareindini, ið verður skipað í sambandi við hetta arbeiðið. Mælt verður til, at sjálvt undirstøðukervið verður verandi í Vevnaðarskránni, sum verður staðsett undir Fólkaheilsustýrinum. Dáturnar í undirstøðukervinum kunnu síðani verða nýttar til at menna skipanina við persónlagaðum medisini fyri allar føroyingar.*

Harumframt verður mælt til, at Krabbameinsskrásetingin innan Sjúkrahúsverkið verður flutt til Fólkaheilsustýrið at umsita. Eisini verður mælt til, at Fólkaheilsustýrið í samstarvi við Landslæknan, fær til vega avrit av verandi upplýsingum í dødsårsagsregister, fødselsregister og register om smitsomme sygdomme, soleiðis at hesar upplýsingar verða goymdar í Fólkaheilsustýrinum. Hetta av teirri orsøk, at talan er um yvirskipaðar heilsuskráir, ið fevna um upplýsingar um alt Føroya fólk. Mælt verður til, at hesar skráir í Fólkaheilsustýrinum javnan verða dagførdar við upplýsingum um deyðsorsøkir, føðing og smittandi sjúkur. Harumframt verður mælt til, at skjøtul verður settur á arbeiðið at fáa upplýsingar um føroyingar í øðrum skráum uttanlands og úr „Misdannelsesregisteret" til Føroya. Verður politisk støða tikin til at stovnseta føroyskar skráir viðvíkjandi: vevnaðarnýtsluskrá, viðgerðartestamentiskrá og skipan viðvíkjandi ótilætlaðum hendingum í heilsuverkinum, verður mælt til at staðseta hesar í Fólkaheilsustýrinum.

*Mælt verður til, at arbeiðið við heilsuskráum í Fólkaheilsustýrinum verður uppraðfest og styrkt komandi árini. Hetta fyri at Fólkaheilsustýrið kann fáa haldgott grundarlag til at veita heilsufakliga ráðgeving og gera tilmælir um ráðlegging innan heilsuverkið v.m.*

*Mælt verður til, at borgaravenda skráin: heilsuportal.fo, sum frá líður, verður ment. Hugsað verður um eina talgilda skipan, har føroyingar fáa atgongd til sínar heilsuupplýsingar á alnótini, umframt fáa kunning um heilsuviðurskifti sum heild. Mælt verður til, at heilsuportalurin verður staðsettur antin í Sjúkrahúsverkinum ella Fólkaheilsustýrinum.*

*Mælt verður ikki til, at talgilda sjúklingajournalin hjá heilsuverkinum, Cosmic, umframt skipanir og skráir hjá Heilsutrygd og Apoteksverkinum verða fluttar til Fólkaheilsustýrið. Hetta av tí, at sjúklingajournalin, Cosmic er høvuðsarbeiðsamboðið hjá Sjúkrahúsverkinum, eitt amboð, sum teimum tørvar í dagliga arbeiðinum. Somuleiðis eru skráirnar hjá Heilsutrygd og Apoteksverkinum arbeiðsamboð hjá stovnunum. Mælt verður til, at samstarv verður ímillum Fólkaheilsustýrið og Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd og Apoteksverkið um at fáa neyðugar upplýsingar úr skráunum í Landssjúklingaskránna.*

*Viðvíkjandi papírsjournalunum hjá Gigni og kommunulæknum, sum eru staðsettar í Heilsutrygd, verður mælt til, at arbeiði verður sett í verk at fáa tilfarið í hesum*

*journalum skrásett talgilt, so upplýsingar frá hesum skráum kunnu verða skrásettar í Landssjúklingaskránni.*

Í Sjúkrahúsverkinum manglar bíðilistaskrá. Endamálið við eini bíðilistaskrá er at veita bæði teimum, sum skipa fyri og leiða heilsuverkið, og brúkarum tess, neyva vitan um, hvussu leingi bíðitíðin er til útgreiningar og viðgerðir. Slík skrá er tengd at virkseminum í Sjúkrahúsverkinum, og eigur ikki at verða skipað undir Fólkaheilsustýrinum. Mælt verður til, at slík skrá verður staðsett og ment innan Sjúkrahúsverkið.

## *Heilsugransking*

Um Fólkaheilsustýrið skal kunna gera tilmælir til politiska myndugleikan um ráðlegging innan heilsuøkið og veita heilsufakliga ráðgeving til politiska myndugleikan og heilsustarvsfólk, er neyðugt, at tey starvsfólk, ið starvast í Fólkaheilsustýrinum, eru vælskikkað og hava neyðugar fakligar førleikar umframt royndir innan heilsuøkið. Í arbeiðinum við ætlan um Fólkaheilsustýrið hevur verið ført fram, at tað alneyðugt fyri, um stovnurin kemur at virka ella ikki, at tey starvsfólk, ið starvast á stovninum hava stóra vitan og drúgvar royndir innan heilsuøkið.

Í Danmark verður heilsugransking, ið hevur til endamáls at ráðgeva politiska myndugleikanum, kallað: „forskningsbaseret myndighedsbetjening". Sundhedsministeriet hevur gjørt avtalu við Statens Institut for Folkesundhed, sum inniber, at Statens Institut for Folkesundhed bindur seg til at granska og veita ráðgeving til politiska myndugleikan innan ávís økir á heilsuøkinum.

*Mælt verður til, at slík granskingargrundað ráðgeving til politiska myndugleikan verður partur av virkseminum í Fólkaheilsustýrinum. Hetta soleiðis, at heilsugranskari í styttri tíðarskeið, granskar innan ávís økir, ið politiski myndugleikin hevur umbiðið. Mælt verður til, at Heilsumálaráðið og Fólkaheilsustýrið gera avtalu um hesa granskingargrundaðu myndugleikatænastu.*

Ætlanin er tó ikki, at tann heilsugransking, sum í dag fer fram á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Sjúkrahúsverkinum, Ílegusavninum, Fólkaheilsuráðnum og Fróðskaparsetrinum, skal staðsetast í Fólkaheilsustýrinum. Um so var, varð talan um ein heilsugranskingarstovn og ikki ein myndugleikastovn, sum ætlanin er at stovnseta.

*Mælt verður í staðin til, at arbeitt verður fram ímóti at staðseta heilsugranskingina í Føroyum samlað á einum stað, helst innan Sjúkrahúsverkið, nær økinum, har Fólkaheilsustýrið verður staðsett. Hetta soleiðis, at Fólkaheilsustýrið og heilsugranskingin kunnu fáa ágóða hvørt av øðrum. Mælt verður samstundis til, at Sjúkrahúsverkið verður góðkent sum universitetssjúkrahús, og at ein langtíðarætlan fyri heilsugransking í Føroyum verður gjørd.*

## *Ílegugransking*

Tá ið heilsugransking verður umrødd, er neyðugt at skilja ímillum heilsugransking og ílegugransking. Heilsugransking er eitt breitt hugtak, ið fevnir um m.a. gransking í menniskjum, menniskjaligum kynskyknum, vevnaði ella líknandi. Heilsugransking fevnir sostatt eisini um ílegugransking, men ílegugransking fevnir bert um gransking í mannaílegum, sum er tengd at ættartræi. Av tí, at tað í hesari ætlan verður mælt til, at Ílegusavnið verður skipað undir Fólkaheilsustýrinum, verður mett, at tað er neyðugt at hava eitt serstakt brot um ílegugransking.

Ein granskingarverkætlan innan ílegur skal, sum aðrar heilsugranskingarverkætlanir, hava góðkenning frá Vísindasiðseminevndini, umframt kunnað samtykki frá granskingarluttakara, áðrenn granskingarverkætlanin kann fara í gongd.

Harumframt skal ein granskingarverkætlan innan ílegur hava góðkenning frá Ílegusavninum, áðrenn granskingarverkætlanin kann fara í gongd. Hetta av tí, at talan er um sera viðkvæmar heilsuupplýsingar, ið hava tørv á serligari verju. Hetta inniber, at granskarin sendir umsókn til Ílegusavnið um loyvi at granska í upplýsingum í omanfyrinevndu skráum. Ílegusavnið viðger umsóknina og ger sáttmála við granskaran um gransking í upplýsing í skráunum hjá Ílegusavninum.

*Mælt verður til, at ílegugransking í Føroyum, herundir granskingarverkætlanirnar hjá FarGen, verða skipaðar í heilsugranskingareindini, ið verður skipað í sambandi við hetta arbeiðið, samstundis sum Fólkaheilsustýrið verður skipað.*

*Mælt verður til, at umsitingin av teimum trimum skráunum hjá Ílegusavninum: Vevnaðarskráin, Diagnosuskráin og Ættarbandsskráin, umframt sáttmálar við granskarar um nýtslu av upplýsingum og vevnaði í skráunum, verður skipað undir Fólkaheilsustýrinum.*

### Stovnseta eitt Fólkaheilsustýri

Ætlanin er, at Fólkaheilsustýrið skal fara til verka tann 1. januar 2022. Ein fortreyt fyri, at Fólkaheilsustýrið kann fara til verka tá er, at komið er á mál við at skipa praktisku viðurskiftini kring Fólkaheilsustýrið, so sum at seta stjóra og finna hølir.

Harumframt er ein fortreyt fyri, at Fólkaheilsustýrið kann fara til verka, at praktisku viðurskiftini viðvíkjandi heilsugranskingini, sum í dag fer fram á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Sjúkrahúsverkinum, Ílegusavninum, Fólkaheilsuráðnum og á Fróðskaparsetrinum, eru fingin upp á pláss, herundir umsiting og hølir. Limirnir í serfrøðingabólkinum hava greitt boðað frá, at fortreytin fyri, at tey taka undir við at Fólkaheilsustýrið verður sett á stovn er, at heilsugranskingin samstundis fær tryggar karmar.

*Í arbeiðinum at tilevna ætlan um Fólkaheilsustýri, eru øll á einum máli um, at heilsugranskingin í Føroyum er í stórari menning, og at tað er sera týdningarmikið, at heilsugranskingin ikki fer fyri bakka, tí hetta fer at fáa álvarsligar fylgjur fyri framtíðar heilsugransking í Føroyum. Mælt verður tí til, at praktisku viðurskiftini kring Fólkaheilsustýrið og praktisku viðurskiftini kring heilsugranskingareindina koma uppá pláss samstundis.*

## 2.5. KAPITTUL 6 – UPPGÁVUR HJÁ STOVNUM OG RÁÐI, SUM KUNNU FLYTAST TIL FÓLKAHEILSUSTÝRIÐ

Mett verður, at alt virksemið hjá Fólkaheilsuráðnum við starvsfólkum kann flytast til Fólkaheilsustýrið við stovnsetan. Mett verður somuleiðis, at virksemið hjá Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og virksemið hjá Ílegusavninum, herundir tær skráir, sum Ílegusavnið umsitur, undantikið granskingarverkætlanir hjá FarGen, kunnu flytast til Fólkaheilsustýrið við stovnsetan. Mett verður tó, at kliniska uppgávan innan arbeiðs- og umhvørvislæknafrøði, ið verður loyst á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu í dag, eigur at verða flutt til Sjúkrahúsverkið. Mett verður eisini, at teir granskarar, ið eru staðsettir á

Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Ílegusavninum, eiga at verða fluttir í felags hølir í granskingareindini, nærhendis Fólkaheilsustýrinum.

Heilsumálaráðið umsitur í løtuni heilsutilbúgving, altjóða og norðurlendskt samstarv á heilsuøkinum, umframt ávísar frágreiðingar. Mett verður, at tann heilsufakligi parturin av hesum uppgávum kann flyta til Fólkaheilsustýrið.

Landsapotekarin hevur eftirlit við apoteksverkinum, og Heilsutrygd umsitur í løtuni góðkenning og eftirmeting av rúsviðgerðarstovnum, umframt hevur eftirlit við kommunulæknaviðtalum. Mett verður, at hesar uppgávur sum frálíður kunna leggjast til Fólkaheilsustýrið. Mett verður, at Krabbameinsskráin í Sjúkrahúsverkinum kann verða flutt til Fólkaheilsustýrið. Møguliga kunnu aðrar uppgávur innan Sjúkrahúsverkið, sum frálíður, flytast til Fólkaheilsustýrið.

## 2.6. KAPITTUL 7 – ÍVERKSETAN OG TÍÐARÆTLAN

Í ætlanini verður mælt til, at Fólkaheilsustýrið verður skipað í einum. Men um tað ikki letur seg gera, verður mælt til, at Fólkaheilsustýrið verður skipað í fýra stigum. Tær uppgávur, sum verða lagdar til eitt stig halda fram undir teimum fylgjandi stigunum:

### *Stig 1: 1. januar 2022 – 31. desember 2023*

Í hesum tíðarskeiðinum verður mælt til, at arbeiða við og menna:

- Stovnseta Fólkaheilsustýrið
- Skráir
- Hagtøl
- Fólkaheilsuarbeiði
- Uppgávur, ið eru lagdar til Ílegusavnið sambært ílegulógini
- Heilsufaklig ráðgeving
- Ráðlegging innan heilsuverkið

### *Stig 2: 1. januar 2024 – 31. desember 2025*

Í hesum tíðarskeiðinum verður mælt til at arbeiða við og menna:

- Kunning til borgarar og almenning, herundir eisini Heilsuportal.fo
- Vegleiðingar
- Heilsugransking/granskingargrundað myndugleikatænasta
- Heilsutilbúgving

### *Stig 3: 1. januar 2026 - 31. desember 2027*

Í hesum tíðarskeiðinum og frameftir verður mælt til at arbeiða við og menna:

- Eftirmetingar
- Góðkenningar
- Eftirlit
- Dygdarmenning yvirskipað
- Lýsingar og greiningar
- Norðurlendskt og altjóða heilsufakligt samstarv

*Stig 4: 1. januar 2028 ->*
Í hesum tíðarskeiðinum og frameftir verður mælt til at arbeiða við:

- At menna Fólkaheilsustýrið víðari fram á leið, umframt menna aðrar skipanir, herundir Vevnaðarnýtsluskrá (Vævsanvendelsesregister) og Viðgerðartestamentiskrá (Behandlingstestamenteregister)

## 2.7. KAPITTUL 8 – FÍGGJARLIG LÝSING

Tá ið Fólkaheilsustýrið verður sett á stovn, verða játtanirnar á fíggjarlógini hjá Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Fólkaheilsuráðnum og Ílegusavninum, lagdar saman í eina játtan. Harumframt verður neyðugt, at játtan verður sett av til tær nýggju uppgávurnar, ið skulu leggjast til Fólkaheilsustýrið.

## 2.8. KAPITTUL 9 – LÓGARVERK OG LÓGARBROYTINGAR

Viðvíkjandi lógarverki verður mett, at neyðugt er at tilevna eitt løgtingslógaruppskot um Fólkaheilsustýri, har ásett verður, hvat innihaldið í stovninum verður. Harumframt verður neyðugt at seta úr gildi løgtingslóg um Fólkaheilsuráð og gera smávegis broytingar í ásetingum í lóg og kunngerð um Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág, løgtingslóg um stovnar, ið veita rúsviðgerð, løgtingslóg um kommunulæknaskipan og løgtingslóg um barna- og ungdómstannrøkt.

*Mælt verður til, at lógaruppskot um Fólkaheilsustýri verður lagt fyri Løgtingið í heyst, og at neyðugar tillagingar verða gjørdar í viðkomandi lóggávu.*

# 3. UPPGÁVUR HJÁ STOVNUM OG RÁÐI Á HEILSUØKINUM

## 3.1. INNGANGUR

Í hesum kapitli verða virkisøkini hjá teimum stovnum og ráðið á heilsuøkinum lýst, ið hava uppgávur, sum kunnu flytast til Fólkaheilsustýrið. Lýsingin verður brúkt sum grundarlag undir viðgerðini í kapitli 5, sum snýr seg um innihaldið í komandi Fólkaheilsustýrinum.

## 3.2. DEILDIN FYRI ARBEIÐS- OG ALMANNAHEILSU

Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu varð sett á stovn í 1988. Upprunaheitið var „arbeiðsmedisinska deild í sjúkrahúsverkinum“.

Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu hevur sum uppgávu at kanna einstaklingar fyri sjúku ella mein av arbeiðsávum; at meta um arbeiðsførleika, serliga í sambandi við fyritíðarpensjón, endurbúgving og yrkisráðgeving; at ráðgeva Arbeiðs- og brunaeftirlitinum og Sjóvinnustýrinum í arbeiðsmedisinskum spurningum; at skipa fyri sjúkufyribyrgjandi arbeiði og at fremja granskingarvirksemi innan arbeiðs- og almannaheilsu og harafturat starvar deildin sum eitt ambulatorium í sjúkrahúsverkinum.

Deildin fyri Arbeiðs- og Amannaheilsu arbeiðir í høvuðsheitum við at granska, hvussu umhvørvið ávirkar heilsuna hjá fólki og við at lýsa fólkaheilsuna í Føroyum. Deildin hevur savnað eitt sera stórt tilfar við vísindaligum upplýsingum um føroyingar. Serliga kohortukanningarnar við lívsins byrjan eru rúgvusmiklar. Harafturat vekstur virði á hesum kanningum í atljóða granskingarhøpi. Talan er um viðkvæmar persónsupplýsingar um heilsuviðurskifti hjá navngivnum einstaklingum. Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu



Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu

hevur eitt stórt tal av sjúklingajournalum um fólk, sum hava verið til kanningar har, seinastu stívliga 30 árini.

Á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu starvast tilsamans 4 starvsfólk í føstum starvi:

- Ein yvirlækni
- Ein fíggjarleiðari
- Ein skrivari
- Eitt reingerðingarfólk hálva tíð

Á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu eru eisini 11 granskarar. Granskarnir eru settir í granskingarverkætlanum í tíðaravmarkaðum størvum, ávikavist fulla tíð ella niðursetta tíð. Teir verða løntir umvegis granskingarverkætlanir sínar og hava setanarsáttmála við Deildina.

Játtanin á Løgtingsins fíggjarlóg til Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu fyri fíggjarárið 2021 er 2,257 mió. kr., sum er til vanliga virksemið hjá Deildini. Granskingarvirksemið, sum fer fram í neyvum samstarvi við starvsfelagar í Evropa, USA og Japan, er fíggjað við peningi úr almennum og privatum grunnum í USA, ES, Danmark og Føroyum. Í løtuni hevur Deildin granskingarjáttanir uppá umleið 10 milliónir krónur og umsóknir eru sendar US-National Institutes of Health og ES-Horizon fyri aðrar 20 mill. kr.

## 3.3. FÓLKAHEILSURÁÐIÐ

Fólkaheilsuráðið er ráð undir Heilsumálaráðnum. Fólkaheilsuráðið er skipað sum eitt fakráð við 7 limum. Landsstýrisfólkið velur limirnar fyri 4 ár í senn. Ein limur umboðar undirvísingarverkið, ein limur umboðar almannaverkið, tríggir limir eru heilsustarvsfólk og ein limur umboðar løgregluna. Landsstýrisfólkið velur sjeynda limin, sum eisini skal hava serligt innlit í almanna- og heilsuviðurskifti. Landsstýrisfólkið velur forfólk og næstforfólk millum limirnar í ráðnum.

Sambært § 1 í lógini um Fólkaheilsuráðið eru uppgávurnar hjá ráðnum:

- At styrkja tiltøk fyri heilsufremjing, sjúku- og vanlukkufyribyrging, bæði á almanna- og heilsuverkinum
- At ráðgeva lands- og kommunalum myndugleikum í sambandi við heilsufremjandi, sjúku- og vanlukkufyribyrgjandi tiltøk við ráðgeving og stuðli til royndar- og menningararbeiði kring landið
- At taka stig til kanningar og útgreiningar, sum eiga at verða framdar sum liður í einum heildarfyribyrgingartiltaki, ella sum liður í eini meting av verandi heilsufremjandi og sjúku- og vanlukkufyribyrgjandi tiltøkum
- At stimbra gransking og royndir innan fyribyrgingarøkið
- At skipa fyri, at ítøkilig heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi tiltøk í fólkaheilsuætlanum landsstýrisins verða sett í verk og framd.

Síðani Fólkaheilsuráðið (áður Fyribyrgingarráðið) varð skipað í ár 2000, hevur ráðið havt eina skrivstovu. Fyrstu árini hevði Fólkaheilsuráðið ein fakligan skrivara. Fólkaheilsuráðið, sum varð valt í 2005, valdi harumframt at seta ein skrivara/samskipara í parttíðarstarv, og at seta ymisk starvsfólk í tíðaravmarkað størv at taka sær av verkætlanunum, sum Fólkaheilsuráðið valdi at seta í verk. Seinni varð skipanin við tí fakliga skrivaranum niðurløgd, og ein fulltrúi varð settur í starv í staðin fyri. Harafturat hevur ráðið verkætlanarsett starvsfólk, at fremja ávís átøk í longri tíðarskeið. Fólkaheilsuráðið stendur fyri Gallup kanningum og 'Hvussu hevur tú tað?' kanningum. Arbeiðið hjá Fólkaheilsuráðnum verður millum annað lagt til rættis við atliti til úrslitini frá hesum kanningunum.

Ráðið leggur dent á samstarv og samstarvar bæði við feløg, kommunur og stovnar í verk-

ætlanini ABC fyri sálarliga heilsu, umframt at samstarva tvørtur um stjórnarráð við átøkum, sum eru heilsufremjandi innanfyri virkisøkið hjá Fólkaheilsuráðnum.

Í løtuni starvast hesi á skrivstovuni hjá Fólkaheilsuráðnum:

- Ein fulltrúi í fulltíðarstarvi
- Ein skrivari/samskipari í parttíðarstarvi
- Ein samskipari fulla tíð til 2024, sum eisini er verlætnarleiðari fyri ABC fyri sálarliga heilsu
- Ymisk starvsfólk í styttri tíðaravmarkaðum størvum. Í løtuni er ein kostfakligur leiðari settur tíðarmarkað 15 tímar um vikuna og ein samskipari til verkætlanina, Skúlaleikir, tíðaravmarkað 10 tímar um vikuna

Játtanin á Løgtingsins fíggjarlóg fyri 2021 til Fólkaheilsuráðið er 3.367 mió. kr. Játtanin er til at fíggja virksemið hjá Fólkaheilsuráðnum, herundir at fíggja ítøkilig fólkaheilsuátøk á teimum økjum, sum eru raðfest í fólkaheilsuætlanini hjá landsstýrinum. Tað vil siga átøk, sum snúgva seg um kost, rørslu, royking, rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu og fyribyrgjandi heilsukanningar. Virkisøkið er seinni víðkað til eisini at fevna um sálarliga heilsu.

## 3.4. ÍLEGUSAVNIÐ

Ílegusavnið er tann føroyski Biobankin, sum, tá ið ræður um ílegugransking knýtt at ættartrøum, umsitur allar upplýsingar um blóðroyndir, vevnaðarroyndir, staðfestar sjúkur og ættarbond hjá føroyingum. Uppgávan hjá Ílegusavninum er at tryggja, at upplýsingarnar eru rættar; verða væl vardar og goymdar trygt. Sambært ílegulógini er endamálið hjá Ílegusavninum at skipa, byggja upp og fyrisita Vevnaðarskránna, Diagnosuskránna og Ættarbandsskránna; at viðgera umsóknir um loyvi til at granska í upplýsingunum í skráunum, herundir at krevja gjald fyri tær veitingar og upplýsingar, sum Ílegusavnið gevur atgongd til. Sambært Ílegulógini, skulu skráirnar bert innihalda upplýsingar, sum eru ella kunnu verða viðkomandi fyri ílegugransking. Endamálið er eisini at skapa fortreytir fyri og stimbra gransking í mannaílegum í Føroyum, soleiðis at slík gransking kann vera við til, at: 1) menna førleikan at lekja og fyribyrgja sjúkum; 2) menna almennu heilsutænastuna og 3) menna granskingarumhvørvið.



Ílegusavnið og Fólkaheilsuráðið

Ílegusavnið er ikki ein granskingarstovnur, men er ein samskipandi eind innan heilsuverkið, ið hevur sum uppgávu at fáa uppbygt nevndu skráir, gera møguligar forkanningar og viðgera umsóknir um at granska í upplýsingunum.

## *Árligur kostnaður av at umsita skráirnar*

Árligi kostnaðurin hjá Ílegusavninum av at umsita skráirnar er hesin:

Á Ílegusavninum starvast tilsamans 2 starvsfólk í føstum starvi:

- Ein stjóri
- Ein samskipari (½ tíð)
- Eitt hjálparfólk (½ tíð) (vart starv)

Á Fargen starvast tilsamans 2 1/2 starvsfólk í føstum starvi:

- Ein verkætlanarleiðari
- Ein laboratoriusamskipari
- Eitt kunningarfólk/samskipari (½ tíð)

Harumframt starvast 13 starvsfólk í tíðaravmarkaðum størvum, ávikavist fulla tíð ella niðursetta tíð, í ymiskum granskingarverkætlanum. Hesir granskarar eru ikki í starvi á Ílegusavninum, men halda til í hølum har. Granskararnir fáa ikki løn frá Ílegusavninum, men verða løntir umvegis egnar granskingarverkætlanir, tað vil siga, at granskingarverkætlanirnar eru fíggjaðar við uttanhýsis fígging.

Fleiri føroyskar forkanningar- og granskingarverkætlanir eru staðsettar á Ílegusavninum. Hetta virksemið, sum er í neyvum samstarvi við starvsfelagar í Europa, USA og Kanada, er fíggjað við peningi úr almennum og privatum grunnum. Hetta sæst aftur í fíggingini av verkætlanunum og í inntøkum, sum eru gjøld frá verkætlanum, sum verða nýttar til samsýning til kliniskar ábyrgdahavarar í heilsuverkinum, sjúkrarøktarfrøðingar, bioanalytikarar og onnur, sum arbeiða við tilfari til verkætlanirnar.

## *Fargen*

FarGen er ein verkætlan undir Ílegusavninum. FarGen er eitt undirstøðukervi til eina genomskrá í Føroyum. Málið við FarGen-verkætlanini er at lesa arvastreingin (genomið) hjá øllum føroyingum, sum vilja tað. FarGen-verkætlanin er í gongd við at menna ein pall til persónlagað medisin, har vitan um ílegurnar hjá *einstaka* sjúklinginum verða brúktar sum amboð til sjúkuavgerð og sjúkuviðgerð, sum er lagað til einstaka sjúklingin. Í løtuni eru 1.540 luttakarar í FarGen-verkætlanini. Fleiri granskingarverkætlanir innan sjúkur sum bróstkrabba, tarmsjúku (IBD) og ADHD, sum nýta FarGen dátur eru í gongd og aðrar eru á veg. Flestu av hesum eru fíggjaðar við føroyskum ella útlendskum pengum.

Í næstum fer FarGen í gongd við at innsavna fleiri luttakarar til FarGen-verkætlanina, har serligur dentur verður lagdur á at kanna íleguávirkanina á sjúkur við høgum títtleika í Føroyum t.d. diabetes, tarmsjúkur og gikt. Við støði í tí føroyska fólkinum, fer slík gransking at vera við til at betra um møguleikarnar at viðgera og fyribyrgja sjúkum, sum alsamt fleiri fáa. Tað hevur stóran týdning, at fylgja menningini innan læknafrøðina, tí á henda hátt ber til at tryggja, at føroyska heilsuverkið mennir seg tíðarhóskandi, til fyrimuns fyri bæði sjúklingar og samfelagið. Hetta er FarGen-verkætlanin við til at tryggja.

Ílegusavnið verður fíggjað partvíst við játtan á Løgtingsins fíggjarlóg og partvíst við stuðli til granskingarverkætlanir frá ymsum útlendskum og føroyskum grunnum og stovnum. Játtanin á Løgtingsins fíggjarlóg fyri 2021 til Ílegusavnið, er 5,419 mió. kr. (av hesum eru 3 mió. kr. markaðar til Fargen). Stuðulin til granskingarverkætlanir frá øðrum var í 2021 3,5 mió. kr. Tilsamans 10 mió. kr. vórðu játtaðar til FarGen verkætlanina á donsku fíggjarlógina, árini

2015-2017. Játtanin er m.a. brúkt til at innsavna, klárgera og talgilda (genomsekvensera) blóðroyndir hjá 1.500 persónum.

## 3.5. LANDSAPOTEKARIN

Landsstýrið tilnevnir Landsapotekaran. Starvið sum Landsapotekari er tvíbýtt: Landsapotekarin er bæði stjóri fyri Apoteksverkið og myndugleiki á heilivágsøkinum t.v.s. hevur eftirlit við, at lógin og ásetingarnar við heimild í lógini verða hildnar.

Uppgávurnar hjá Landsapotekaranum sum myndugleiki fevna um:

- Eftirlit
  - Eftirlit við, at ásetingarnar í lógini verða hildnar
  - Eftirlitstænasta fyri TAKS í sambandi við innflutning av ólógligum heilivágsevnum ella dopingevnum
- Ráðgeving
  - Ráðgeva landsstýrisfólkið o.ø. í sambandi við lógarverkið innan heilivágsøkið
  - Ráðgeva um heilivágsviðurskifti og heilivágsøkið sum heild
- Útvega hagtøl
  - Útvega hagtøl um heilivágsnýtslu at nýta í Føroyum og í norðurlendskum samstarvi (NOMESCO)
- Aðrar uppgávur
  - Viðgera umsóknir um tilskot til heilivág sambært heilsutrygdarlógini
  - Ymsar uppgávur viðvíkjandi bekendtgørelse for Færøerne om euforiserende stoffer
  - Seta á stovn/lata aftur handkeypssølur
  - Umbiðja GMP eftirlit til framleiðsluna
  - Tryggja, at ISO eftirlit verður gjørt á øllum apotekum
  - Ábyrgd av KT-trygd fyri apoteksverkið, herundir virka fyri, at apoteksverkið verður góðkent eftir ISO 27001
  - Ábyrgd av tilbúgving innan heilivágsøkið í sambandi við umfarssjúkur og aðrar kreppustøður
  - Heilivágsviðurskifti við útlendskar stovnar og myndugleikar, herundir Pharmacovigilance (t.d. yvirvøku í sambandi við hjáárin)
  - Fyrispurningar frá útlendskum fyritøkum og stovnum.
  - Ábyrgd av kliniska stápinum í Apoteksverkinum

Landsapotekarin er eisini limur í hesum nevndum og ráðum: Skrásetingarráðið (Landsapotekarin hevur skrivstovuhaldið og ber allar útreiðslur av virki ráðsins), Heilivágsráðið fyri dýran sjúkrahúsheilivág, Svalbardgruppen, Nordisk Arbejdsgruppe for information- og erfaringsudveksling, Nordisk lægemiddelforum og formaður í GBLAP.

Lægemiddelstyrelsen í Danmark ger fleiri uppgávur innan føroyska apoteksverkið og heiligvágsøkið eftir áheitan frá Landsapotekaranum.

Starvsfólk innan Landsapotekaraembætið eru ein landsapotekari (sum eisini er stjóri fyri Apoteksverkið) og ein skrivari, ið starvast hálva tíð.

Virksemið hjá Apoteksverkinum, herundir landsapotekarastarvið og tær uppgávur, sum hoyra starvinum til, viðlíkahald og útbygging av ognum, verður fíggjað við søluni hjá Apoteksverkinum. Av somu orsøk hevur Apoteksverkið eina rakstrarjáttan á fíggjarlógini, sum er 0,00 kr.

## 3.6. HEILSUTRYGD

Heilsutrygd varð sett á stovn 1. januar 2010, og samstundis fóru teir 11 sjúkrakassarnir kring landið í søguna.

Tá Heilsutrygd varð sett á stovn, vórðu uppgávurnar hjá sjúkrakøssunum lagdar í Heilsutrygd, umframt, at partar av uppgávunum hjá Almannastovuni, serliga innan hjálparráð, eisini vórðu lagdar til Heilsutrygd. Síðani 2010 eru eisini aðrar uppgávur lagdar til Heilsutrygd at fyrisita.

Uppgávurnar hjá Heilsutrygd eru at umsita skipanina við heilsutrygdarveitingum og heilsukanningarskipanina (profylaksir) umframt Kommunulæknaskipanina, Økisheilsuskipanina og fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung. Heilsutrygd umsitur og avroknar stuðul til meginpartin av primeru heilsutænastunum í Føroyum, herundir kommunulæknaviðtalur, stuðul til m.a. hjálparráð, ískoyti til viðgerð hjá tannlækna, fysioterapeuti, ergoterapi, sálarfrøðingi og kiropraktor. Somuleiðis umsitur Heilsutrygd í samstarvi við Apoteksverkið skipanina við heilivágstilskoti. Ein samskipari við læknafakligari bakgrund røkir ymsar heilsufakligar uppgávur fyri Heilsutrygd. Heilsutrygd umsitur royndarskipanina við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð til persónar í aldursbólkinum 15-35 ár. Sambært løgtingslóg um virksemi á stovnum, ið veita rúsviðgerð, skal Heilsutrygd góðkenna og hava eftirlit við stovnum sum veita rúsviðgerð. TAKS krevur inn heilsutrygdargjaldi vegna Heilsutrygd.

## 3.7. SJÚKRAHÚSVERKIÐ

Sjúkrahúsverkið fevnir um tey trý sjúkrahúsini, Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús, harundir eisini viðgerðir uttanlands og sjúklingahotellið í Keypmannahavn. Landssjúkrahúsið hevur áleið 120 sengur innan somatiska og psykiatriska økið, og samanlagt áleið 900 starvsfólk. Klaksvíkar sjúkrahús hevur á leið 32 sengur innan somatiska økið og á sjúkrahúsinum starvast um 120 starvsfólk. Suðuroyar sjúkrahús hevur 26 seingjarpláss innan somatiska økið og samanlagt hava áleið 110 starvsfólk sítt dagliga yrki á Suðuroyar sjúkrahúsi.

Aðaluppgávan hjá sjúkrahúsunum er at kanna, viðgera, røkta og venja sjúklingar uppaftur.







Sjúkrahúsverkið hevur eina bráðfeingis tilbúgvingarskipan alt samdøgrið innan tey stóru serlæknaøkini.

Yvirskipaða leiðslan er mannað við einum forstjóra fyri Sjúkrahúsverkið við evstu leiðsluábyrgd umframt tveimum stjórum, sum vísa til forstjóran. Forstjórin hevur yvirskipaðu ábyrgdina mótvegis Heilsumálaráðnum og skal tryggja, at samlaða føroyska sjúkrahúsverkið kann virka sum ein vælvirkandi og virkislig eind.

### 3.7.1 GRANSKING Í SJÚKRAHÚSVERKINUM

Landssjúkrahúsið er granskingarstovnur, og eru fleiri verkætlanir í gongd innan ymisk heilsufaklig øki. Talan er um bæði ph.d. verkætlanir og aðrar granskingarverkætlanir. Fyri fáum árum síðani var at kalla ongin skipað gransking á Landssjúkrahúsinum, men seinnu árini hevur granskingin vundið nógv upp á seg. Á Landssjúkrahúsinum er Granskingarnevnd sett, sum m.a. hevur til uppgávu, at viðvirka til at fáa gongd á og økja um granskingarvirksemi.

Í Granskingar- og Menningarlonini, sum barakkin á J.C. Svabosgøtu verður kallað, finst eitt kveikjandi granskingarumhvørvi. Har húsast Fólkaheilsuráðið, Ílegusavnið, FarGen-verkætlanin, umframt granskarar á Landssjúkrahúsinum.

## 3.8. LANDSLÆKNIN

Landslæknaembætið er ein danskur stovnur í Føroyum, sum hoyrir undir Styrelsen for Patientsikkerhed, ið er undir Sundhedsministeriet. Uppgávunar hjá Landslæknaembætinum fevna um eina røð av uppgávum, sum hoyra undir ávikavist Styrelsen for Patientsikkerhed, Sundhedsstyrelsen, Sundhedsdatastyrelsen og Lægemiddelstyrelsen.

Landslæknaembætið hevur eftirlit við bæði heilsufakliga virkseminum, ið løggildug heilsustarvsfólk (læknar, sjúkrarøktarfrøðingar, tannlæknar, fysioterapeutar o.o) útinna í Føroyum og við viðgerðarstøðum. Landslæknin hjálpir rættar- og løgreglumyndugleikunum í Føroyum í rættarmedisinskum og líknandi málum umframt at ráðgeva Akstovuni í sambandi við viðgerð av koyrikortsmálum. Landslæknin fylgir heilsustøðuni í Føroyum og heldur seg kunnaðan um verandi vitan á heilsuøkinum í Føroyum. Føroyskir myndugleikar kunnu fáa ráðgeving frá Landslæknanum í reinføris-, umhvørvis- og sosialmedisinskum viðurskiftum. Landslæknin kunnar almenningin í Føroyum, tá ið serlig heilsulig viðurskifti gera tað neyðugt. Landslæknin fær fráboðanir um eina røð av smittandi sjúkum og setur í verk fyriskipanir, sum hava til endamáls at forða fyri smittuspjaðing. Í Landslæknaembætinum starvast: Landslæknin, ein lækni í introstarvi, tvey skrivstovufólk og tveir ráðgevarar.

## 3.9. FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA – DEILDIN FYRI HEILSU- OG SJÚKRARØKTARVÍSINDI – HEILSUGRANSKING

Á deildini fyri Heilsu- og sjúkrarøktarvísindi á Fróðskaparsetri Føroya starvast námslektarar, hvørs høvuðsuppgáva er at undirvísa og adjunktar og lektarar, sum afturat undirvísingini eisini granska, um teir hava fígging til tess.

Á deildini eru í løtuni sjey starvsfólk, sum hava ph.d. og harvið hava granskingarførleika. Harafturat eru nýggju undir ph.d. lesnaði. Tað verður granskað við ymsum designum, observatiónskanningum (so sum kohortukanningum og tvørsskurðskanningum), kontroleraðum- randomiseraðum-kanningum (RCT), og kvalitativum kanningum av ymsum slagi.



Tey økini granskað verður innanfyri í løtuni eru:

- Epidemiologi
- Psykiatri
- Ítróttarfysiologi
- Heilsufremjan
- Fyribyrging
- Fólkaheilsa
- Sjúkrarøtkarfrøði
- Læknafrøði

## 3.10. DEPILIN FYRI HEILSU- OG ALMANNAGRANSKING

Depilin fyri Heilsu- og Almannagransking er eitt skipað samstarv millum Fróðskaparsetur Føroya, Landssjúkrahúsið/Sjúkrahúsverkið, Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Ílegusavnið. Depilin hevur til endamáls at menna heilsuvísindaliga gransking í samstarvið við viðkomandi partar.

Depilin varð settur á stovn 8. desember 2015 tá táverandi partarnir í samstarvinum og Granskingarráðið gjørdu eina avtalu um stuðul til at menna granskingarsamstarv á heilsuøkinum. Stuðulin á 7 mió. kr. varð latin úr Sjúkrakassagrunninum. Upphæddin varð oyramerkt til at seta á stovn Master útbúgving á heilsuøkinum, til ph.d. stuðul og til at seta vísindastarvsfólk í starv innan heilsuvísind.

Depilin er skipaður við einum stýri við einum umboði fyri hvønn av samstarvsfeløgunum. T.v.s. einum umboði fyri ávikavist Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Landssjúkrahúsið/Sjúkrahúsverkið, Fólkaheilsuráðið og Ílegusavnið. Harumframt er ein dagligur leiðari.

Depilin hevur ikki egin hølir, men umsitingarliga adressan er á Fróðskaparsetrinum. Hetta er ikki nøktandi, og tí arbeiðir stýrið við at útvega Depilinum hóskandi hølir. Depilin hevur onga rakstrarjáttan og hevur heldur ongar formligar uppgávur.

Síðani Depilin varð settur á stovn hevur hann gjørt stóran mun innan heilsugransking. Hetta kemur m.a. til sjóndar við, at samstarvið millum partarnar er vorðið nógv betri enn áður. Talið á vísindaligum greinum, har granskarar frá einum ella fleiri av stovnunum eru við, er økt munandi í hesum tíðarskeiðinum. Fjølbroytni á evnum og granskingarhættum er fleirfaldað, og eisini eru føroysku heilsugranskararnir í størri mun enn áður høvuðsgranskarar á teimum verkætlanum, sum verða framdar. Seinastu árini eru millum 70-80 vísindaligar greinar givnar út í altjóða tíðarritum frá stovnum, sum mynda Depilin fyri Heilsu- og Almannagransking. Harumframt hevur Depilin skipað fyri tveimum ph.d. skeiðum og tveimum granskingardøgum. Tríggjar ph.d. verkætlanir eru beinleiðis staðsettar á Deplinum umframt ein, sum júst er liðug.

Depilin hevur fingið eina formliga játtan frá Sjúkrakassagrunninum á 1.7 mió. kr. til ta fyrstu felags granskingarverkætlanina, sum verður at byggja upp eina føroyska tjóðarkohortu. Fíggingin frá Sjúkrakassagrunnium er tó ikki nóg mikið til hesa verkætlan. Upphæddin frá Sjúkrakassagrunninum verður nýtt til at fara undir verkætlanina, og umsóknir verða sendar føroyskum og útlendskum fíggingargrunnum til at fíggja tann partin, sum restar í.

# 4. HEILSUMYNDUGLEIKAR Í NORÐANLONDUM

## 4.1. INNGANGUR

Fyri at fáa íblástur til innihaldið í eitt føroyskt Fólkaheilsustýri, halda serfrøðingabólkurin og samskipanarbólkurin tað vera viðkomandi at lýsa, hvussu hini Norðanlondini hava skipað seg á hesum øki. Hóast Føroyar og hini Norðanlondini eru ógvuliga ymisk á nógvum økjum, ber til at fáa íblástur frá teimum um virkisøkið hjá Fólkaheilsustýrinum. Í arbeiðinum er valt at lýsa heilsumyndugleikar í Danmark, Íslandi og Noreg.

## 4.2. DANMARK

Í arbeiðinum er valt at lýsa virkisøkini hjá ávikavist Sundhedsstyrelsen, Sundhedsdatastyrelsen, Styrelsen for Patientsikkerhed, Lægemiddelstyrelsen og Statens Institut for Folkesundhed. Hetta kemst av, at summar av uppgávunum hjá nevndu stýrum eru av slíkum slagi, at tær kunnu verða lagdar til komandi Fólkaheilsustýri. Harafturat er í arbeiðinum valt at lýsa virkisøkið hjá National Genomcenter, eftirsum arbeiðssetningurin fevnir um, hvørjir partar av Ílegusavninum kunnu leggjast til Fólkaheilsustýrið.

### *Sundhedsstyrelsen*

Sundhedsstyrelsen er stýri undir Sundhedsministeriet. Sundhedsstyrelsen er evsti heilsufakligi myndugleikin í Danmark (www.sst.dk).

Virkisøkið hjá Sundhedsstyrelsen er í høvðusheitum:

- At ráðgeva heilsumálaráðharranum og øðrum myndugleikum um heilsufakligar og ávísar almannafakligar spurningar
- At vegleiða um at fremja heilsuligar og ávísar almannafakligar uppgávur
- At áseta reglur um útbúgvingar hjá læknum og øðrum heilsustarvsfólkum
- At seta í verk eftirmetingar v.m., sum hava til endamáls at góðskumenna og fáa eina meira úrslitagóða orkunýtslu í heilsuverkinum
- At áseta krøv til serfunktiónir í sjúkrahúsverkinum fyri á tann hátt at kunna leggja til rættis á ein skilagóðan hátt
- At kunna um viðurskifti viðvíkjandi fólkaheilsu
- At tryggja, at arbeiðstakarar, sjúklingar og almenningurin sum heild; djór og umhvørvi, verða vard mótvegis skaðum frá geisling
- At ráðgeva ráðharranum og øðrum myndugleikum um og menna almannafaklig átøk á eldraøkinum

Við støði í virkisøki sínum, orðar Sundhedsstyrelsen tilmælir, leiðreglur, virkisætlanir o.s.fr.

Sundhedsstyrelsen samstarvar við faklig umhvørvi, kommunur, regiónir, privatvirkandi og sivilsamfelagið.

Sundhedsstyrelsen er skipað í fimm heilsufakligar eindir: Fyribyrging, Eldri og demens, Geislaverja, Evidens, útbúgving og tilbúgving og Ráðlegging. Harumframt er ein fyrisitingarlig eind.

### *Stutt lýsing av ymsu eindunum:*

- Eindin fyri Fyribyrging tekur sær av uppgávum innan fólkaheilsu, herundir fyribyrging og heilsufremjan

- Eindin fyri Eldri og demens tekur sær av uppgávum innan endurmenning, fyribyrging og stuðul til eldri, ið hava mist, ella eru í vanda fyri at missa førleikar. Høvuðsdentur verður lagdur á at styrkja og tryggja samanhangið millum heilsu- og sosialfakliga arbeiðið fyri eldri borgarar og fólkið við demens
- Eindin fyri Geislaverju hevur ábyrgd av myndugleikauppgávum viðvíkjandi geislaverju, har geisling kann koma fyri. Deildin umsitur m.a. røntgenlógina, lógina um geislavirkni og lógina um kjarnorkuverk
- Eindin fyri Evidens, útbúgving og tilbúgving arbeiðir við altjóða kliniskum leiðreglum, tilmælum um skilvísa farmakoterapi og við screeningsskipanum. Harafturat hevur eindin ábyrgd av heilsuligu tilbúgvingini, barnakoppseting og øðrum uppgávum viðvíkjandi smittandi sjúkum
- Eindin fyri Ráðlegging leggur yvirskipaðu karmarnar viðvíkjandi heilsutilboðum til borgaran og heilsuverkið sum heild, umframt góðsku og samanhangandi sjúklingatilgongd
- Eindin fyri fyrisiting fæst við fyrisitingarligar uppgávur, fíggjarøkið, greining, leiðslu og samskifti

Í Sundhedhedsstyrelsen starvast eini 200 starvsfólk. Umleið 60 % av starvsfólkunum eru akademikarar. Eini 25 % av starvsfólkunum eru læknar og onnur heilsustarvsfólk.

Umframt starvsfólkini í Sundhedsstyrelsen, ráðførir Sundhedsstyrelsen seg við eina røð av fakligum ráðum, t.d. Det Rådgivende Udvalg for Specialeplanlægning og Det Nationale Råd for Tandlægers Videreuddannelse. Somuleiðis eru fastir sakkønir ráðgevarar knýttir at Sundhedsstyrelsen. Uppgávurnar hjá hesum ráðgevum eru at fylgja gongdini innan teirra fakøkið, ráðgeva í einstøkum málum og luttaka í nevndararbeiði og lógarfyrireikandi arbeiði. Føstu sakkønu ráðgevararnir eru settir í starv trý ár í senn. Undir Sundhedsstyrelsen eru eisini nevndir og arbeiðsbólkar (task forces), hvørs uppgáva er at veita Sundhedsstyrelsen breiða fakliga ráðgeving.

### *Sundhedsdatastyrelsen*

Sundhedsdatastyrelsen er undir Sundhedsministeriet. Uppgávan hjá Sundhedsdatastyrelsen er at skapa samanhangandi heilsudáta og talgildar loysnir, sum skulu vera til gagns fyri sjúklingar og heilsustarvsfólk, og sum harumframt skulu nýtast í sambandi við gransking og fyrisitingarlig endamál í heilsuverkinum (www.sundhedsdatastyrelsen.dk).

Uppgávurnar hjá Sundhedsdatastyrelsen eru m.a.:

- Veita heilsudáta um virksemi, búskap og góðsku til ávikavist heilsustarsfólk, fyrisitarar í regiónum og kommunum, umframt til borgarar og aðrar viðkomandi brúkarar
- Styrkja yvirskipaðu talgildingina og fremja ein samanhangandi dáta- og kt-arkitektur í heilsuverkinum við áherðslu á kunningartrygd
- Tryggjar nøktandi og galdandi heilsudáta til sjúklingaviðgerð og gransking innan eina røð av økjum
- Vekja yvir og fylgja við gongdini í politiskum málum og avtalum, m.a. um góðsku og virkisføri innan heilsuøkið
- Styrkja samskipanina við yvirskipaðu talgildingini innan heilsuverkið
- Samskipa arbeiðið við heilsudáta og –kt innan heilsuverkið og seta felags mál við atliti til virkisskráir, avtalur og kt-arkitektur.

Sundhedsdatastyrelsen umsitur Landspatientregisteret. Sundhedsdatastyrelsen savnar allar upplýsingar um kanningar og viðgerðir í sjúkrahúsverkinum í Landspatientregisteret. Hvørja ferð ein persónur hevur verið í sambandi við danska sjúkrahúsverkið viðvíkjandi kanning ella viðgerð, fráboða sjúkrahúsini eina røð av upplýsingum. Allar hesar upplýsingar verða



Styrelsen for Patientsikkerhed

savnaðar sum dátur í Landspatientregisteret. Upplýsingarnar kunnu t.d. lýsa, nær og hvar ein sjúklingur er vorðin innlagdur ella lýsa diagnosur, kanningar, viðgerðir hjá sjúklinginum v.m.

## *Styrelsen for Patientsikkerhed*

Virkisøkið hjá Styrelsen for Patientsikkerhed fevnir um eina røð av uppgávum, sum hava til endamáls at betra um sjúklingatrygdina (www.stps.dk).

Uppgávurnar hjá Styrelsen for Patientsikkerhed eru m.a.:

- At hava eftirlit við løggildum heilsustarvsfólkum og heilsustovnum
- At ráðgeva um smittandi sjúkur, heilsuviðurskifti í sambandi við at flýggja út koyrikort, gera rættarliga líkskoðan v.m.
- At flýggja út løggildingar til 19 ymsar løggildar fakbólkar, sum fevna um bæði donsk og útlendsk heilsustarvsfólk
- At geva læknum, tannlæknum og kiropraktorum rætt til at virka sjálvstøðugt
- At flýggja út serlæknaviðurkenningar (speciallægeanerkendelser) til 39 læknaligar sergreinar og sertannlæknaviðurkenningar (specialtandlægeanerkendelser) til tvær tannlæknasergreinar
- At hava um hendi meginfyrisitingina av skipanini við fráboðan í sambandi við ótilætlaðar hendingar í heilsuverkinum og vera við til at virka fyri, at vitan um ótilætlaðar hendingar og vitan frá sjúklinga- og endurgjaldsmálum verður nýtt fyribyrgjandi
- At vegleiða um rættindi til heilsuveitingar í øðrum londum sambært danskari lóggávu, ES-reglum og øðrum altjóða avtalum.

## *Lægemiddelstyrelsen*

Lægemiddelstyrelsen er stýri undir Sundhedsministeriet. Lægemiddelstyrelsen stuðlar undir lóggávuarbeiðinum og ráðharratænastuni, sum Sundhedsministeriet stendur fyri. Somuleiðis er Lægemiddelstyrelsen við í arbeiðinum at menna politikk og regulering á heilivágsøkinum, bæði í Danmark og í samskifti við heilivágsmyndugleikar í ES. Flestu uppgávurnar hjá Lægemiddelstyrelsen verða loystar í tøttum samstarvi við heilivágsmyndugleikar og felagsskapir i hinum ES londunum. Lægemiddelstyrelsen er evsti heilivágsfakligi myndugleikin í Danmark (www.lmst.dk).

Virkisøkið hjá Lægemiddelstyrelsen er í høvðusheitum:

- Góðkenna og kanna heilivágsfyritøkur og heilivág á danska marknaðinum
- Vaka yvir hjáárinum við heilivági
- Góðkenna kliniskar royndir
- Gera av, hvør heilivágur skal fáa ískoyti
- Hava eftirlit við medisinskari útgerð, sum er tøk í Danmark, og vaka yvir álvarsomum hendingum við medisinskari útgerð
- Útnevna apotekarar, leggja tilrættis bygnaðin innan apoteksøkið og hava eftirlit við apotekunum og smásølukeypsfólkum

Í Lægemiddelstyrelsen starvast umleið 500 starvsfólk. Fýra teir størstu yrkisbólkarnir er farmaseutar, skrivstovufólk, læknar og løgfrøðingar/samfelagsfrøðingar.

### *Nationalt Genom Center*

Yvirskipaða uppgávan hjá Nationalt Genom Center er at skapa grundarlag fyri at menna betri diagnostik og meira málrættaðar viðgerðir við at brúka genomsekventering. Nationalt Genom Center skal í tøttum samstarvi við m.a. tey heilsufakligu umhvørvini í regiónunum, granskingarheimin og grunnar verða við til at fremja ætlanina við Persónlagaðum Heilivági (den nationale strategi for Personlig Medicin). Centrið fær eisini ein samskipandi leiklut innan útbúgving og førleikamenning hjá viðkomandi heilsustarvsfólkum. Harumframt skal Centrið vera við til at tryggja, at borgarar og sjúklingar verða tiknir við í menningina innan Persónlagaðan Heilivág í Danmark, og at tey etisku og løgfrøðiligu sjónarmiðini, sum eru tengd at øktu nýtsluni av genomsekventeringstøkni, verða lýst. Nationalt Genom Center hevur eisini um hendi skrivarauppgávurnar hjá nevndunum fyri den nationale strategi for Personlig Medicin og teimum ráðgevandi nevndunum, sum hoyra undir hesum (www.ngc.dk).

### *Statens Institut for Folkesundhed*

Statens Institut for Folkesundhed er ein danskur granskingarstovnur, sum fæst við gransking innan fólkaheilsufrøði. Høvuðsendamálið hjá stovninum er at granska og fylgja við í heilsustøðu, sjúkleika og deyðatølum hjá borgarum umframt í heilsuverkinum sum heild; at ráðgeva almennum myndugleikum og luttaka í arbeiðinum at útbúgva granskarar innan fólkaheilsuvísind og samfelagslæknafrøði. Harumframt er ein av kjarnuuppgávunum hjá Statens Institut for Folkesundhed at miðla vitan um fólkaheilsu (www.sif.dk).

### *Sundhed.dk*

Sundhed.dk er tann almenni danski heilsuportalurin, sum ger tað møguligt hjá borgarum og heilsustarvsfólkum at finna kunning og vitan um heilsufakligar spurningar. Umframt hetta hevur heilsuportalurin møguleika fyri, at borgarar og t.d. lækni ella sjúkrarøktarfrøðingur samskifta. Á sundhed.dk er eisini møguligt hjá borgaranum at síggja egnar journalupplýsingar frá almennum sjúkrahúsum, og um ein borgari hevur fingið fulltrú til tað, er eisini møguligt hjá viðkomandi at síggja, hvat stendur í journalum hjá avvarðandi.

Felags almenni heilsuportalurin varð stovnaður í 2003, men síðani er hann broyttur nógv. Handan sundhed.dk standa: Danske regioner, danska Heilsumálaráðið og Kommunernes Landsforening.

## Onnur stýri og ráð innan heilsuøkið í Danmark

Umframt tey stýrini, sum eru nevnd omanfyri, eru onnur stýri og ráð sum virka innan ymsar partar av heilsuøkinum í Danmark. Stýrini og ráðini eru: Styrelsen for Patientklager, Statens Serum Institut, Sekretariatet for Etisk Råd og National Videnskabsetisk Komité. Av tí, at hesi ikki hava tann stóra týdningin á virkisøkið hjá Fólkaheilsustýrinum, verða hesi ikki lýst nærri á hesum sinni.

## 4.3. ÍSLAND

Viðvíkjandi Íslandi er, í arbeiðinum, valt at lýsa virkisøkini hjá ávíkavist Landslæknaembætinum, Fólkaheilsugrunninum og Lifjastovninum. Hetta av tí, at summar av uppgávunum hjá hesum stovnum eru av slíkum slag, at tær kunnu verða lagdar til Fólkaheilsustýrið.

### *Landslæknaembætið*

Heilsustýrið í Íslandi verður nevnt Embætti landslæknis. Landslæknaembætið, ein stovnur við bæði heilsufakligari gransking, umsiting og eftirliti. Umframt hetta, hevur Landslæknin ábyrgd av at virka fyri og kunna um fyribyrging og heilsufremjandi átøkum kring landið (www.landslaeknir.is).

Uppgávurnar hjá Landslæknaambætinum eru m.a.:

- At veita ráðgeving til ráðharran í vælferðarmálum, almennar stovnar, fakfólk og almenningin í málum um heilsu, fyribyrging og heilsufremjan
- At stuðla og fyriskipa fyribyrgjandi og heilsufremjandi verkætlanum
- At fremja batar av heilsurøkt
- At hava eftirlit við heilsutænastum og heilsustarvsfólki
- At hava eftirlit við, hvussu ávísingarheilivágur verður nýttur, og mæla til skynsama nýtslu
- At góðskumeta útbúgvingar hjá teimum, ið starvast innan heilsuøkið og tryggja, at tær eru á einum nøktandi støði
- At geva starvsloyvi til løggild heilsustarvsfólk
- At viðgera kærur frá brúkarum í heilsuskipanini
- At savna og viðgera tilfar um heilsu og heilsuskipanina
- At stuðla kanningar og gransking á starvsøkinum hjá embætinum

Undir Landslæknanum eru fimm deildir:

- Deildin fyri eftirlit og góðsku hevur umsjón við øllum heilsustovnum, einstøkum heilsustarvsfólkum og heilsufakbólkum. Harumframt hevur deildin eftirlit við




Landslæknaembætið

starvsloyvum hjá heilsustarvsfólki, afturtøku og avmarkingum í starvsloyvum. Deildin viðger eisini klagur frá sjúklingum og kannar álvarsamar tilburðir í heilsuskipanini og starvast fyri at forða fyri at slíkir álvarsamir tilburðir henda.

- Sótt- og smittuverjudeildin hevur ábyrgd av at leggja til rættis og fylgja við koppsetingum og nýtsluni av antibiotika og veitir ráðgeving hesum viðvíkjandi. Sótt- og smittuverjudeildin tekur sær eisini av tiltøkum, ið skulu setast í verk í sambandi við til dømis mótstøðuføri, farsóttir og øðrum vandatáttum, ið kunnu hótta fólkaheilsuna.
- Heilsuupplýsingadeildin samskipar talgildu heilsuskipanina og sjúklingaskránna í Íslandi. Eisini hevur deildin ábyrgdina av at miðla viðkomandi heilsuhagfrøði til almenningin, eins og at veita viðkomandi hagfrøðisligar upplýsingar innan stovnin, umframt at veita viðkomandi heilsuupplýsingar til altjóða stovnar.
- Ein deild arbeiðir við heilsufremjan og fyribyrging burturav. Tað veri seg rúsdrekka, royking, rúsevnisfyribyrging, heilsufremjan innan sálarheilsu, tannrøkt, kostvanar, rørslu o.s.fr. Deildin útlutar eisini peningaligan stuðul úr Fólkaheilsugrunninum, sí niðanfyri.
- Rakstrar-, tænastu- og umsitingardeildin hevur ábyrgdina av øllum vanligum rakstri og umsiting hjá stovninum.

Umframt tær fimm deildirnar er ein miðstøð fyri talgildu sjúkraskránna/heilsuskipanina.

Tað eru umleið 54 ársverk hjá Landslæknanum. Starvsfólkini eru í høvuðsheitum heilsufakfólk, granskarar og løgfrøðingar.

### *Fólkaheilsugrunnur*

Endamálið við Fólkaheilsugrunninum er at styrkja fyribyrgjandi og heilsufremjandi arbeiði í samfelagnum. Hetta arbeiðið verður gjørt í samsvari við tær ætlanir, ið landið hevur fyri fólkaheilsuøkið. Peningurin í grunninum skal harumframt nýtast til fyribyrgjandi og heilsufremjandi starvsemi hjá Landslæknaembætinum. Í stýrinum fyri Fólkaheilsugrunnin eru tríggir limir: ein formaður, eitt umboð frá Landslæknanum og eitt umboð fyri heilsuvísindadeildina á Háskóla Islands, umframt tríggir varalimir. Landslæknaembætið hevur dagligu umsitingina og bókhald um hendi.

Sambært reglugerðini kann upp til 35 % av peninginum í grunninum nýtast til stuðul til umsóknir uttanífrá og annars til at umsita grunnin. Í minsta lagi 65 % av peninginum skal nýtast til fólkaheilsu- og fyribyrgjandi starvsemi hjá Landslæknanum ella til aðrar verkætlanir, ið verða framdar fyri Landslæknan.

*Fólkaheilsugrunnurin verður fíggjaður á henda hátt:*

- 1 % av rúsdrekkaavgjaldinum av tí, ið innflutt og framleitt verður. Rúsdrekka verður í hesum førinum skilmarkað sum løgur, ið inniheldur meira enn 2.25 rúmprosent av alkoholi, og avgjaldið hækkar so hvørt, sum styrkin av løginum hækkar
- 0.9 % av bruttusøluni av tubbak
- Játtan av fíggjarlógini
- Gávur ella stuðul, sum samtøk, einstaklingar, fyritøkur ella onnur kunnu geva grunninum.

### *Lifjastofnum (The Icelandic Medicines Agency)*

Lifjastofnum í Íslandi, er ein stovnur, ið hevur áleið somu uppgávur sum Lægemiddelstyrelsen í Danmark. Lifjastofnum er ein óheftur myndugleiki undir íslendsku stjórnini. Ein av høvuðsuppgávunum hjá stovninum er at veita marknaðarloyvi til heilivág í Íslandi. Hetta í samstarvi við myndugleikar í Europeiska Samveldinum. Harumframt hevur Lifjastofnum eftirlit við heilivágsídnaðinum í Íslandi og er við til at framleiða óhefta kunning um heilivág til heilsustarvsfólk í Íslandi.

## 4.4. NOREG

Í arbeiðinum er valt at lýsa virkisøkini hjá ávikavist Helsedirektoratet, Statens Helsetilsyn, Legemiddelverket og Folkehelseinstituttet. Hetta kemst av, at summar av uppgávunum á hesum stovnum eru av slíkum slagi, at tær kunnu verða lagdar til Fólkaheilsustýrið. Harumframt er stutt lýsing av norska heilsuportalinum: helse.no.

### *Helsedirektoratet*

Helsedirektoratet er ein fak- og myndugleikastovnur undir Helse- og omsorgsdepartementet (www.helsedirektoratet.no).

Uppgávurnar hjá Helsedirektoratet fevna m.a. um at veita óhefta fakliga ráðgeving, íverkseta samtyktan politikk, og fyrisita lógir og reglur innan heilsuverkið. Harafturat hevur Helsedirektoratet ábyrgdina fyri heilsutilbúgvingini í Noregi.

Helsudirektoratet arbeiðir við at betra um heilsustøðuna hjá fólki og menna góðar heilsutænastur. Hetta verður gjørt við at arbeiða bæði á heildarstigi og miðvíst tvørturum tænastur, geirar og fyrisitingarløg.

Sum fakligur ráðgevi hevur Helsedirektoratet ábyrgd av at fylgja við í viðurskiftum, ið kunnu ávirka fólkaheilsuna og menningina innan heilsu- og umsorganartænastur. Helsedirektoratet hevur eisini til uppgávu at íverkseta samtyktar politikkir hjá stjørnini og Stortinget. Hetta kann t.d. vera at íverkseta ætlanir og átøk, ella at veita stuðul til teir málsetningar, ið Stórtingið hevur sett.

Helsedirektoratet hevur ábyrgd av at tulka lógir á heilsuøkinum, umsita refusiónsskipanir og regluverkið, sum Helse- og Omsorgsdepartementet hevur delegerað til Helsedirektoratet.

Helsedirektoratet er skipað við hesum deildum: 1) Fólkaheilsu og fyribyrging, 2) Kvalitetur og hendingagongdir, 3) Heilsubúskapur og førleiki, 4) Greining og samfelag og 5) Talgilding og heilsuskráir.



Helsedirektoratet

Málbólkarnir hjá Helsedirektoratet er almenningurin (sum hevur tørv á kunning um heilsu, rættindi og heilsu- og umsorganartænastur); tey, sum starvast innan heilsu- og umsorganarøkið (t.d. heilsustarvsfólk og starvsfólk í ávikavist stjórnarráðum, kommunum og landslutum).

Helsedirektoratet samstarvar eisini við aðrar myndugleikar og stýri, hvørs virkisøkir ávirka heilsustøðuna hjá fólki, herundir Folkehelseinstituttet og Legemiddelverket.

## *Statens Helsetilsyn*

„Statens Helsetilsyn" er statsligi myndugleikin í Noregi, ið hevur eftirlit við heilsu- og umsorganartænastum, sosialum tænastum og barnavernd. Statens helsetilsyn er stovnur undir Helse- og Omsorgsdepartementet. Á fylkisstøði (fylkesniveau), er „Fylkesmannen" eftirlitsmyndugleiki við somu økjum, ið eru løgd undir „Statens Helsetilsyn" (www.helsetilsynet.no).

Eftirlitið er galdandi fyri allar lógarásettar tænastur, sum antin verða veittar av statsligum heilsustovnum (t.d. sjúkrahúsum), kommunum, privatum stovnum ella har heilsustarvsfólk dríva egið virksemi. Eftirlitið er bæði galdandi fyri einstøk heilsustarvsfólk og fyri heilsustovnar.

## *Folkehelseinstituttet*

Folkehelseinstituttet er ein fyrisitingarligur stovnur undir Helse- og omsorgsdepartementet (www.fhi.no).

Virkisøkið hjá Folkehelseinstituttet er, at framleiða, savna saman og miðla vitan, sum hevur til endamáls at virka fyri einum góðum fólkaheilsuarbeiði og góðum heilsu- og umsorgartænastum, og harvið virka fyri at betra um heilsustøðuna í Noregi og altjóða.

Folkehelseinstituttet er ein førleikastovnur innan hesi fakøki:

- Smittuverju
- Sálarliga og likamliga heilsu
- Umhvørvistættir, rúsevnir, royking, kost, rørslu, og aðrar tættir, ið ávirka heilsustøðuna hjá fólki og ójavna í heilsu
- Heilsufremjan og fyribyrgjandi tiltøk
- Altjóða heilsu

Folkehelseinstituttet er býtt upp í hesi økir: 1) heilsudáta og digitalisering, 2) heilsutænastur, 3) sálarlig og likamlig heilsa og 4) smittuverja, umhvørvi og heilsa.

Á økinum heilsudáta og talgilding, fremur Folkehelseinstituttet registaragrundaða gransking og heilsugreining, umframt genetiska og aðra gransking tengd at biobankatilfari. Økið hevur ábyrgd av samskipanini viðvíkjandi heilsuskráum, heilsukanningum, biobankum, IT/e- heilsuaktivitetum og talgilding, bioinformatik og IT infrastrukturi.

Økið „heilsutænastur" veitir vitanargrundarlag til politiska myndugleikan og stovnar, ið taka avgerðir innan øll løg av heilsu- og umsorganartænastu.

Økið fyri sálarliga og likamliga heilsu hevur eina serliga uppgávu og ábyrgd av at víðarimenna servitanina hjá Folkehelseinstituttet innan økini: rúsevni, sálarlig heilsa og likamlig heilsa.

Økið fyri smittuverju, umhvørvi og heilsa, arbeiðir við at fyribyrgja smittandi sjúkum og minka um heilsuskaðar vegna likamligar ella kemiskar faktorar í umhvørvinum. Heilsutilbúgving, greiningar, ráðgeving, tænastur og gransking, bæði nationalt og internationalt, eru týdningarmiklar veitingar á hesum øki.

## *Legemiddelverket*

Legemiddelverket í Noregi hevur uppgávur knýttar at umsiting, eftirliti, kunning og vegleiðing viðvíkjandi heilivági.

Legemiddelverket skal tryggja góða góðsku í heilivágsviðgerð og at heilivágur er so bíligur, sum gjørligt. Stovnurin skal tryggja, at fólkið fær eins atgongd, umframt skjóta atgongd til virknan heilivág. Harumframt skal Legemiddelverket vera fak- og eftirlitsmyndugleiki viðvíkjandi medisinskari útgerð. Eisini skal stovnurin leggja til rættis gransking og innovasjón á økinum.

Legemiddelverket er ein stovnur undir Helse- og omsorgsdepartementet.

Stovnurin góðkennir heilivág, gevur loyvi til framleiðslu og innflutning av heilivági, ásetir prís á forskrifta skyldugum heilivági til menniskju og umsitur lóg um medisinska útgerð. Harumframt tekur stovnurin sær eisini av altjóða samstarvi innan heilivágsøkið.

## *Helse.no*

Helsenorge.no er almenna netsíðan fyri fólk, búsitandi í Noreg, ið ynskja at fáa vitan um síni egnu heilsuviðurskifti. Helsenorge veitir tænastur og kunning um heilsu og rættindi hjá fólki, við bústaði í Noreg. Heimasíðan er stovnað av heilsumyndugleikunum.

Helse.no er býtt upp í tveir høvuðspartar: 1) kunningarsíður, har tú finnur kvalitetstryggjaða heilsukunning um eina røð av ymiskum høvuðsevnum innan heilsu, 2) Sjálvavgreiðsluloysnir, har ein og hvør, ið býr í Noreg, hevur atgongd til sínar egnu heilsuupplýsingar og til fleiri heilsurelateraðar net-tænastur.

# 5. INNIHALD Í EINUM FÓLKAHEILSUSTÝRI

## 5.1. INNGANGUR

Í hesum kapitli verður byrjað við at lýsa heilsuhugtakið, tí tað verður støðið undir virkseminum hjá Fólkaheilsustýrinum. Síðani er brot við metingum um innihald í Fólkaheilsustýrinum og innihaldið verður nágreinað. Við støði í hesum verður umrøtt, hvørjar uppgávur hjá verandi stovnum og ráðið kunnu leggjast til Fólkaheilsustýrið. At enda er eitt brot um grundarlagið undir arbeiðinum hjá Fólkaheilsustýrinum. Í hesum broti verða uppgávurnar viðvíkjandi hagtølum, heilsuskráum og heilsugransking lýstar.

## 5.2. HUGTAKIÐ „HEILSA“

Í arbeiðinum hevur hugtakið „heilsa“ verið umrøtt. Heimsheilsustovnurin, WHO allýsir hugtakið „heilsa“ soleiðis:

> „health is a state of complete physical, mental, and social well-being, and not merely the absence of disease or infirmity“.

Umsett til føroyskt ljóðar hetta áleið soleiðis: Heilsa er ein støða við fullkomnari likamligari, sálarligari og sosialari vælferð og ikki bert frávera av sjúku ella heilsubreki.

Hendan allýsing varð sett inn í formælið til WHO-grundlógina í 1948. Tá ið allýsingin varð sett inn í grundlógina, var hon slóðbrótandi, tí hugtakið „heilsa“ varð so breitt og framsøkið. WHO grundlógin, ella „the WHO constitution“ varð samtykt á altjóða heilsuráðstevnu í New York, tann 19.- 22. juni 1946, undirskrivað 22. juli 1946 og sett í gildi tann 7. apríl 1948. Mælt verður til, at komandi Fólkaheilsustýrið í sínum arbeiði heldur seg til WHO allýsingina um heilsu.

## 5.3. INNIHALD Í FÓLKAHEILSUSTÝRINUM

Í tilgongdini at orða innihald í Fólkaheilsustýrinum, hevur samskipanarbólkurin á fundum við serfrøðingabólkin, hoyringarbólkin og leiðslubólkin umrøtt, hvørji øki kunnu verða løgd til Fólkaheilsustýrið. Tað er breið semja í bólkunum um, at niðanfyrinevndu økir kunnu leggjast til eitt Fólkaheilsustýri:

- Gera tilmæli til politisku skipanina um ráðlegging innan heilsuverkið
- Fólkaheilsuarbeiði: Hava um hendi og styrkja fólkaheilsuarbeiðið – heilsufremjan og fyribyrging, upplýsing og tiltøk innan fólkaheilsu sum heild
- Heilsufaklig ráðgeving: Til landsstýrisfólk, kommunur, primera og sekundera geiran
- Kunning til borgarar og almenning um heilsuviðurskifti sum heild, tilboð um heilsuveitingar
- Vegleiðingar: Gera vegleiðingar innan heilsuøkið við støði í føroyskari heilsulóggávu, umframt samstarva við Landslæknan um at tillaga vegleiðingar viðvíkjandi danskari heilsulóggávu
- Luttaka í altjóða og norðurlendskum samstarvi á heilsufakliga økinum
- Heilsutilbúgving: Umsita tilbúgvingina í heilsuverkinum og luttaka í norðurlendskum samstarvi innan heilsutilbúgving

- Dygdarmenna føroyska heilsuøkið: Gera tilmælir til politiska myndugleikan um yvirskipaða dygdarmenning innan heilsuøkið sum heild
- Greiningar og frágreiðingar: Um heilsustøðuna hjá íbúgvum í Føroyum og viðurskifti, sum viðvíkja heilsuviðurskiftir
- Eftirlit: Eftirlit við yvirtiknum málsøkjum á heilsuøkinum
- Eftirmetingar: Eftirmeta tilboð og skipanir
- Hagtøl: Skipa, viðgera og menna hagtøl á heilsuøkinum
- Heilsuskráir: Savna føroysku heilsuskráirnar í Fólkaheilsustýrinum, dagføra skráir og menna nýggjar skráir
- Heilsugransking: Veita granskingargrundaða myndugleikatænastu.

Í niðanfyristandandi brotum verða omanfyrinevndu økir lýst nærri.

## 5.3.1. GERA TILMÆLI UM RÁÐLEGGING INNAN HEILSUVERKIÐ

Í arbeiðinum hevur verið umrøtt, at ein týdningarmikil uppgáva hjá Fólkaheilsustýrinum er at gera tilmæli til politiska myndugleikan um ráðlegging innan heilsuverkið.

Serfrøðingabólkurin er á einum máli um, at neyðugt er, at Fólkaheilsustýrið ger tilmælir til politiska myndugleikan um ráðlegging innan heilsuverkið. Hetta kann t.d. vera tilmæli um, hvørji og hvussu nógv starvsfólk skulu vera innan heilsuverkið, og hvussu hesi kunnu útvegast til føroyska heilsuverkið. Um politiski myndugleikin hevur tørv á tí, eiga metingar eisini at verða gjørdar um, hvørjar viðgerðir skulu raðfestast í føroyska heilsuverkinum, hvørjar viðgerðir tørvur er á; hvar í heilsuverkinum viðgerðin skal fara fram, og hvørjar viðgerðir hava jaligt úrslit á sjúklingin v.m. Til dømis kann Fólkaheilsustýrið kanna, hvørjar viðgerðir hava jaligt úrslit fyri sjúklingin í øðrum londum, soleiðis at hetta kann verða tikið við í avgerðir um, hvørjar viðgerðir skulu veitast í Føroyum. Talan kann bæði vera um stutttíðarmetingar og langtíðarmetingar.

> ***Tilmæli***
> *Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið ger tilmæli til politiska myndugleikan um ráðlegging innan heilsuverkið.*

## 5.3.2. FÓLKAHEILSUARBEIÐI, HEILSUFREMJAN OG FYRIBYRGING

Ætlanin er, at Fólkaheilsustýrið skal hava um hendi fólkaheilsuarbeiðið, herundir heilsufremjan og sjúkufyribyrging, upplýsing og átøk innan fólkaheilsuøkið sum heild. Fólkaheilsuarbeiðið, sum fer fram í Fólkaheilsustýrinum, skal verða framt á granskingargrundaðum grundvølli, sum merkir, at fólkaheilsuátøk verður stýrd, løgd til rættis og sett í verk við støði í vísindaligari gransking.

Fólkaheilsustýrið eigur at arbeiða við vísindaliga grundaðum tiltøkum, hvørs endamál eru at virka fyri at betra um fólkaheilsuna og virka fyri at fyribyrgja sálarligum sjúkum, somatiskum sjúkum, ílegusjúkum og skaðum. Hetta arbeiðið eigur at verða gjørt við miðvísum átøkum tvørtur um tænastur, geirar og fyrisitingarløg. Hesi tiltøk eiga eisini regluliga at verða eftirmett. Hetta kann Fólkaheilsustýrið gera við støði í uppgávuni sum fakligur- og myndugleikastovnur.

Sum liður í arbeiðinum at betra fólkaheilsuna, eigur ein fólkaheilsuætlan fyri heilsufremjan



og sjúkufyribyrging at verða gjørd. Henda fólkaheilsuætlan eigur at verða gjørd í samstarvi millum Fólkaheilsustýrið og Heilsumálaráðið.

Fólkaheilsuarbeiðið eigur støðugt at verða raðfest høgt, tí átøk at fremja og betra fólkaheilsuna eru av stórum týdningi, bæði fyri einstaklingar og fyri samfelagsmenningina sum heild. Harumframt hevur tað stóran týdning at fyribyrgja lívsstílssjúkum.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið skal hava um hendi fólkaheilsuarbeiðið, upplýsing, tiltøk innan fólkaheilsu sum heild og styrkja heilsufremjandi og fyribyrgjandi partin av arbeiðinum við fólkaheilsu. Herundir er eisini, saman við Heilsumálaráðnum og øðrum pørtum at leggja til rættis og regluliga eftirmeta eina heildarætlan fyri heilsufremjan og fyribyrging fyri allar Føroyar. Mælt verður til, at fólkaheilsuøkið verður styrkt komandi árini.*

### 5.3.3. HEILSUFAKLIG RÁÐGEVING OG VEGLEIÐINGAR

***Inngangur***
Avbjóðandi er, at føroyska heilsulóggávan javnan verður dagførd. Heilsuøkið er ikki yvirtikið málsøkið, men føroyingar fingu í 1995 heimild til at áseta reglur í løgtingslóg á heilsuøkinum. Við heimild í rammulógini, eru hesar løgtingslógir settar í gildi: Løgtingslóg um heilsutrygd,

løgtingslóg um sjúkrahúsverkið, løgtingslóg um kommunulæknaskipan, løgtingslóg um barna- og ungdómstannrøkt, løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung og løgtingslóg um ókeypis koppseting. Apoteksverkið varð yvirtikið í 1949, og løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág varð sett í gildi í 1988. Harumframt eru løgtingslógir á heilsuøkinum, ið eisini koma undir onnur málsøki, herundir: løgtingslóg um gransking í mannaílegum, løgtingslóg um tiltøk at minka um royking, løgtingslóg um virksemi á stovnum, ið veita rúsviðgerð, v.fl.

Hóast fleiri løgtingslógir eru galdandi á heilsuøkinum, er ein partur av heilsulóggávuni donsk, hetta kemst av, at málsøkið ikki er yvirtikið. Nevnast kann, at hesar donsku lógirnar eru settar í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan: sundhedsloven, autorisationsloven, lov om klage- og erstatningsadgang, lov om tvang i psykiatrien, psykologloven, lov om euforiserende stoffer, lov om smitsomme og andre overførbare sygdomme (epidemiloven), lov om videnskabsetisk behandling af sundhedsvidenskabelige forskningsprojekter, lov om børnetandpleje, lov om svangerskabshygiejne og fødselshjælp, lov om anmeldelse af fødsler og dødsfald, lov om radioaktive stoffer, lov om ligbrænding, lov om røntgenstråler og lov om gifte og andre for sundheden farlige stoffer.

Harumframt eru: lov om svangerskabsafbrydelse og lov om sterilisation, settar í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan. Hesar lógir vóru yvirtiknar, tá familjurættarliga økið varð yvirtikið í 2014. Møguligt er tí at tilevna løgtingslógir á hesum økjum. Sambært málsøkjabýtinum hoyra hesar lógir í løtuni til málsøkið hjá landsstýrismanninum í almannamálum.

### *Heilsufaklig ráðgeving*

Eitt av høvuðsendamálunum við at skipa eitt Fólkaheilsustýri er, at politiskt ynski er um at fáa ein føroyskan myndugleika, ið kann veita landsstýrinum, kommunum, primera og sekundera heilsugeiranum heilsufakliga ráðgeving.

Sum áður nevnt er ein partur av heilsulóggávuni føroysk. Hetta eru løgtingslóg um heilsutrygd, løgtingslóg um sjúkrahúsverkið, løgtingslóg um kommunulæknaskipan, løgtingslóg um barna- og ungdómstannrøkt, løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung og løgtingslóg um ókeypis koppseting, løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág, løgtingslóg um gransking í mannaílegum, løgtingslóg um tiltøk at minka um royking, løgtingslóg um virksemi á stovnum, ið veita rúsviðgerð v.fl. Heilsufakliga ráðgevingin í hesum sambandi er til Heilsutrygd, kommunulæknar, heilsufrøðingar, sjúkrahúsverkið og apoteksverkið.

Mett verður, at heilsufakliga ráðgevingin, sum tekur støði í føroyskari heilsulóggávu, verður skipað undir Fólkaheilsustýrinum.

Sambært „Sundhedsloven" kunnu føroyskir myndugleikar fáa ráðgeving um reinførislig, umhvørvislig og sosialmedisinsk viðurskifti. Landslæknin fylgir heilsuviðurskiftunum og heldur seg støðugt kunnaðan um verandi fakligu vitanina á heilsuøkinum. Landslæknin kunnar almenningin, tá ið serlig heilsulig viðurskifti gera tað neyðugt. Mett verður ikki, at nakað forðar fyri, at bæði Landslæknin og Fólkaheilsustýrið veita heilsufakliga ráðgeving. Fleiri ymiskir stovnar í Føroyum veita longu heilsufakliga ráðgeving. Landslæknin, Fólkaheilsuráðið, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Heilsutrygd og Ílegusavnið veita heilsufakliga ráðgeving. Í coronutíðini hevur harumframt verið neyðugt at veita heilsufakliga ráðgeving úr Heilsumálaráðnum, har spurningar eru svaraðir á coronulinjuni, og umvegis coronuráðgevingini, ið varð staðsett undir Arbeiðseftirlitinum. Áheitanir viðvíkjandi lógarbundnum uppgávum, sum Landslæknin varðar av, mugu verða vístar til Landslæknan. Hetta er galdandi viðvíkjandi m.a. áheitanum um smittandi sjúkur, áheitanir um eftirlit og rættarmedisin v.m. Tætt samstarv eigur at vera ímillum Landslæknan og Fólkaheilsustýrið um heilsufakligu ráðgevingina.

*Tilmæli*
*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið veitir heilsufakliga ráðgeving til landsstýrið, kommunur, primera og sekundera heilsugeiran. Heilsufakling ráðgeving eigur at vera gjørd í tøttum samstarvi við Landslæknan.*

## *Kunning til almenning og borgarar*

Í tilgongdini at orða hesa ætlan, hava serfrøðingabólkurin og hoyringarbólkurin víst á, at tørvur er á at menna økið, sum fevnir um kunning til almenning og borgarar um heilsufaklig viðurskifti, tí henda kunning er ikki nøktandi.

Almenningurin hevur tørv á at verða kunnaður um tey tilboð um veitingar, sum eru á heilsuøkinum. Sum er, hevur ongin stovnur hesa uppgávu og tískil er heldur ongin játtan til endamálið. Onkur stovnur hevur tó av sínum eintingum valt at kunna um ávís tilboð. Sum dømi kann nevnast, at Heilsutrygd kunnar um tilboðið um koppseting fyri influensu. Av tí, at játtan ikki er tøk til endamálið, fara útreiðslurnar hesum viðvíkjandi av játtanini til rakstur hjá Heilsutrygd. Serfrøðingabólkurin og hoyringarbólkurin halda, at tað er týdningarmikið fyri heilsustøðuna hjá fólki og við atgongd til tilboð um veitingar á heilsuøkinum, at almenningurin fær at vita um tey tilboð, sum verða sett í verk.

Somuleiðis halda serfrøðingabólkurin og hoyringsbólkurin, at tað er týdningarmikið, at ein talgildur heilsuportalur verður mentur. Á einum slíkum portali kunnu borgarar fáa kunning um sínar egnu heilsuupplýsingar; um heilsuviðurskifti sum heild og møguleikan at leita sær kunning og vitan um heilsufakligar spurningar. Serliga týdningarmikið er, at kunnað verður um serstakar føroyskar heilsufakligar spurningar. Endamálið við einum heilsuportali er, at heilsuupplýsingar verða lættari atkomuligar hjá borgaranum, og at borgarin fær størri innlit í síni egnu heilsuviðurskifti. Sum dømi um slíkar heilsuportalar eru nevndir donsku og norsku heilsuportalarnir www.sundhed.dk og www.helse.no.



Í arbeiðinum er komið fram, at Sjúkrahúsverkið er farið í holt við at menna eina skipan saman við Talgildu Føroyum, har møguligt verður hjá føroyingum at síggja sínar egnu heilsuupplýsingar talgilt umvegis Vangan. Mett verður, at tað er neyðugt at menna ein slíkan talgildan heilsuportal í Føroyum. Í hesum arbeiði verður støða tó ikki tikin til, hvørt ein talgildur heilsuportalur skal staðsetast í Sjúkrahúsverkinum ella í Fólkaheilsustýrinum.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at kunna borgarar og almenning um heilsufaklig viðurskifti. Harumframt verður mælt til, at ein talgildur heilsuportalur, har borgarar fáa kunning um heilsuviðurskifti sum heild og fáa atgongd til sínar egnu heilsuupplýsingar talgilt, við tíðini verður mentur. Mælt verður til, at hesin heilsuportalur verður staðsettur antin í Sjúkrahúsverkinum ella í Fólkaheilsustýrinum.*

### *Vegleiðingar*
Heilsumálaráðið arbeiðir støðugt við at dagføra lógarverkið á heilsuøkinum. Løgtingslógir, lógarbroytingar og kunngerðir verða tilevnaðar í samstarvi við føroyskar myndgugleikar, ímeðan danska lógir og kunngerðir verða dagførdar í samstarvi við Sundhedsministeriet.

Av tí, at lógarverkið er stórt, hevur Heilsumálaráðið bert orku til at dagføra lógir og kunngerðir á heilsuøkinum. Heilsumálaráðið hevur ikki orku til at tilevna vegleiðingar til føroyska og danska lógarverkið. Í hinum Norðanlondunum er tað heldur ikki vanligt, at tað er sjálvt stjórnarráðið, ið ger vegleiðingar. Hendan uppgáva liggur oftast hjá undirliggjandi heilsufakliga myndugleikanum. Í Danmark liggur hendan uppgáva í høvuðsheitum hjá Sundhedsstyrelsen og Styrelsen for Patientsikkerhed.

Ein øðrgrynna av donskum vegleiðingum eru galdandi á heilsuøkinum. Fortreytin fyri, at hesar vegleiðingar kunnu setast í gildi fyri Føroyar, er neyðugt, at vegleiðingarnar verða tillagarar føroysk viðurskiftir. Hetta er til dømis, at ásetingarnar, sum eru yvirtikin málsøki, verða strikaðar úr vegleiðingunum; at ásetingar, ið ikki hóska til føroysk viðurskifti, somuleiðis verða strikaðar, og at danskir myndugleikar verða broyttir til føroyskar myndugleikar.

Mett verður, at Fólkaheilsustýrið kann standa fyri at tilevna vegleiðingar til omanfyrinevndu føroysku heilsulóggávu, umframt, í samstarvi við Landslæknan, at tillaga donsku vegleiðingarnar til føroysk viðurskifti.

***Tilmæli***
*Mælt verður tí til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu, saman við føroyskum myndugleikum, at tilevna vegleiðingar til føroyska heilsulóggávu. Mælt verður eisini til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu, í samstarvi við Landslæknan, at tillaga vegleiðingar til donsku heilsulóggávuna í Føroyum til føroysk viðurskifti, soleiðis at hesar vegleiðingar kunnu setast í gildi fyri Føroyar.*

## 5.3.4. LUTTØKA Í ALTJÓÐA OG NORÐURLENDSKUM HEILSUFAKLIGUM SAMSTARVI
Føroyar hava í mong ár luttikið í norðurlendskum samstarvi á heilsupolitiska økinum. Samstarvið fer fram í ráðharraráðnum fyri almanna- og heilsupolitikk undir Norðurlendska Ráðharraráðnum. Í mai 2021 fingu Føroyar atlimaskap í heimsheilsustovninum, WHO, sostatt kunna Føroyar eisini luttaka í altjóða heilsupolitiskum samstarvi.




Bæði undir Norðurlendska Ráðharraráðnum og WHO eru ein røð av heilsufakligum samstørvum, sum Føroyar hava møguleika fyri at luttaka í. Føroyar luttaka í norðurlendska samstarvinum á hagtalsøkinum, sum nevnist NOMESCO og Svalbardbólkinum (sí undir Heilsutilbúgving); meðan Føroyar á øðrum økjum bert í avmarkaðan mun hava luttikið í tí norðurlendska heilsufakliga samstarvinum. Føroyar hava higartil ikki luttikið í heilsufakligum samstørvum á altjóða stigi undir WHO. Men nú Føroyar hava fingið atlimaskap, fer hetta at bera til hjá Føroyum.

Luttøka í norðurlendskum og altjóða heilsufakligum samstørvum er týdningarmikil fyri Føroyar. Við at luttaka í slíkum samstørvum, ber til at fáa vitan um tey mál, sum onnur arbeiða við og knýta virðismikil sambond. Føroyar kunnu kunna onnur um heilsustøðu føroyinga og um viðurskifti á heilsuøkinum. Hendan vitan kann verða nýtt til at menna heilsuøkið í Føroyum og til at veita ráðgeving innan økið í Føroyum. Mett verður, at Fólkaheilsustýrið eigur at luttaka í norðurlendskum og altjóða fakligum samstarvi innan heilsuøkið.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið luttekur í altjóða og norðurlendskum samstarvi innan heilsufakliga økið.*

## 5.3.5. HEILSUTILBÚGVING

Heilsutilbúgving verður sett í verk í sambandi við vanlukkur, álvarsamar smittusjúkur, yvirgangsatsóknir v.m. Heilsuverkið hevur, sambært sjúkrahúslógini, beinleiðis skyldu til at veita hjálp og sjúkraflutningstænastu til persónar, ið brádliga hava tørv á hesum, orsakað av óhappi ella brádliga íkomnari sjúku v.m.

Umframt sjúkrahústilbúgvingina, sum Sjúkrahúsverkið hevur ábyrgdina fyri og varðar av, hevur eisini í samsvari við Tilbúgvingarætlan Føroya frá 2003 verið arbeitt við at skipa

eina tilbúgving uttanfyri sjúkrahúsverkið. Hetta fyri at stytta um sonevndu responstíðina, umframt at virka sum ein stuðul hjá sjúkrahúsverkinum, tá ið vanlukkan er so mikið stór, at vanliga tilbúgvingin ikki megnar uppgávuna. Í hesum sambandi eru skipaðir bólkar (Sjúkralið) við heilsustarvsfólki, sum ikki dagliga arbeiða á sjúkrahúsi, men sum eru skúlað til at arbeiða á skaðastaði tá ið talan er um størri vanlukkur. Eisini fevnir hendan tilbúgving um sjálvboðin, sum frá heilsuverkinum hava fingið eina sonevnda „First responder" útbúgving, ið er ein víðkað fyrstuhjálpar útbúgving. Í dag finnast tílíkir m.a. á øllum útoyggjum fyri at kunna veita skjóta hjálp, eisini lívbjargandi hjálp, har responstíðin annars kann verða long. Eisini fevnir hendan tilbúgving um eina sálarliga kreppuhjálp, sum kann veita sálarlig fyrstuhjálp í sambandi við álvarsamar vanlukkur.

Uppgávan at gera yvirskipaðar tilbúgvingarætlanir á heilsuøkinum og at skipa tilbúgvingina uttanfyri Sjúkrahúsverkið, liggur hjá Heilsumálaráðnum. Heilsumálaráðið hevur røkt hesa uppgávuna eftir avtalu og í samstarvi við uttanhýsis veitarar. Mett verður ,at hesar uppgávur umframt játtanin, sum er á fíggjarlógini til tilbúgvingina, eigur at verða verða løgd til Fólkaheilsustýrið.

Føroyar luttaka eisini í norðurlendskum samstarvi innan heilsutilbúgving. Arbeiðið fer fram í sonevnda Svalbardbólkinum (Nordisk sundhedsberedskabsgruppe) undir Norðurlendska Ráðharraráðnum. Í Svalbardbólkinum eru umboð fyri stjórnirnar í teimum átta norðanlondunum, har londini kunnu velja 1-2 umboð hvør. Føroyar hava valt at hava tvey umboð í Svalbardbólkinum, og tey eru landsapotekarin og landslæknin.

Uppgávurnar hjá Svalbardbólkinum eru í høvuðsheitum at fyrireika samstarv og lata upplýsingar, førleikar og vitan millum norðanlond innan heilsu- og almannaøkið viðvíkjandi tilbúgving, kreppu- og vanlukkustýring við tí endamáli at verða betri til at handfara kreppur og vanlukku.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at heilsutilbúgvingin og játtanin á fíggjarlógini til tilbúgvingina verður flutt til Fólkaheilsustýrið at umsita.*

## 5.3.6. DYGDARMENNA HEILSUØKIÐ

Tá tað snýr seg um dygdarmenning innan heilsuøkið, ber til at býta økið í tveir høvuðspartar: a) dygdarmenning innan Sjúkrahúsverkið/uttanfyri Sjúkrahúsverkið og b) yvirskipað/ítøkilig dygdarmenning.

### *Dygdarmenning innan Sjúkrahúsverkið/uttanfyri Sjúkrahúsverkið*

Sjúkrahúsverkið arbeiðir støðugt við at dygdarmenna tey trý sjúkrahúsini. Eitt Dygdarráð varð endurstovnað í 2018 til at arbeiða við dygdarmenning. Í Dygdarráðnum eru umboð frá øllum trimum sjúkrahúsum.

Dygdarráðið virkar m.a. fyri at dygdar- og betranararbeiðið gerst ein sjálvsagdur partur í dagliga virkseminum innan Sjúkrahúsverkið; at arbeiðið við sjúklingatrygd tekur støði í góðum atburði og eini sunnari mentan og at taka stig til innanhýsis tiltøk, ið kunnu eggja fakfólki og virka fyri, at arbeitt verður tilvitað við dygdar- og betranararbeiði við t.d. evnisdøgum, verkstovum og sjúklingatrygdarrundum.

Samstarvið og arbeiðið ímillum tey trý sjúkrahúsini gongur sera væl, og mett verður, at hetta er eitt arbeiðið, ið eigur at liggja í Sjúkrahúsverkinum. Sjúkrahúsverkið mælir staðiliga frá, at arbeiðið við at dygdarmenna Sjúkrahúsverkið verður flutt til Fólkaheilsustýrið.

Mett verður, at arbeiðið at dygdarmenna Sjúkrahúsverkið hoyrir heima í Sjúkrahúsverkinum. Mett verður, at tað ikki er ráðiligt at flyta hetta til Fólkaheilsustýrið. Mælt verður til, at arbeiðið at dygdarmenna Sjúkrahúsverkið verður verandi í Sjúkrahúsverkinum.

Tá tað snýr seg um tann partin av heilsuverkinum, sum liggur uttanfyri Sjúkrahúsverkið, verður ikki arbeitt við dygdarmenning í sama skipaða mun sum í Sjúkrahúsverkinum. Bæði serfrøðingabólkurin og hoyringarbólkurin hava lagt dent á, at tørvur er á at fara undir eina skipaða dygdarmenning innan henda partin av heilsuverkinum.

### *Yvirskipað/ítøkilig dygdarmenning*

Í tilgongdini at orða hesa ætlan, hava partarnir lagt dent á, at tað er tørvur á bæði yvirskipaðari og ítøkiligari dygdarmenning innan heilsuverkið. Fólkaheilsustýrið eigur at hava ábyrgdina av at orða yvirskipaðar ætlanir um dygdarmenning innan heilsuverkið. Ítøkiliga dygarmenningin fer fram á stovnunum í heilsuverkinum.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at tilevna yvirskipaðar ætlanir til politiska myndugleikan um dygdarmenning innan heilsuverkið sum heild.*

## 5.3.7. EFTIRLIT VIÐ APOTEKSVERKINUM, RÚSVIÐGERÐARSTOVNUM OG VIÐTALUHØLUM

Eftirlit við apoteksverkinum er eitt yvirtikið málsøkið, ið er regulerað í løgtingslóg um apoteksverk og heilivág. Sambært § 50 í hesi lóg, hevur Landsapotekarin eftirlit við, at lógin og ásetingar við heimild í lógini verða hildnar. Landsapotekarin hevur greitt frá, at hendan uppgáva verður loyst soleiðis, at Landsapotekarin hevur gjørt eina avtalu við Lægemiddelstyrelsen um, at Lægemiddelstyrelsen hevur eftirlit við Framleiðsluapotekinum hjá Apoteksverkinum. Eftir hesari avtalu, hevur Lægemiddelstyrelsen GMP eftirlit við Apoteksverkinum 3. hvørt ár. Hetta eftirlit kostar Apoteksverkinum uml. 50.000 kr. um árið. Harumframt hevur Landsapotekarin biðið Norsk Veritas um at gera ISO-certificering av Apoteksverkinum við jøvnum millumbilum. Hetta kostar Apoteksverkinum 40.000 kr. pr. apotek ella uml. 160.000 kr. tilsamans um árið.

Í Norðanlondunum er ein heilsufakligur stovnur undir stjórnarráðnum, ið fremur eftirlit við undirliggjandi stovnum. Í Danmark er tað t.d. Lægemiddelstyrelsen, ið hevur eftirlit við danska apoteksverkinum. Sambært apoteksverkslógini hevur Landsapotekarin bæði raksturin og eftirliti við Apoteksverkinum um hendi. Skilabest hevði verið at skipa raksturin og eftirliti við Apoteksverkinum í hvør sínum stovni. Eftirlitsuppgávan er ein yvirskipað uppgáva, ið óheftur stovnur eigur at taka sær av.

Heilsutrygd hevur eftirlit við, at rúsviðgerðarstovnar lúka góðkenningarkrøvini sambært løgtingslóg um virksemið á stovnum, ið veita rúsviðgerð, umframt eftirlit við, at viðtaluhølini hjá kommunulæknum eru í tí standi, sum ásett er í lóg og kunngerð.

Eftirlitið við heilsustarvsfólkum og heilsufakligum stovnum er ikki yvirtikið málsøkið. Málsøkið er regulerað í „Autorisationsloven“ og „Sundhedsloven“. Sambært hesum lógum, er tað Landslæknin, ið hevur eftirlit við, at heilsustarvsfólk í Føroyum í sínum virki halda seg til sína autorisatión. Harumframt hevur Landslæknin eftirlit við heilsufakligu stovnunum í Føroyum og kann fremja eftirlit á øllum stovnum, har heilsustarvsfólk starvast.

Av tí, at Landslæknaembætið ikki er partur av hesum arbeiði, verður eftirlit við heilsustarvsfólki og stovnum á heilsuøkinum, ikki ein uppgáva, ið Fólkaheilsustýrið kemur at røkja.

> ***Tilmæli***
> *Mælt verður til, at eftirlitið við ávikavist Apoteksverkinum, rúsviðgerðarstovnum og viðtaluhølum hjá kommunulæknum, sum frálíður, verður flutt til Fólkaheilsustýrið.*

## 5.3.8. EFTIRMETING – TILBOÐ OG SKIPANIR

Í hinum Norðanlondunum verður stórt arbeiði lagt í at eftirmeta m.a. skipanir og viðgerðartilboð innan heilsuøkið.

Í Føroyum verða skipanir og viðgerðartilboð sjáldan eftirmett. Eitt dømi um eftirmeting er í sambandi við tilboð um sálarfrøðiliga viðgerð og stovnar, ið veita rúsviðgerð. Viðvíkjandi hesum tilboðum, hevur Heilsutrygd sett í verk eftirmetingar. Enn eru eftirmetingarnar ikki lidnar, og tí ber ikki til at siga, hvat úrslitið av eftirmetingunum verður. Heilsutrygd mælir til, at hesar eftirmetingar verða fluttar til Fólkaheilsustýrið, tí hildið verður, at eftirmetingar eru yvirskipaðar uppgávur, ið hoyra til Fólkaheilsustýrið.

Mett verður, at uppgávan viðvíkjandi eftirmetingum, er ein yvirskipað uppgáva, ið eigur at liggja hjá Fólkaheilsustýrinum. Hetta er ein stór uppgáva, ið krevur nógva orku. Fyri ikki at gloypa um ov stóran bita, verður mett, at tað er skilabest at byrja við at skipa uppgávuna at eftirmeta rúsviðgerðarstovnar og tilboð um sálarfrøðiliga viðgerð undir Fólkaheilsustýrinum.

> ***Tilmæli***
> *Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið, sum frálíður fær uppgávuna at eftirmeta rúsviðgerðarstovnar og tilboð um sálarfrøðiliga viðgerð.*

## 5.3.9. GÓÐKENNA RÚSVIÐGERÐARSTOVNAR OG TILSKOT TIL HEILIVÁG

Undir verandi skipan er tað Heilsutrygd, sum eftir umsókn, kann góðkenna rúsviðgerðarstovnar. Heilsutrygd góðkennir viðgerðarstovnar eftir serstøkum leisti. Ein góðkenning er galdandi í 5 ár í senn, men kann takast aftur, um viðgerðarstovnurin ikki longur lýkur góðkenningarkrøvini, ella um átaluverd viðurskifti eru viðvíkjandi virkseminum. Áðrenn góðkenningin verður tikin aftur, gevur Heilsutrygd viðgerðarstovninum ávaring við boðum um at loysa trupulleikan innan ásetta freist. Verður trupulleikin ikki loystur innan ásettu freistina, kann Heilsutrygd taka góðkenningina aftur.

Mett verður, at góðkenning av rúsviðgerðarstovnum er ein yvirskipað uppgáva, ið eigur at liggja í einum Fólkaheilsustýri. Til hetta krevst broyting í løgtingslóg um virksemi á stovnum, ið veita rúsviðgerð. Harumframt krevst starvsfólkaorka til at taka sær av uppgávuni.

Landsapotekarin viðger umsóknir um tilskot til heilivág. Tilskot verður veitt til heilivág, sum av Landsapotekaranum er lýstur at vera heimilaður tilskot. Mett verður, at talan kann verða um, at Landsapotekarin er ógegnigur at viðgera hesi mál, av tí at ábyrgdin at dríva raksturin

av Apoteksverkinum, ið útflýggjar heilivág og ábyrgdin at góðkenna tilskotsheimilaðan heilivág, liggur á sama staði. Mett verður, at góðkenning av umsóknum um tilskot til heilivág er ein yvirskipað uppgáva, ið Fólkaheilsustýrið eigur at taka sær av. Til hesa uppgávu við góðkenning av rúsviðgerðarstovnum og góðkenning av umsóknum um tilskot til heilivág verður mett, at eitt starvsfólk skal taka sær av uppgávuni.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið, sum frálíður, fær til uppgávu at góðkenna rúsviðgerðarstovnar og umsóknir um tilskot til heilivág.*

## 5.4. GRUNDARLAG UNDIR ARBEIÐINUM HJÁ FÓLKAHEILSUSTÝRINUM

Fyri at kunna røkja omanfyristandandi uppgávur, er neyðugt, at Fólkaheilsustýrið mennir og skipar neyðugar føroyskar heilsuskráir og hagtøl og ikki minst, at arbeiðið hjá Fólkaheilsustýrinum er granskingargrundað. Í hesari ætlan verður tí mælt til, at Fólkaheilsustýrið skal standa fyri at skipa og menna heilsuskráir og hagtøl, umframt veita granskingargrundaða myndugleikatænastu. Niðanfyri verður hetta lýst nærri.

### 5.4.1. HAGTØL

Heilsustarvsfólk, granskarar, mongu álitini seinastu árini og onnur hava víst á, at stórur tørvur er á at menna hagtalspartin á føroyska heilsuøkinum sum heild.

Trotið á føroyskum hagtølum hevur við sær, at donsk hagtøl ofta verða nýtt, tá viðurskifti í Føroyum verða umrødd. Men, sum tað sæst í niðanfyristandandi dømi, kann støðan í Danmark og Føroyum verða rættiliga ymisk, og tí kann tað geva eina misvísandi mynd av støðuni í Føroyum um donsk hagtøl verða nýtt heldur enn føroysk. Hetta er somuleiðis eitt dømi um, hvussu týdningarmikið tað er at fáa hagtøl um føroysk viðurskifti.

**Støðan í Føroyum og Danmark – uppgerð pr. 13. august 2021**

| | Støðan í DK | Støðan í DK/100 | Støðan í FO |
|---|---|---|---|
| Smitta við COVID-19 | 329.010 | 3.290 | 991 |
| Deyð við COVID-19 | 2.558 | 26 | 2 |
| Testir PCR | 39.401.498 | 394.015 | 387.645 |
| Fyrra koppseting | 4.319.167 (73,9%) | 43.191 | 35.928 (67,3%) |
| Liðugt koppsett | 3.702.158 (63,4%) | 37.022 | 32.918 (61,7%) |

Heilsustarvsfólk, granskarar og mongu álitini hava víst á, at neyðugt er at hava eitt stýri, ið savnar inn, viðgerð og mennir tilfar um viðurskifti viðvíkjandi heilsu, heilivági og skipanum tengdum at hesum, so tað fer at bera betri til at leggja til rættis og stýra økinum. Tá hagtalsparturin er mentur, verður lættari at gera heilsupolitiskar og heilsubúskaparligar greiningar og frágreiðingar, sum stórur tørvur somuleiðis er á. Við hesum fæst eitt neyðugt stýringaramboð, sum er ein fortreyt fyri at kunna leggja til rættis og stýra økinum á ein munandi skilabetri og skynsamari hátt, enn møguleiki er fyri undir verandi skipan.



Fyri at útvega hesi hagtøl er neyðugt, bæði at savna saman og skipa tey hagtøl, sum longu finnast í heilsuverkinum, og at gera neyðugar kanningar, sum lýsa heilsu og livimáta hjá fólki sum heild. Hagtølini skulu skipast á ein slíkan hátt, at tað ber til at fylgja gongdini í fólkaheilsustøðuni og samanbera hana við gongdina í londum, sum ynskiligt er at samanbera Føroyar við. Hagtalsliga grundarlagið kann fáast til vega við at gera somu kanningar í Føroyum, sum gjørdar verða í grannalondunum. Vitan um heilsu og tey viðurskifti, sum ávirka heilsustøðuna, er neyðug fyri at fáa vitan um verandi støðu, lýsa avbjóðingar, sum standa fyri framman, og fyri at kunna leggja til rættis og fremja fyribyrgjandi og heilsufremjandi tiltøk í verki. Vitanin um fólkaheilsustøðu føroyinga, skal somuleiðis brúkast sum grundarlag undir teimum heilsupolitisku avgerðunum, sum fara at verða tiknar.

Kanningar eiga at vera gjørdar við jøvnum millumbilum, so møguligar broytingar í støðuni kunnu staðfestast og eftirfylgjandi tulkast og møgulig átøk fyrireikast og setast í verk. Serliga umráðandi eru kanningarnar fyri at kunna meta um, hvørt framd átøk hava havt nakra broyting við sær. Eisini eru kanningarnar týðandi fyri at kunna staðfesta óheppin lyndi (tendensir) í nýtslumynstrinum og harvið kunna gera inntriv skjótt og miðvíst.

Tað er umráðandi at slíkar kanningar javnan verða gjørdar. Hetta krevur bæði, at uppgávan at gera kanningarnar er væl og virðiliga lýst, at tað er greitt hvør tað er, sum hevur ábyrgdina fyri at fremja kanningina, umframt at Fólkaheilsustýrið, hevur neyðuga starvsfólkaorku og fíggjarliga orku til at gera arbeiðið.

## *Heilsulýsing fyri Føroyar*

Landslæknin ger á hvørjum ári eina heilsulýsing, sum einamest er grundað á hagfrøðiligar fráboðanir til Landslæknaembætið. Nøkur hagtøl viðvíkjandi almannamálum eru eisini við í heilsulýsingini. Í Heilulýsingini hjá Landslæknanum verður ábyrgdarøkið hjá Landslæknaembætinum lýst, harumframt er eitt yvirlit yvir virksemið í árinum.

## *NOMESKO*

Føroyar eru partur av norðurlendska samstarvinum, NOMESKO. Hetta er eitt samstarv undir Norðurlendska Ráðharraráðnum, ið hevur til endamáls at savna norðurlendsk heilsuhagtøl á einum stað, har tey verða uppgjørd eftir einum felags leisti fyri at kunna verða samanborin sínamillum.

Heilsumálaráðið og Apoteksverkið lata hagtøl til NOMESKO. Tølini frá Apoteksverkinum eru teirra egnu tøl. Tølini, ið Heilsumálaráðið veitir, verða savnað ymsa staðni frá. Ein munandi partur kemur frá talgildu heilsuskipanini Cosmic. Harafturat koma tølini frá Landslæknanum, Hagstovuni, Heilsutrygd og Fólkaheilsuráðnum. Tølini úr Cosmic eru løgd í fastar talvur (skabelónir), har Heilsumálaráðið hevur atgongd til hetta endamálið. Hetta eru alt navnleys ( anonymisera) tøl. Føroyska tilfarið er ikki fullfíggjað, tí higartil hevur ikki borið til at fingið øll tølini úr Cosmic.

NOMESKO hevur higartil givið hagtølini út í árligari frágreiðing. Miðskeiðis í 2021 verður hetta broytt. Eftir hetta verða tølini atkomulig í dátugrunni, ið kann dagførast oftari, og sum øll hava atgongd til.

## *NORDCAN*

Føroyar lata krabbameinshagtøl til norðurlendska samstarvið, NORDCAN. Hetta er eitt samstarv, ið hevur til endamáls at savna hagtøl frá norðanlondum á einum stað og skipa tey, so tey kunnu samanberast sínamillum.

Tað er Landssjúkrahúsið, ið letur tølini til NORDCAN. Á Landssjúkrahúsinum tekur ein skrivari sær av at tøppa tølini inn í telduskipan. Í løtuni og fram til 2022 tekur ein ph.d. lesandi sær av at fáa fleiri tøl til vega og at góðskutryggja øll tølini. Eftir 2022 er óvist, hvussu verður við starvsfólkaorkuni. Skulu tølini greinast, má starvsfólkaorka setast av til tað. Føroyar hava ikki havt tøl fyri allar bólkar, sum hini londini hava. Arbeitt hevur verið við hesum, og í næstum fara fleiri ymisk tøl at verða tøk, eitt nú tøl fyri, hvussu nógv yvirliva krabbameinssjúku.

Fólkaheilsustýrið eigur at standa á odda fyri at savna vitan um heilsu og trivnað. Heilsustarvsfólk, granskarar, mongu álitini seinastu árini og onnur hava gjørt vart við, at stórur tørvur er á at menna hagtalspartin í føroyska heilsuøkinum sum heild. Hesi hava víst á, at neyðugt er at hava eitt stýri, ið savnar inn, viðgerð og mennir tilfar um viðurskifti viðvíkjandi heilsu, heilivági og skipanum, tengdum at hesum, so tað fer at bera betri til at leggja til rættis og stýra økinum. Tá hagtalsparturin er mentur, verður lættari at gera heilsupolitiskar og heilsubúskaparligar greiningar og frágreiðingar, sum stórur tørvur somuleiðis er á. Við hesum fæst eitt neyðugt stýringaramboð, sum er ein fortreyt fyri at kunna leggja til rættis og stýra økinum á ein munandi skilabetri og skynsamari hátt, enn møguleiki er fyri undir verandi skipan.

Fólkaheilsustýrið eigur at standa á odda fyri at savna vitan um heilsu og trivnað. Tískil eigur uppgávan at fáa til vega, skipa, viðgera og menna hagtøl innan heilsuøkið, at verða løgd til Fólkaheilsustýrið.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at skipa hagtøl á heilsuøkinum; at gera, viðgera og menna hagtøl innan heilsuøkið. Mælt verður samstundis til, at menningin av hagtølum, ið fer fram innan Sjúkrahúsverkið, heldur fram óbroytt.*

*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at gera lýsingar, greiningar og heilsufrágreiðingar, herundir m.a. at gera eina árliga heilsulýsing um heilsustøðu føroyinga, umframt javnan at gera heilsufrágreiðingar innan serstøk økir, t.d. um serstakar sjúkur.*

## 5.4.2. HEILSUSKRÁIR

Í hesum brotið verður lýst, hvørjar heilsuskráir eru í Føroyum, og hvørjar skráir í Danmark hava týdning fyri føroyingar. Harumframt verður umrøtt, hvørjar skráir mangla í Føroyum, og mett verður hvat skal til, fyri at menna heilsuskráir undir Fólkaheilsustýrinum.

### Skráir innan Sjúkrahúsverkið

Sjúkrahúsverkið hevur nógvar skipanir við sjúklingaupplýsingum – uml. 60 skipanir. Tær størstu eru Cosmic, Krabbameinskráseting, Digital Røntgen, rannsóknarstovuskipan (BCC-lab.), Microbiologi skipan, EKG v.fl.

#### *Cosmic*

Cosmic ella THS (talgilda heilsuskipanin) er elektroniska sjúklingajournal føroyinga. Í hesari skrá skráseta heilsustarvsfólk sjúkrastøðuna í journal hjá sjúklinginum.

Tað, sum eitt heilsustarvsfólk tøppar inn av upplýsingum, eru upplýsingar, sum snúgva seg um heilsustøðuna hjá einstaka persóninum, sokallaða journalnotatið. Journalnotatið verður viðfest, men er ikki eitt beinleiðis inntøppað notat. Harumframt er eisini fyriskrivaður heilivágur og forskriftir í Cosmic, umframt heilivágur, ið persónurin ikki tekur longur. Tíðir til viðtalur/innleggingar/skurðviðgerðir og so framvegis hjá tí einstaka persóninum, bæði frameftir og aftur í tíð. Brøv, sum verða send til persónar um tíðir til viðtalur/tíðir til skurðviðgerðir o.s.fr., og upplýsingar um einstaka persónin, sum koma frá øðrum fakskipanum sum t.d røntgensvar, blóðroyndarsvar o.s.fr. CI (Cosmic Intelligence), sum er databasa har hagtøl kunnu fáast burturúr.

Cosmic verður nýtt til sjúklingajournal, men skipanin er eisini gjørd soleiðis, at hagtøl kunnu fáast úr henni.

Sjey fólk starvast í THS toyminum, har Cosmic fyllur mest, men eisini er nógv talgilt samskifti millum tær størstu skipanirnar, so sum BCC, Røntgen, Microbiologi, her er KT nógv tengt at og heilsustarvsfólk frá deildunum. Áleið eitt hálvtíðar starvsfólk arbeiðir við hagtalsteknikki, (Power-BI frá MS Ci (Cosmic intelligent) data cubes o.l. Fimm starvsfólk umsita Cosmic (THS umsitarar), eitt starvsfólk fulla tíð og eitt hálvtíðar starvsfólk umsita Cosmic (THS umsitarar), eitt starvsfólk fulla tíð og eitt hálvtíðar starvsfólk taka sær av teknikkinum og eitt starvsfólk (½ tíð= arbeiðir við hagtølum (teknik, power bi o.s.fr.).

Árligi kostnaðurin av at umsita Cosmic er 9,3 mió.kr. Meginparturin av játtanini verður nýttur til lønir, útreiðslur til Cambio til at viðlíkahalda skipanina og ráðgeving (serliga frá Cambio, men eisini frá øðrum veitarum). Hardware skal útbyggjast og endurnýggjast javnan.

Kostnaðurin av hesum er nakrar mió.kr., sum verður býttur millum Landssjúkrahúsið og Cosmic játtanina. Kommunufelagið fíggjar tvey av starvsfólkunum, eftirsum nógvir brúkarar á eldraøkinum eru komir við í skipanina.

Serfrøðingabólkurin hevur umrøtt, um Cosmic eigur at verða flutt í Fólkaheilsustýrið ella framhaldandi eigur at vera undir Sjúkrahúsverkinum. Serfrøðingabólkurin er ikki samdur í hesum spurninginum. Apoteksverkið (tengt at Cosmic viðvíkjandi heilivágshagtølum), Heilsutrygd (tengt at Cosmic viðvíkjandi kommunulæknaskipanini), Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Ílegusavnið halda, at skipanin við Cosmic eigur at verða flutt til Fólkaheilsustýrið. Grundgevingarnar hjá teimum eru, at skipanir hjá Apoteksverkinum og Heilsutrygd eru tengdar at Cosmic, og tí halda tey, at tað er óheppið, at ein stovnur, sum sjálvur er tengdur at skipanini, t.v.s. Sjúkrahúsverkið, umsitur skipanina vegna alt økið. Tey halda tí, at tað er rættast, at skipanin við Cosmic liggur í einum stovni, sum ikki er partur av hesi skipan, tí ein slíkur stovnur kundi betri tænt øllum heilsuverkinum. Tey føra eisini fram, at tað er neyðugt at flyta Cosmic til Fólkaheilsustýrið, so Fólkaheilsustýrið kann gera hagtøl innan heilsuøkið, og Cosmic kann nýtast til at menna skráirnar, heilsuportal.fo og Landssjúklingaskránna, sum eru uppgávur, ið verða partur av virkisøkinum hjá Fólkaheilsustýrinum.

Sjúkrahúsverkið, hinvegin, mælir staðiliga frá, at Cosmic verður flutt úr Sjúkrahúsverkinum til Fólkaheilsustýrið. Hetta av tí, at Cosmic er eitt høvuðs arbeiðsamboð hjá Sjúkrahúsverkinum. Innan Sjúkrahúsverkið starvast umleið 1.400 starvsfólk, ið nýta sjúklingajournalina Cosmic í sínum arbeiði. Talið av heilsustarvsfólkum, ið arbeiða við Cosmic uttanfyri sjúkrahúsverkið er munandi lægri. Journalskipanin Cosmic er so nógv tvinna saman við rakstrinum innan Sjúkrahúsverkið, at um Cosmic verður flutt, er eisini neyðugt at flyta nógv annað virksemi innan KT á Sjúkrahúsverkinum. Sjúkrahúsverkið metir, at hetta ikki er ráðiligt. Í staðin fyri at flyta Cosmic til Fólkaheilsustýrið, mælir Sjúkrahúsverkið til, at arbeitt verður fram ímóti at betra tænastuna til tey heilsustarvsfólk uttanfyri Sjúkrahúsverkið, ið hava brúk fyri Cosmic í arbeiði sínum. Hóast Cosmic er staðsett í Sjúkrahúsverkinum, ber til at skipa arbeiðið við skráunum soleiðis, at tætt samstarv er ímillum Sjúkrahúsverkið og Fólkaheilsustýrið um at veita upplýsingar og hagtøl úr Cosmic, soleiðis at skráirnar heilsuportal.fo og Landssjúklingaskráin kunnu verða uppbygdar.

Mett verður, at eftirsum Cosmic er eitt høvuðsarbeiðsamboð í dagliga rakstrinum hjá Sjúkrahúsverkinum, eigur Cosmic at vera verandi í Sjúkrahúsverkinum.

> ***Tilmæli***
> *Mælt verður til, at Cosmic framhaldandi verður í Sjúkrahúsverkinum og tískil ikki verður flutt til Fólkaheilsustýrið.*

## *Krabbameinsskráin*

Í Krabbameinsskránni eru upplýsingar um kyn, aldur, fyrsta læknaliga sambandið, diagnosu, dato fyri diagnosu, slag av krabbameini, kanningar og dato fyri viðgerð.

Upplýsingarnar verða skrásettar í Føroyum, og eina ferð árliga fer umboð frá Sjúkrahúsverkinum til Danmarkar at gjørgnumganga tilfarið saman við Statens Serum Institut. Tilfarið verður síðani ført inn í Nordcan.

Søgan um Krabbameinsskránna er í stuttum, at fyri góðum 25 árum síðani, kom ein áheitan frá Kræftens Bekæmpelse um at stovna eina deild í Føroyum. Hendan varð staðsett á medicinsku deild á Landssjúkrahúsinum. Á hvørjum ári verður alt tilfarið gjøgnumgingið.

Hugt verður eftir øllum teimum, ið eru deyð og øllum sum eru skrásett í Krabbameinsskránni. Farið verður 5 ár aftur í tíðina regluliga, fyri at fáa alt við.

Eingin játtan ella starvsfólkaorka er sett av til hetta arbeiði. Í Krabbameinsætlanini var uppskot um at seta góðar 400.000 kr. av árliga til hetta arbeiði. Hetta kom ongantíð. Tað er tí eitt arbeiði, sum verður gjørt uttan samsýning. Sjúkrahúsverkið hevur tó skyldu at lata tølini til Heilsumálaráðið og Landslæknastovnin, so nógv orka og frítíð ferð við hesum týdningarmikla arbeiði.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at Krabbameinsskráin innan Sjúkrahúsverkið verður flutt til Fólkaheilsustýrið at umsita. Hetta av tí, at talan er um landsumfatandi skrá yvir krabbameinstilburðir.*

## Skráir hjá Ílegusavninum

Ílegusavnið umsitur: Diagnosuskránna, Ættarbandsskránna og Vevnaðarskránna.

### *Um Diagnosuskránna*

Í Diagnosuskránni verða goymdar upplýsingar um tær diagnosur og aðrar heilsuupplýsingar, ið verða latnar til verkætlanir innan ílegugransking. Hesar upplýsingar eru fingnar til vega við samtykki frá borgaranum. Av innsavnaðu heilsuupplýsingunum í Diagnosuskránni kunnu bert WHO-flokkaðar diagnosur goymast, umframt upplýsingar, sum eru vunnar úr vevnaðinum.

Arbeiðið við at uppbyggja diagnosuskránna fer fram í sambandi við ítøkiligar granskingarverkætlanir ella forkanningar/epidemiologiskar verkætlanir. Upplýsingar um diagnosur og aðrar viðkomandi heilsuupplýsingar, verða skrásettar í serligari telduskipan, sum hevur heitið, Progeny. Upplýsingarnar verða tó bert skrásettar, um luttakarin frammanundan hevur latið samtykki. Heilsuupplýsingarnar koma frá sjúkrahúsverkinum, kommunulæknum og apoteksverkinum.

### *Um Ættarbandsskránna*

Í Ættarbandsskránni verða goymdar upplýsingar um ættarbond. Ættarbandsskráin er eitt ættartræ yvir føroyingar, sum fevnir um tíðarskeiðið frá umleið ár 1650 til í dag.

Arbeiðið við at gera Ættarbandsskránna fór í gongd tíðliga í 2007. Virksemið í sambandi við Ættarbandsskránna hevur egnan kunningartrygdarpolitikk, og er fráboðað og góðkent av Dátueftirlitinum í 2007 og er eftirfylgjandi longt. Somuleiðis eru loyvir fingin frá Landsfólkayvirlitinum og Kirkeministeriet til at fáa atgongd til ymsar keldur, sum eru viðkomandi fyri verkætlanina. Ættarbandsskráin verður gjørd í samstarvi við Tjóðskjalasavnið. Skrásetingararbeiðið byggir á keldur, so sum ministerialbøkur (Kirkjubøkur), Landsfólkayvirlitið, fólkateljingar o.a.

Stóra arbeiðið higartil hevur verið at skrásett keldur, meðan dentur nú verður lagdur á at sambinda skrásetingarnar til eina so fullfíggjaða ættarbandsskrá sum gjørligt, umframt at tað verða gjørdar serligar greiningar í sambandi við ítøkiligar verkætlanir. Av tí, at Ættarbandsskráin ikki er liðug enn, verða tað í sambandi við ítøkiligar verkætlanir gjørd úttøka av viðkomandi ættarbandstalvum (pedigree), sum verða lagdar í ítøkiligu verkætlanina í Progeny skipanini hjá Ílegusavninum. Ílegusavnið hevur, í samstarv við Talgildu Føroyar, valt at leggja Ættarbandsskránna út á talgildu skipanina, Vangan, so borgarin sær sína egnu ætt í beinari linju aftureftir. Tó ber bert til at síggja nøvnini á teimum, sum eru eldri enn 100 ár.

## *Um Vevnaðarskránna*

Í Vevnaðarskránni verður vevnaður goymdur, eisini eftir at vevnaðurin er kannaður. Hetta er sjálvur biobankin hjá Ílegusavninum.

Vevnaðarskráin er staðsett í hølum, sum Ílegusavnið leigar frá Landssjúkrahúsinum og heldur til í høli saman við kliniska biobankanum hjá Landssjúkrahúsinum. Virksemið viðvíkjandi handfaring av royndum v.m. hevur leigað høli til endamálið á Rannsóknarstovuni. Ílegusavnið hevur samstarvssáttmála við Rannsóknarstovuna á Landssjúkrahúsinum um útvald starvsfólk at umsita biobankan og at taka sær av at savna inn royndir í sambandi við verkætlanir. Harafturat at handfara biobankan í samstarvi við Ílegusavnið og klinisku ábyrgdarhavarnar í einstøku verkætlanunum.

Vanliga er talan um vevnað, sum verður tikin av nýggjum í sambandi við ítøkiligar ílegugranskingarverkætlanir. Her kann eisini verða talan um, at verkætlanir fáa undantaksloyvi frá Vísindasiðseminevndini til at brúka royndir frá farnum persónum uttan samtykki, í tann mun viðkomandi persónur hevur royndir liggjandi í kliniskum biobanka hjá heilsuverkinum.

Til virksemið hevur Ílegusavnið útvegað ymisk starvsstovutól til at handfara royndir og frystiboksir til vevnaðin í Vevnaðarskránna. Harumframt hevur Ílegusavnið avtalu við Suðuroyar Sjúkrahús og Klaksvíkar Sjúkrahús um at taka royndir fyri verkætlanir í teimum førum, tá tað er høgligari fyri luttakaran.

Ílegusavnið hevur sáttmála við Landssjúkrahúsið um at innsavna blóð- og vevnaðarroyndir til framtíðar granskingarendamál. Hetta er ein skipan, sum er ætlað til at savna royndir í førum, tá læknar meta tað verða viðkomandi, og viðkomandi persónur eisini er áhugaður í tí, fyri at viðvirka til møguligar komandi verkætlanir innan eitthvørt evni.

Diagnosuskráin er ein skrá við diagnosum hjá føroyingum kring alt landið og ættarbandsskráin er landsumfatandi skrá um ættarbond hjá føroyingum. Mett verður, at hesar skráir hóska væl til uppgávurnar hjá Fólkaheilsustýrinum við at menna hagtøl og Landssjúklingaskrá. Mett verður tí, at hesar skráir eiga at liggja í Fólkaheilsustýrinum. Møguliga kann diagnosuskráin við tíðini mennast til eina Landssjúklingaskrá.

Vevnaðarskráin er biobankin hjá Ílegusavninum. Umrøtt hevur verið, hvørt biobankin eigur at verða staðsettur í Fólkaheilsustýrinum ella í Sjúkrahúsverkinum. Sambært verandi skipan er tað Ílegusavnið, sum umsitur og heldur við líka vevnaðarskránna og tryggjar, at viðurskiftini kring biobankan eru í lagi, ímeðan Sjúkrahúsverkið hevur hølir til biobankan. Ílegusavnið leigar hølini frá Sjúkrahúsverkinum. Bæði Ílegusavnið og Sjúkrahúsverkið halda, at henda skipanin virkar væl. Mett verður, at av tí, at tær tríggjar skráirnar hjá Ílegusvaninum hanga neyvt saman og av tí, at hendan skipan virkar væl, er ikki neyðugt at gera broytingar í skipanini. Mett verður tí, at vevnaðarskráin, saman við diagnosuskránni og ættarbandsskránni eiga at flyta í Fólkaheilsustýrið.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at Ílegusavnið við sínum skráum: Diagnosuskráin, Ættarbandsskráin og Vevnaðarskráin, verða fluttar til Fólkaheilsustýrið at umsita.*

*Mælt verður til at arbeiðið við heilsuskráum í Fólkaheilsustýrinum verður uppraðfest og styrkt komandi árini. Hetta fyri, at Fólkaheilsustýrið kann fáa haldgott grundarlag til at veita heilsufakliga ráðgeving og gera tilmælir um ráðlegging innan heilsuverkið v.m.*



## FarGen verkætlanin og persónlagað medisin

Eitt undirstøðukervi fyri eina genomskrá í Føroyum verður í løtuni ment undir Ílegusavninum. Tilsamans 10 mió. kr. vórðu játtaðar um donsku fíggjarlógina, árini 2015-2017. M.a. er upphæddin brúkt til at innsavna, klárgera og talgilda (exom- og genom-sekvensera) blóðroyndir hjá 1.500 persónum. Soleiðis er ein genomdátubanki ávegis í Føroyum, sum ger tað møguligt, m.a. at genomgranska í føroyska fólkinum frameftir. Haraftrat er referansu genomið um at verða liðugt.

FarGen verkætlanin hevur seinastu tíðina arbeitt við at menna persónlagað medisin í Føroyum.

Umrøtt hevur verið, hvørt FarGen verkætlanin eigur at verða skipað undir Fólkaheilsustýrinum. Í FarGen verkætlanini verður ment eitt undirstøðukervi á íleguøkinum, bæði til gransking og kliniskt brúk. Miðað verður ímóti, at granskarar við kravdum loyvum, skulu hava møguleika til at fáa atgongd til tilfarið í undirstøðukervinum til gransking, og læknar skulu hava møguleika til at fáa atgongd til íleguroynd hjá einum sjúklingi, ið hevur tørv á at fáa íleguroyndina greinaða.

Mett verður, at tann parturin av FarGen verkætlanini, sum inniber gransking, eigur at verða staðsettur í tí heilsugranskingareindini, ið verður skipað í sambandi við hetta arbeiðið. Tað vil siga, at ein verkætlanarleiðari, ein laboratoriusamskipari og eitt kunningarfólk (½ tíð), ið eru knýtt at FarGen, flyta til hesa heilsugranskingareindina. Sjálvt undirstøðukervið eigur at verða verandi í Vevnaðarskránni, sum verður staðsett undir Fólkaheilsustýrinum.

Í Danmark er tað „Nationalt Genom Center“, ið hevur ábyrgdina av at menna skipanina við persónlagaðum medisini fyri alt landið. Tað eru donsku sjúkrahúsini, ið lata dátur inn

til „Nationalt Genom Center“. Á sama hátt kann hugsast, at FarGen verkætlanin, sum partur av heilsugranskingareindini innan Sjúkrahúsverkið, letur dátur til Diagnosuskránna og Vevnaðarskránna, ið verða staðsettar í Fólkaheilsustýrinum. Hesar dátur kunnu síðani verða nýttar til at menna skipanina við persónlagaðum medisini fyri allar føroyingar.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at tann parturin av FarGen verkætlanini, sum inniber gransking, verður staðsettur í tí heilsugranskingareindini, ið verður skipað í sambandi við hetta arbeiðið. Mælt verður til, at sjálvt undirstøðukervið verður verandi í Vevnaðarskránni, sum verður staðsett undir Fólkaheilsustýrinum. Dáturnar í undirstøðukervinum kunnu síðani verða nýttar til at menna skipanina við persónlagaðum medisini fyri allar føroyingar.*

## Skráir hjá Heilsutrygd

Heilsutrygd hevur ment skráir til egna nýtslu og er harumframt tengt at ávísum skráum, so sum Cosmic. Niðanfyri verður greitt frá heilsuskráunum hjá Heilsutrygd.

### *Samlirokning*

Samlirokning er ein avrokningarskipan til kommunulæknar. Skipanin fær upplýsingar úr Cosmic, og allar upplýsingar sum eru í avrokningarskipanini eru eisini í Cosmic. Árligur kostnaður at reka skipanina er uml. kr. 90.000. Skipanin Kervi, fer at koma í staðin fyri skipanina við samlirokning, og fellur kostnaðurin tá burtur.

### *Kervið*

Kervið verður brúkt til at avrokna veitarar hjá Heilsutrygd. Enn eru tað bara fótarøktarar, sum avrokna umvegis hesa skipanina. Ætlanin er at fáa allar veitararnar hjá Heilsutrygd at avrokna umvegis Kervið. Talan er um kommunulæknar, fysioterapeutar, sálarfrøðingar, tannlæknar o.o. Tá fer at bera til at síggja, hvørjar veitingar ymisku veitararnir gera. Kervið hevur, umvegis Heldina, atgongd til Fólkayvirlitið. Enn er Kervið ikki liðugt útbygt, og peningur má tí brúkast til at útbyggja skipanina. Árligi raksturin er tí ikki kendur í løtuni.

### *Cosmic*

Cosmic verður brúkt í kommunulæknaskipanini. Skipanin verður brúkt til journal o.a., t.d. at skráseta rokningar hjá kommunulæknum.

### *Pappírsjournalir hjá Gigni og kommunulæknum*

Enn er Gigni ikki ein partur av Cosmic, og tí brúka heilsufrøðingarnir framvegis pappírs-journalir. Tær virknu journalirnar hava heilsufrøðingarnir í varðveitslu; meðan tær gomlu journalirnar hjá Gigni, verða goymdar á Elektron. Upplýsingarnar í hesum journalum, áttu at verið skrásettar talgilt, men tað krevur nógv arbeiði og kann ikki gerast við verandi starvsfólkaorku í Heilsutrygd.

Áðrenn kommunulæknar gjørdust partur av Cosmic skipanini, skrivaðu teir í pappírs-journalir. Hesar pappírsjournalir eru goymdar ymsastaðni, men Heilsutrygd hevur ikki yvirlit yvir, hvar tær eru goymdar. Tørvur er eisini á at fáa hesar upplýsingar skrásettar talgilt.

Trupult er at siga, hvat slíkt arbeiði kostar. Fyri at fáa sum mest burturúr einari møguligari talgilding, metir Heilsutrygd, at tað má skrásetast soleiðis, at tað verður møguligt at leita í skipanini. Hetta krevur skrásetingararbeiði fyri hvørt einstakt skjal. Tá talan er um 32.000 journalir við fleiri skjølum, er talan um stórt arbeiði. Um tað í miðal tekur 15 min. at talgilda hvørja journal, er talan um umleið 4 ársverk og tekur tað í miðal 5. min

at talgilda hvørja journal, er talan um umleið 1,3 ársverk til at talgilda journalirnar hjá Gigni. Tá er hædd ikki tikin fyri kostnaði av møguligari skipan. Heilsutrygd leggur dent á, at talan her er um heilt leysliga meting. Tá ið arbeiðið verður meira ítøkiligt, kann gerast ein meira ítøkilig kostnaðarmeting.

Tær skipanir og skráir, ið Heilsutrygd hevur ment, brúkar Heilsutrygd sum arbeiðsamboð. Hesar eru týðandi í virkseminum hjá Heilsutrygd. Mett verður ikki, at hesar skráir eiga at flyta til Fólkaheilsustýrið.

***Tilmæli***
*Mælt verður ikki til, at hesar skráir verða fluttar í Fólkaheilsustýrið, men at samstarv verður ímillum Fólkaheilsustýrið og Heilsutrygd um at fáa neyðugar upplýsingar úr skráunum hjá Heilsutrygd í Landssjúklingaskránna.*

*Viðvíkjandi pappírsjournalum hjá Gigni og kommunulæknum, verður mælt til, at arbeiðið verður sett í verk at fáa tilfarið í hesum journalum skrásett talgilt, soleiðis at upplýsingar frá hesum skráum eisini kunnu verða skrásettar í Landssjúklingaskránni.*

## Skráir, ið Apoteksverkið umsitur

Apoteksverkið menti fyrstu KT-skipanina seinast í 1980-unum, og síðan tá hevur Apoteksverkið dagført og skift KT-skipanir nakrar ferðir.

Síðan 2015 hevur Apoteksverkið brúkt ERP-skipanina Microsoft Dynamics AX2012, og komandi 6-8 mánaðirnar verður skipanin uppstigað til Microsoft D365FO.

KT-skipanin hjá Apoteksverkinum fevnir um keyp, sølu, framleiðslu, distributión og finans.

Skipanin er partvíst tillagað til føroysk viðurskifti. Hagtalsparturin er mentur innanhýsis.

Apoteksverkið umsitur:

- Heilivágsskrá
- Tilskotsskrá (hækkað einstaklingatilkot, terminaltilskot, tilskot til ávísar sjúklingabólkar). Tilskotsnevndin viðger umsóknir frá læknum, og KT-deildin leggur játtað tilskot inn í Apoteksskipanina
- Loyvisskrá til ikki skrásettan heilvág, sum ávísir læknar og sjúkrahúsdeildir hava loyvi at útskriva. Játtanir til ikki-skrásettan heilivág koma frá Landslæknanum, og í ávísum førum frá Lægemiddelstyrelsen. KT-deildin leggur hesi loyvi í Apoteksskipanina. Fyri ikki-skrásettan djóraheilivág er tað Landsdjóralæknin og Landsapotekarin, sum taka støðu til um heilivágur skal brúkast í Føroyum
- Apoteksverkið ger hagtøl yvir brúkið av heilivági, og hesi tøl verða almannakunngjørd í samstarvi við Nomesco og Hagstovuna. Umframt hetta útvegar Apoteksverkið hagtøl til granskingarverkætlanir og aðrar ad-hoc fyrispurningar um heilivág.

Heilivágsskráin inniheldur upplýsingar um skrásettan, ikki-skrásettan, magistrellan, serføroyskan og serligan sjúkrahúsheilivág, umframt heilivág til djór. Harumframt fevnir skráin eisini um sokallaðar merkivørur, sum eru vørur, sum ikki er heilvágur, herundir plástur, proteindrykkir, ‘medical devices’ v.m.

Allur heilvágur, sum er skrásettur í Danmark, er samstundis skrásettur í Føroyum. Apoteksverkið lesur inn fílur frá Lægemiddelstyrelsen 14. hvønn dag, og síðani verða serføroysku vørurnar innlisnar í dátugrunnin.

Skráin verður síðan útlisin í fílu og send til Cosmic, har hon verður innlisin. Sostatt er Apotekskipanin og Cosmic skipanin synkronar/synkroniseraðar við heilivági og útvaldum merkivørum.

Upplýsingarnar verða goymdar talgilt í dátugrunni hjá Apoteksverkinum, sum verður hýstur í servara-umhvørvi hjá Elektron. Apoteksverkið goymir ikki upplýsingar úr heilivágsskránni í pappírsformi.

KT-deildin í Apoteksverkinum umsitur heilivágsskránna. Mett verður, at arbeiðið við at umsita skráirnar krevur 2,5 ársverk.

Roknað verður við, at tað kostar 500.000 kr. árliga at umsita skipanina. Tá er starvsfólkakostnaður ikki íroknaður.

Mett verður, at skráirnar, ið Apoteksverkið varðar av, eru nær tengdar at virkseminum í Apoteksverkinum. Tí verður ikki mett ráðiligt at flyta hesar skráir til Fólkaheilsustýrið.

***Tilmæli***
*Mælt verður ikki til, at skráirnar hjá Apoteksverkinum flyta til Fólkaheilsustýrið. Í staðin fyri eigur samstarv at verða skipað ímillum Fólkaheilsustýrið og Apoteksverkið, um at fáa upplýsingar úr skráunum hjá Apoteksverkinum, serliga úr hagtalsskránni, førdar yvir í Landssjúklingaskránna.*

## Skráir, ið Landslæknin umsitur

Landslæknin umsitur skráirnar: „Dødsårsagsregisteret“, „Fødselsanmeldelsesregisteret“ og „Anmeldelse af smitsomme sygdomme“.

### *Dødsårsagsregisteret (DAR)*

Sundhedsdatastyrelsen savnar upplýsingar um øll andlát í eina skrá, sum kallast Dødsårsagsregisteret. Skráin verður m.a. brúkt í sambandi við gransking og greining, umframt at hava eftirlit við heilsuni hjá dønum.

Tá ein persónur doyr í Føroyum, ger lækni líksýn. Læknin útfyllir eina deyðsváttan, sum inniheldur upplýsingar um andlátið. Landslæknin fær allar deyðsváttanir. Síða 1 kemur frá kirkjuskrivstovunum/prestunum og síða 2 fær Landslæknin frá kommunulækna ella Landssjúkrahúsinum. Landslæknin samanber tær báðar síðurnar, fyri at tryggja sær, at hann móttekur allar deyðsváttanir. Landslæknin skrivar upplýsingarnar í eitt rokniark (Excel) og sendur upplýsingarnar til Sundhedsdatastyrelsen í mai mánað árið eftir. Eftir hetta eru dáturnar at finna í tí danska Dødsårsagsregisteret, har til ber at bíleggja útskrift. Arbeiðið gongur fyri seg leypandi og Landslæknin brúkar onkrar av hesum dátum til árligu heilsulýsingina.

Við deyða, skal deyðsváttan útfyllast og sendast til Landslæknan í pappírsformi. Landslæknin fráboðar móttiknu deyðsváttanirnar elektroniskt til Sundhedsdatastyrelsen, smb. Bekendtgørelse nr. 576/2019 for Færøerne om dødsattester.

Sambært „Lov nr. 225 af 31. maj 1968 om anmeldelse af fødsler og dødsfald, som sat i kraft ved kongelig anordning nr. 115 af 20. februar 1989“ og „Kunngerð nr. 76 frá 17. juli 1989 um fráboðan um føðing og andlát“, skal deyði fráboðast Fólkakirkjuni, soleiðis at andlát kann skrásetast í kirkjubøkurnar.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið í samstarvi við Landslæknan, fær til vega avrit av verandi upplýsingum um føroyingar í dødsårsagsregisteret, soleiðis at hesar upplýsingar verða goymdar í Fólkaheilsustýrinum. Hetta av teirri orsøk, at talan er um yvirskipaða heilsuskrá, ið fevnir um upplýsingar um allar føroyingar. Mælt verður til, at henda skrá í Fólkaheilsustýrinum javnan verður dagførd við upplýsingum um deyðsorsøkir.*

## Fødselsregisteret

Einar 3 til 4 ferðir um árið fær Landslæknin føðifráboðanirnar í pappírsformi frá sjúkrahúsunum. Upplýsingarnar verða skrivaðar inn í eitt rokniark (Excel ark). Vanliga er hetta arbeiðið liðugt umleið august – september árið eftir.

Kirkjuskrivstovurnar/sóknarprestarnir lata Landslæknanum síðu 1 av føðifráboðanini (hetta kann vera frá umleið einaferð um mánaðin til einaferð um ársfjórðingin). Føðifráboðanirnar frá kirkjuskrivstovunum/sóknarprestunum verða samanbornar við upplýsingarnar frá sjúkrahúsunum, har børn, sum t.d. eru fødd á Ríkissjúkrahúsinum og øðrum støðum uttanlands, eisini koma við í skrásetingina. Tøl frá rokniarkinum (Excel) hjá Landslæknanum er partur av hagtølunum í Heilsulýsing Landslæknans.

Sambært „Lov nr. 225 af 31. maj 1968 om anmeldelse af fødsler og dødsfald, som sat i kraft ved kongelig anordning nr. 115 af 20. februar 1989“ og „Kunngerð nr. 76 frá 17. juli 1989 um fráboðan um føðing og andlát“ skulu føðingar fráboðast Fólkakirkjuni, so føðingin kann skrásetast í kirkjubøkurnar. Føðingin verður skrivað í kirkjubókina í tí sókn, har móðirin býr.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið í samstarvi við Landslæknan, fær til vega avrit av verandi upplýsingum um føroyingar í fødselsregisteret, soleiðis at hesar upplýsingar verða goymdar í Fólkaheilsustýrinum. Hetta av teirri orsøk, at talan er um yvirskipaða heilsuskrá, ið fevnir um upplýsingar um allar føroyingar. Mælt verður til, at henda skrá í Fólkaheilsustýrinum javnan verður dagførd við upplýsingum um føðingar.*

## Smitsomme Sygdomme

Landslæknin fær fráboðan um eina røð av smittandi sjúkum, sambært ásetingum í epidemilógini (Anordning nr. 655 af 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme, sum seinast broytt við bekendtgørelse nr. 180 frá 5. mars 2020 og bekendtgørelse nr. 596/2014 for Færøerne om lægers anmeldelse af smitsomme sygdomme m.v.). Statens Seruminstitut hevur gjørt oyðublaðið (formular 1515). Læknin sendur forsíðuna til Statens Seruminstitut og Landslæknin fær eitt avrit.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið í samstarvi við Landslæknan, fær til vega avrit av verandi upplýsingum um føroyingar um smittandi sjúkur, soleiðis at hesar upplýsingar verða goymdar í Fólkaheilsustýrinum. Hetta av teirri orsøk, at talan er um yvirskipaða heilsuskrá, ið fevnir um upplýsingar um allar føroyingar. Mælt verður til, at henda skrá í Fólkaheilsustýrinum javnan verður dagførd við upplýsingum um smittandi sjúkur.*

## Danskar skráir

Fleiri danskar skráir hava týdning fyri føroyingar. Niðanfyri verða hesar skráir lýstar.

### *Landspatientregisteret*

Í Danmark er „Landspatientregisteret“ stovnsett. „Sundhedsdatastyrelsen“ stendur fyri og umsitur Landspatientsregistret. Í „Landspatientregisteret“ verða goymdar neyvar, strukturеraðar/skipaðar upplýsingar úr sjúklingajournalum um allar danir. Hesar upplýsingar eru til granskingarendamál, hagtøl og fyrisitingarligt virksemi. Í „Landspatientregisteret“ eru diagnosur, aktiónsdiagnosur, hjádiagnosur, kanningar, skurðviðgerðir og føðingar hjá øllum dønum.

Í 2019 fekk Sundhedsdatastyrelsen 3 mió. kr. til at dagføra KT at brúka til Landspatientregisteret. Grundgevingarnar á donsku fíggjarlógini vóru, at dagføringin skuldi nýtast sum dátugrundarlag undir fleiri av teimum nationalu heilsuskráunum, í sambandi við gransking innan heilsuøkið, til at ansa eftir sjúkum og viðgerðum, til at fylgja við virkseminum á teimum einstøku sjúkrahúsunum og til at gera upp samlaðu sjúkrahúsnýtsluna fyri regiónir og kommunur. Visiónin við ætlanini er, at heilsudáta skal dríva dygdarmenning og betran av heilsuverkinum, við at brúka heilsudáta til at máta úrslit og gagn av heilsuviðgerð og harvið skapa broytingar í viðgerðarpraksis, sum hækkar góðskuna og effektivitetin í heilsuverkinum.

Í Landspatientregisteret verða goymdar upplýsingar um føroyingar, ið eru viðgjørdir í danska heilsuverkinum. Frá føroyskari síðu hevur verið arbeitt við at fáa avrit av upplýsingum um føroyingar til Føroya úr Landspatientregisteret. Men enn er ikki komið á mál við at fáa upplýsingarnar til Føroya.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu, í samstarvi við danskar myndugleikar, at fáa avrit av teimum upplýsingum um føroyingar, ið eru goymdar í Landspatientregisteret, til Føroya. Mælt verður til, at hesar upplýsingar verða goymdar í Fólkaheilsustýrinum og verða partur av Landssjúklingaskránni.*

### *Vævsanvendelsesregisteret (Vevnaðarnýtsluskráin)*

Sambært § 29 í „Anordning nr. 821/2018 om ikrafttræden for Færøerne af sundhedsloven“, kunnu føroyingar skráseta seg í danska „Vævsanvendelsesregisteret“. Ein sjúklingur kann gera av, at lívfrøðiligt tilfar, sum sjúklingurin hevur latið í sambandi við viðgerð, bert kann nýtast til at viðgera viðkomandi sjúkling og til endamál, sum eru beinleiðis tengd at viðgerðini. Avgerðin hjá sjúklinginum verður skrásett í „Vævsanvendelsesregisteret“.

Sambært løgtingsmáli 87/2016 var ætlanin, at arbeiða fram ímóti at stovna eitt føroyskt „Vævsanvendelsesregister“, og at møguleiki er fyri hesum við orðingini í § 29 í kongligu fyriskipan. Í fyrstu atløgu verður tað tó møguligt hjá føroyskum sjúklingum at skráseta seg í danska „Vævsanvendelsesregisteret“. Føroyingar kunnu skráseta seg í „Vævsanvendelsesregisteret“ við at nýta eitt danskt CPR-nummar.

Støða er ikki tikin til, hvørt farast skal undir arbeiðið at menna eitt føroyskt „Vævsanvendelsesregister“.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at ein føroysk vevnaðarnýtsluskrá verður staðsett í Fólkaheilsustýrinum, um politisk støða verður tikin til at stovnseta føroyska skrá hesum viðvíkjandi.*



*Behandlingstestamenteregisteret (Viðgerðartestamentiskráin)*
Við løgtingsmáli 111/2020 verða ásetingar settar inn um „behandlingstestamenteregister“, í § 26 í kongligu fyriskipanini viðvíkjandi Sundhedsloven. Hesar ásetingar koma ístaðin fyri lívstestamenti, sum í dag er ásett í Sundhedsloven. Skipanin við lívstestamentum fór úr gildi 1. januar 2019, og sjúklingar kunnu tí ikki longur skráseta eitt lívstestamenti.

Munurin á viðgerðartestamenti og lívstestementi er, at eitt lívstestamenti bert er vegleiðandi fyri heilsustarvsfólk, ímeðan eitt viðgerðartestamenti er løgfrøðiliga bindandi. Við einum viðgerðartestamenti, kann sjúklingurin tryggja sær, at læknarnir fylgja ynskjunum hjá sjúklinginum um viðgerð, um sjúklingurin ein dag ikki sjálvur er førur fyri at siga frá. Í einum viðgerðartestamenti, kann ein sjúklingur t.d. velja lívsleingjandi viðgerð frá, herundir uppafturveking eftir hjartasteðg. Hetta er tó bert galdandi í ávísum førum, sum t.d. tá ið sjúklingurin liggur fyri deyðanum, og viðgerðin bert kann leingja lív, men ikki viðførir, at sjúklingurin fær tað betri, ella at pínan linnar. Í einum viðgerðartestamenti kann sjúklingurin eisini velja frá at tvingsul verður nýttur, tann dag tá hann ikki longur er førur fyri at taka sær av sær sjálvum, t.d. um sjúklingurin er vorðin dementur. Eisini er møguligt at taka avgerð um, at avvarðandi skulu hava síðsta orðið at siga, tá avgerð verður tikin um at velja viðgerð frá.

Í fyrstu atløgu verður tað møguligt hjá føroyskum sjúklingum at skráseta seg í danska „Behandlingstestamenteregisteret“. Føroyingar kunnu skráseta seg í „Behandlingstestamente-registeret“ við at nýta eitt danskt CPR-nummar.

Støða er ikki tikin til, hvørt arbeiðast skal fram ímóti at menna eitt føroyskt „Behandlings-testamenteregister“.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at ein føroysk viðgerðartestamentiskrá verður staðsett í Fólkaheilsu-stýrinum, um politisk støða verður tikin til at stovnseta føroyska skrá hesum viðvíkjandi.*

## *Utilsigtede hændelser (Ótilætlaðar hendingar)*

Sambært § 198 í „Anordning nr. 821/2018 om ikrafttræden for Færøerne af sundhedsloven“, er heimild at stovnseta skipan við ótilætlaðum hendingum í Føroyum. Fyri at betra um sjúklingatrygdina, eru reglur ásettar um fráboðan av ótilætlaðum hendingum ella „utilsigtede hændelser“. Ein ótilætlað hending, er ein hending undir viðgerð ella undir uppihaldi á viðgerðarstovni, har ikki alt gongur sum ætlað og har ein sjúklingur kemur til skaða, ella hevur verið í vanda fyri at koma til skaða, orsakað av ótilætlaðu hendingini. Skipanin við ótilætlaðum hendingum, skal vera galdandi innan heilsuverkið ella aðrastaðni, har heilsustarvsfólk starvast. Við at boða frá og viðgera ótilætlaðar hendingar, kann heilsuverkið eftirmeta sína viðgerð og fáa møguleika fyri at betra um sjúklingatrygdina.

Sambært § 199 í „Anordning nr. 821/2018 om ikrafttræden for Færøerne af sundhedsloven“, fær Landslæknin, fráboðanir um ótilætlaðar hendingar frá heilsuverkinum. Landslæknin greinar hendingarnar og samskiftir við heilsuverkið um ótilætlaðu hendingarnar.

Sambært almennu viðmerkingunum í ríkislógartilmælinum (løgtingsmál 87/2016) var ætlanin, at Landslæknin, skuldi hava ábyrgd av at stovna og byggja upp eina skipan við ótilætlaðum hendingum í Føroyum. Eftir at lógin varð samtykt, hevur verið umrøtt, hvørt føroyska heilsuverkið skal vera partur av donsku skipanini við ótilætlaðum hendingum, undir Styrelsen for Patientsikkerhed, ella um Føroyar skal tilevna sína egnu skipan við ótilætlaðum hendingum. Í løtuni er ein skipan við ótilætlaðum hendingum sett í verk í Sjúkrahúsverkinum, men skipanin er ikki ment soleiðis, at hon fevnir um alt heilsuverkið.

Av tí, at lógarverkið er danskt; at Landslæknin sambært lógini skal móttaka fráboðanir um ótilætlaðar hendingar og, av tí, at tað sambært viðmerkingum til ríkislógartilmælið var ætlanin, at Landslæknin skuldi byggja upp skipanina, verður mett, at Landslæknin hevur ábyrgd av at uppbyggja hesa skipan.

Um so er, at lógin verður broytt, kann tað koma uppá tal, at áseta, at Fólkaheilsustýrið skal hava hesa uppgávu. Til hetta krevst tó, at politisk undirtøka er fyri, at Fólkaheilsustýrið skal hava uppgávuna at menna og uppbyggja eina skipan við ótilætlaðum hendingum, og at peningur verður játtaður til endamálið á løgtingsins fíggjarlóg.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at skipanin um ótilætlaðar hendingar í heilsuverkinum verður staðsett í Fólkaheilsustýrinum, um politisk støða verður tikin til at stovnseta føroyska skipan hesum viðvíkjandi.*

## *Aðrar skráir uttanlands*

Fleiri føroyskir borgarar eru skrásettir í donskum kliniskum dátugrunnum. Í løtuni eru 79 kliniskir dátugrunnar skrásettir í Danmark, har føroyskir borgarar kunna vera skrásettir í, serliga í sambandi við sjúkuviðgerð uttanlands.

Dátugrunnarnir eru:

Ablation.dk – Klinisk Database; ADHD Databasen; Akut kirurgidatabasen; Atrieflimren i Danmark; DANARREST – Registrering af hjertestop på hospital; Dansk Anæstesi Database; Dansk Apopleksiregister; Dansk Blære Cancer Database; Dansk Børnecancer Register; Dansk Depressionsdatabase; Dansk EsophagoGastrisk Cancer Gruppe database; Dansk Fedmekirurgiregister; Dansk Føtalmedicinsk Database (FØTO); Dansk Gynækologisk Cancer Database; Dansk Herniedatabase; Dansk HIV Database; Dansk Hjerteregister; Dansk Hjerterehabiliteringsdatabase; Dansk Hjertestopregister; Dansk Hjertesvigtdatabase; Dansk Hoftealloplastik Register; Dansk Hovedtraume Database; Dansk Hysterektomi og Hysteroskopi Database; Dansk Intensiv Database; Dansk Klinisk Kvalitetsdatabase for Demens (DanDem); Dansk Knæalloplastik Register; Dansk Kolorektal Cancer Database (DCCG); Dansk Korsbånds Rekonstruktions Register; Dansk Kvalitetsdatabase for Fødsler; Dansk Kvalitetsdatabase for Livmoderhalskræftscreening; Dansk Kvalitetsdatabase for Mammografiscreening; Dansk Kvalitetsdatabase for Nyfødte; Dansk Lever- og Galdevejscancer Databasen; Dansk Lunge Cancer Register; Dansk Melanom Database; Dansk Nefrologisk Selskabs Landsregister; Dansk Neuro Onkologisk Register; Dansk Pacemaker og ICD Register; Dansk Palliativ Database (DPD); Dansk Pancreas Cancer Database; Dansk Prostata Cancer Database; Dansk Register for Akut Koronart Syndrom; Dansk register for Astma (Drastma); Dansk Register for Børne- og Ungdomsdiabetes; Dansk register for Kronisk Obstruktiv Lungesygdom; Dansk Renal Cancer database; Dansk Retspsykiatrisk Database; Dansk Reumatologisk Database; Dansk Rygdatabase; Dansk Sarkom Database; Dansk Skulderalloplastik Register; Dansk Tarmscreeningsdatabase; Dansk Testis Cancer database; Dansk Transfusionsdatabase; Dansk Traumeregister; Dansk Tværfagligt Register for Hoftenære Lårbensbrud; Dansk Urogynækologisk Database; Dansk Voksen Diabetes Databasen; Databasen for Akutte Hospitalskontakter; Databasen for COVID-19 senfølger; Databasen for Familiær Hyperkolesterolæmi; Databasen for Inflammatoriske Tarmsygdomme; DBCG Kvalitetsdatabase for Brystkræft; Den Hæmatologiske Fællesdatabase; Den landsdækkende klinisk kvalitetsdatabase for screening af diabetisk retinopati og maculopati; Den Nationale Skizofrenidatabase; Hudkræftdatabasen; Landsdækkende klinisk database for kontaktallergi; Landsdækkende klinisk kvalitetsdatabase for opfølgningsprogrammet for Cerebral Parese; Landsdækkende kvalitetsdatabase for personer med rygmarvskade; Landsregisteret Karbase; Organdonationsdatabasen; Præhospitalsdatabasen; RareDis – Database for sjældne sygdomme; Sclerosebehandlingsregistret; The Danish Head and Neck Cancer Group (DAHANCA); Thyroideadatabasen; Tidlig Graviditet og Abort Kvalitetsdatabase; Tumorer i øjne.

Upplýsingar úr hesum dátugrunnum eiga at verða fingnar til Føroyar, tí so fer at bera til at betra munandi um hagtalsgrundarlagið á hesum økjum í Føroyum.

## *Misdannelsesregisteret*

Í Misdannelsesregisteret eru upplýsingar um, hvussu ofta viðfødd lýti og seinar spontanar fosturtøkur koma fyri. Sundhedsstyrelsen ger hagtøl á økinum so hvørt. Harumframt verður skráin nýtt til medisinska gransking.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at skjøtul verður settur á arbeiðið at fáa upplýsingar um føroyingar í omanfyrinevndu skáum uttanlands til Føroya. Upplýsingarnar eiga at verða varðveittar í skrá undir Fólkaheilsustýrinum. T.d. kundu upplýsingar um føroyingar í Misdannelsesregisteret og øðrum skráum uttanlands, møguliga verið partur av upplýsingunum í Landssjúklingaskránni.*

## Nýggjar skráir í Fólkaheilsustýrinum

Umrøtt hevur verið, at tørvur er á eini Landssjúklingaskrá og eini borgaravenda skrá, líknandi skráunum: sundhed.dk ella helse.no. Harumframt hevur verið umrøtt, at tørvur er á eini bíðilistaskrá innan Sjúkrahúsverkið.

### *Landssjúklingaskrá:*

Tørvur er á at menna eina Landssjúklingaskrá. Henda skrá er eitt týdningarmikið grundarlag undir tí heilsufakligu ráðgevingini og teimum tilmælum, ið Fólkaheilsustýrið fer at veita landsstýrisfólkum og kommunum. Landssjúklingaskráin er eisini neyðug, so granskarar í Føroyum kunnu hava eitt haldgott undirstøðukervi at granska í.

Sum umrøtt omanfyri, verða, í „Landspatientregisteret“ í Danmark, goymdar neyvar, strukturerаðar/skipaðar upplýsingar úr sjúklingajournalum um allar danir. Hesar upplýsingar eru til granskingarendamál, hagtøl og fyrisitingarligt virksemi. Í „Landspatientregisteret“ finnast diagnosur, aktiónsdiagnosur, hjádiagnosur, kanningar, skurðviðgerðir og føðingar hjá øllum dønum.

Mett verður, at neyðugt er at stovnseta eina Landssjúklingaskrá við diagnosum v.m. hjá øllum føroyingum, líknandi „Landspatientregisteret“ í Danmark.

Sum umrøtt omanfyri, er eisini neyðugt at fáa heilsuupplýsingar um føroyingar, sum liggja í „Landspatientregisteret“, til Føroya. Hesar upplýsingar, ella avrit av hesum upplýsingum, kunnu verða goymdar í Landssjúklingaskránni.

Í Føroyum vóru skrásetingar gjørdar í einari Landssjúklingaskrá, fram til 2009, tá ið hildið varð uppat at skráseta í skipanina. Møguleiki er at hyggja uppá hesa skipan aftur og meta um, hvørt tað ber til at víðka hesa skipan til eina dagførda Landssjúklingaskrá.

Áðrenn ein Landssjúklingaskrá kann verða stovnsett, má kannast, hvørjar heilsuupplýsingar skulu vera í skránni, hvussu skipanin kann setast á stovn, lýsa møguleikarnar fyri at fáa heilsuupplýsingar frá føroyingum, ið eru goymdar á skráum uttanlands, til Føroya; lýsa hvørjar upplýsingar um føroyingar eru í sjúklingaskráum í ávísum londum, gera eina kostnaðarmeting fyri at stovnseta sjúklingaskránna.

Tær upplýsingar, ið skulu skrásetast í Landssjúklingaskránna, skulu fáast til vega, m.a. úr Cosmic, umframt øðrum skráum í Føroyum og uttanlands. Neyðugt verður at skipa eitt tætt samstarv ímillum tey, ið varða av Cosmic, og tey ið byggja upp Landssjúklingaskránna, soleiðis at neyðuga tilfarið kann skrásetast í Landssjúklingaskránni.

Tað eigur at verða uppgávan hjá Fólkaheilsustýrinum at standa fyri verkætlanini at menna eina Landssjúklingaskrá. Talan verður um eina verkætlan, ið kemur at taka fleiri ár

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at standa fyri verkætlanini at uppbyggja og menna eina føroyska Landssjúklingaskrá. Mælt verður til, at Landssjúklingaskráin verður staðsett í Fólkaheilsustýrinum, og at upplýsingarnar í hesi skrá verða fingnar til vega úr teimum skráum, ið longu eru í Føroyum, umframt úr danska „Landspatientregisteret“.*

## *Borgaravend skrá: Heilsuportal.fo*

Tørvur er á at menna eina borgaravenda skrá, ella eina heimasíðu, har borgarin kann fara inn og síggja allar sínar heilsuupplýsingar, umframt kunning um heilsuviðurskifti sum heild. Endamálið er, at gera heilsuupplýsingar lættari atkomuligar hjá borgaranum og geva borgaranum størri innlit í síni heilsuviðurskifti og spurningar um heilsu sum heild. Hugsað verður her um líknandi skipan, sum www.sundhed.dk ella www.helse.no.

Í sambandi við arbeiðið við hesi ætlan hevur Sjúkrahúsverkið kunnað um, at Sjúkrahúsverkið er farið í holt við at menna eina skipan saman við Talgildu Føroyum, har møguligt verður hjá føroyingum at síggja sínar egnu heilsuupplýsingar talgilt umvegis Vangan. Mett verður, at tað er neyðugt at menna ein slíkan talgildan heilsuportal í Føroyum. Í hesum arbeiði verður støða tó ikki tikin til, hvørt ein talgildur heilsuportalur skal staðsetast í Sjúkrahúsverkinum ella í Fólkaheilsustýrinum.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at ein borgaravend skrá: heilsuportal.fo verður ment, sum frálíður. Mælt verður til, at hesin heilsuportalur verður staðsettur antin í Sjúkrahúsverkinum ella í Fólkaheilsustýrinum.*

## *Bíðilistaskrá*

Í Sjúkrahúsverkinum manglar ein bíðilistaskrá. Endamálið við eini bíðilistaskrá er at veita bæði teimum, sum skipa fyri og leiða heilsuverkið og brúkarum tess, neyva vitan um hvussu leingi bíðitíðin er til útgreiningar og viðgerðir.

Ein slík skrá eigur at innihalda: Ávísingardiagnosu; tíð frá ávísingardegi til visitering; tíð frá ávísingardegi til 1. viðtalu hjá viðkomandi serlækna; tíð frá ávísingardegi til sjúkuavgerð; tíð frá sjúkuavgerð til viðgerð er framd. Skráin skal eisini innihalda, hvar í sjúkrahúsverkinum sjúkuavgerð og viðgerð fer fram.

Starvsfólk, sum skulu gera hesa skrá, skulu hava neyva vitan um diagnosugongdir og viðgerðargongdir. Mett starvsfólkaorka er 0,25 lækni og 0,5 heilsurøktarfrøðingur, 0.25 KT-fólk. Mettur kostnaður uml. 0,8 mill.

Av tí, at ein slík skrá er tengd at virkseminum í Sjúkrahúsverkinum, verður hildið, at tað er rættast, at hon verður skipað í Sjúkrahúsverkinum og ikki í Fólkaheilsustýrinum.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at ein bíðilistaskrá verður staðsett og ment innan Sjúkrahúsverkið.*

## Niðurstøða um heilsuskráir

Í omanfyristandandi teksti verður lýst, hvørjar heilsuskráir eru í Føroyum, og hvørjum donskum skráum Føroyar eru í.

Um Fólkaheilsustýrið skal gera tilmælir til politiska myndugleikan um at gera ætlanir innan heilsuverkið; veita heilsufakliga ráðgeving; hava um hendi fólkaheilsuarbeiðið; gera vegleiðingar til heilsuverkið; veita heilsukunning til borgarar og almenning; standa fyri yvirskipaðari dygdarmenning innan heilsuverkið v.m., er neyðugt, at viðkomandi skráir í Føroyum verða staðsettar í Fólkaheilsustýrinum.

Mett verður ikki, at tað tænir endamálinum at skipa allar tær omanfyristandandi skráirnar í Fólkaheilsustýrinum. Mett verður heldur, at arbeitt eigur at verða fram ímóti, at yvirskipaðu skráirnar verða staðsettar í Fólkaheilsustýrinum.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at Ílegusavnið við sínum skráum: Diagnosuskráin, Ættarbandsskráin og Vevnaðarskráin, verða fluttar til Fólkaheilsustýrið at umsita.*

*Mælt verður til, at tann parturin av FarGen verkætlanini, sum inniber gransking, verður staðsettur í tí heilsugranskingareindini, ið verður skipað í sambandi við hetta arbeiði. Mælt verður til, at sjálvt undirstøðukervið verður verandi í Vevnaðarskránni, sum verður staðsett undir Fólkaheilsustýrinum. Dáturnar í undirstøðukervinum kunnu síðani verða nýttar til at menna skipanina við persónlagaðum medisini fyri allar føroyingar.*

*Mælt verður til, at Krabbameinsskrásetingin innan Sjúkrahúsverkið verður flutt til Fólkaheilsustýrið at umsita.*

*Mælt verður til at arbeiðið við heilsuskráum í Fólkaheilsustýrinum verður uppraðfest og styrkt komandi árini. Hetta fyri, at Fólkaheilsustýrið kann fáa haldgott grundarlag til at veita heilsufakliga ráðgeving og gera tilmælir um ráðlegging innan heilsuverkið v.m.*

*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at standa fyri verkætlanini at uppbyggja og menna eina føroyska Landssjúklingaskrá. Mælt verður til, at Landssjúklingaskráin verður staðsett í Fólkaheilsustýrinum, og at upplýsingarnar í hesi skrá verða fingnar til vega úr teimum skráum, ið longu eru í Føroyum, umframt úr danska „Landspatientregisteret“.*

*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu, í samstarvi við danskar myndugleikar, at fáa avrit av teimum upplýsingum um føroyingar, ið eru goymdar í Landspatientregisteret, til Føroya. Mælt verður til, at hesar upplýsingar verða goymdar í Fólkaheilsustýrinum og verða partur av Landssjúklingaskránni.*

*Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið í samstarvi við Landslæknan, fær til vega avrit av verandi upplýsingum um føroyingar í dødsårsagsregister, fødselsregister og register om smitsomme sygdomme, soleiðis at hesar upplýsingar verða goymdar í Fólkaheilsustýrinum. Hetta av teirri orsøk, at talan er um yvirskipaðar heilsuskráir, ið fevna um upplýsingar um allar føroyingar. Mælt verður til, at hesar skráir í Fólkaheilsustýrinum javnan verða dagførdar við upplýsingum um deyðsorsøkir, føðing og smittandi sjúkur.*

*Mælt verður til, at skjøtul verður settur á arbeiðið at fáa upplýsingar um føroyingar í øðrum skráum uttanlands til Føroya. Upplýsingarnar eiga at verða varðveittar í skrá undir Fólkaheilsustýrinum. T.d. kundu upplýsingar um føroyingar í Misdannelsesregisteret*

*og øðrum skráum uttanlands, møguliga verið partur av upplýsingunum í Landssjúklingaskránni.*

*Viðvíkjandi pappírsjournalunum hjá Gigni og kommunulæknum, sum eru staðsettar í Heilsutrygd, verður mælt til, at arbeiðið verður sett í verk at fáa tilfarið í hesum journalum skrásett talgilt, so at upplýsingar frá hesum skráum kunnu verða skrásettar í Landssjúklingaskránni.*

*Mælt verður ikki til, at elektroniska sjúklingajournalin hjá heilsuverkinum, Cosmic, umframt skipanir og skráir hjá Heilsutrygd og Apoteksverkinum verða fluttar til Fólkaheilsustýrið. Hetta av tí, at sjúklingajournalin, Cosmic, er høvuðsarbeiðsamboðið hjá Sjúkrahúsverkinum, eitt amboð, sum teimum tørvar í dagliga arbeiðinum. Somuleiðis eru skráirnar hjá Heilsutrygd og Apoteksverkinum arbeiðsamboð hjá stovnunum. Mælt verður til, at samstarv verður ímillum Fólkaheilsustýrið og Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd og Apoteksverkið um at fáa neyðugar upplýsingar úr skráunum í Landssjúklingaskránna. Mælt verður til, at ein bíðilistaskrá verður staðsett og ment innan Sjúkrahúsverkið.*

*Mælt verður til, at ein borgaravend skrá: heilsuportal.fo verður ment, sum frálíður. Mælt verður til, at hesin heilsuportalur verður staðsettur antin í Sjúkrahúsverkinum ella í Fólkaheilsustýrinum.*

*Mælt verður til, at ein føroysk vevnaðarnýtsluskrá, ein viðgerðartestamentiskrá og skipan um ótilætlaðar hendingar í heilsuverkinum, verður staðsett í Fólkaheilsustýrinum, um politisk støða verður tikin til at stovnseta føroyska skrá ella skipan hesum viðvíkjandi.*

### 5.4.3. HEILSUGRANSKING

Í arbeiðinum hevur verið drúgv umrøða av, í hvønn mun heilsugransking eigur at vera partur av Fólkaheilsustýrinum, og í hvønn mun heilsugransking eigur at vera partur av Fróðskaparsetrinum, Sjúkrahúsverkinum ella aðrari eind.

Tá ið heilsugransking verður umrødd, er neyðugt at skilja ímillum heilsugransking og ílegugransking. Heilsugransking er eitt breitt hugtak, ið fevnir um m.a. gransking í menniskjum, menniskjaligum kynskyknum, vevnaði ella líknandi. Heilsugransking fevnir sostatt eisini um ílegugransking, men ílegugransking fevnir bert um gransking í mannaílegum, sum er tengd at ættartræi. Av tí, at tað í hesari ætlan verður mælt til, at Ílegusavnið verður skipað undir Fólkaheilsustýrinum, verður mett, at tað er neyðugt at hava eitt serstakt brot um ílegugransking undir lýsingini um heilsugransking. Brotið um ílegugransking er at enda í 5.4.3.

#### Heilsugransking í dag

Í løtuni fer heilsuvísindalig gransking fram í Sjúkrahúsverkinum, á Ílegusavninum, í Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, í Fólkaheilsuráðnum og á Fróðskaparsetur Føroya. Í 2016 varð Depilin fyri Heilsu- og Almannagransking settur á stovn. Depilin hevur til endamáls at menna heilsuvísindaliga gransking í samstarvið millum viðkomandi partar, sum greitt frá í kapitli 3.

Niðanfyri verður greitt frá, hvar heilsugranskarar í Føroyum eru settir í starv og hvar teir eru staðsettir.



Á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi á Fróðskaparsetrinum starvast: Ein dekanur, ið eisini er prorektari fyri gransking, professari og ph.d.; tríggir ph.d., lektarar og fýra ph.d., adjunktar. Harumframt eru 8 ph.d. lesandi innan heilsugransking í løtuni á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi, umframt at 5 ph.d. verkætlanir innan heilsugransking byrja á deildini í 2022. Sum adjungeraði starvsfólk á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi starvast: tríggir yvirlæknar, ið eru professarar; ein yvirlækni, ið er lektari og tveir professarar. Umframt hetta verður eisini granska í heilsu og trivnaði á øðrum deildum á Fróðskaparsetrinum. Tveir ph.d., professarar og ein ph.d., lektari, eru í starvi á Náttúruvísindadeildini; umframt eitt starvsfólk á Námsvísindadeildini.

Á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, starvast ein granskari/yvirlækni í fullum starvi. Afturat sær hevur hann ein fíggjarleiðara, ein skrivara og reingerðarfólk í føstum starvi. Á deildini eru harumframt fýra granskarar/ph.d. (tann eini 10% av tíðini), trý granskingar-hjálparfólk í verkætlanum á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og tvey ph.d. lesandi, umframt ein, ið fer í holt við ph.d. eftir barnsburðarfarloyvi. Eisini eru tríggir granskarar/ph.d., ein sálarfrøðingur og tveir læknar tilknýttir deildini. Verkætlanirnar eru ikki fíggjaðar á fíggjarlógini, men verða fíggjaðar av almennum og privatum grunnum. Harumframt eru tveir granskarar, ið eru í fullum starvi á Fróðskaparsetrinum og ein ph.d. lesandi á Fróðskaparsetrinum, staðsettir á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu.

Á Ílegusavninum starvast 2 starvsfólk í føstum starvi. Umframt hetta er FarGen verkætlanin knýtt at Ílegusavninum. Í henni starvast tveir ph.d. og ein laboratoriusamskipari. FarGen verkætlanin er fíggjað á fíggjarlógini. Ein ph.d. lesandi á Fróðskaparsetrinum er knýttur at FarGen verkætlanini. Annars eru verkætlanir í gongd við heimild í ílegulógini. Verkætlanirnar eru ikki fíggjaðar á fíggjarlógini, men verða fíggjaðar av almennum og privatum grunnum. Hesi eru staðsett í Granskingarlonini: tvey ph.d. lesandi av Fróðskaparsetrinum, ein ph.d. lesandi av Ålborg Universitet og eitt granskingarhjálparfólk. Harumframt er ein ph.d. lesandi á Fróðskaparsetrinum/Københavns Universitet og ein ph.d. lesandi á Fróðskaparsetrinum/Århus Universitet, og tvey starvsfólk/granskarar hjá Fólkaheilsuráðnum staðsett í Granskingarlonini. Fleiri granskarar eru staðsettir aðrastaðni enn á Ílegusavninum, men eru tilknýttir Ílegusavninum, við tað, at verkætlanir teirra hava heimild í Ílegulógini. Talan er um 11 granskarar, 2 ph.d. lesandi á Fróðskaparsetrinum/universiteti uttanlands.

Á Landssjúkrahúsinum eru m.a. hesir granskarar: Tríggir ph.d. og yvirlæknar, umframt tveir yvirlæknar og 4 aðrir granskarar, harav ein er ph.d.

## Skipan av heilsugranskingini í Føroyum

Heilsugranskingin er í stórari menning í Føroyum. Serfrøðingabólkurin er á einum máli um, at tað er sera týdningarmikið, at heilsugranskingin ikki fer fyri bakka í hesum arbeiðinum. Samskipanarbólkurin er samdur við serfrøðingabólkinum í hesum, og drúgv umrøða hevur tí verið við serfrøðingabólkin, um hvussu tann óhefta heilsugranskingin í Føroyum eigur at skipast framyvir. Heilsugransking gongur sum áður sagt fyri seg á teimum stovnunum, sum eru nevndir omanfyri. Øll heilsugransking er inntøkufíggjað, tvs. fíggjað úr almennum ella privatum grunnum o.l. Tó hava lektarar/professarar á Fróðskaparsetrinum 50% granskingartíð, sum ger, at teirra løn er tryggjað til granskingarverkætlanir. Men útreiðslur til sjálvar granskingarverkætlanirnar verða fíggjaðar úr almennum ella privatum grunnum. ph.d. verkætlanir eru í gongd á øllum stovnunum, sum fremja heilsugransking, og flestu teirra eru innskriva á Fróðskaparsetrinum, meðan onnur eru innskriva bæði á Fróðskaparsetrinum og útlendskum universitetum.

Talan er um nógvar granskarar, ið starvast í verkætlanum innan heilsugransking. Um allir teir omanfyrinevndu granskararnir skulu hoyra til Fólkaheilsustýrið, verður meira at kalla talan um ein heilsugranskingarstovn. Ætlanin við Fólkaheilsustýrinum er ikki at seta á stovn ein heilsugranskingarstovn. Ætlanin er at skipa eitt stýri, ið veitir ráðgeving og vegleiðing til landsstýrið og kommunur á heilsuøkinum, uppbyggir heilsuskráir og hagtøl v.m. Mett verður tí ikki, at tað ber til at flyta alla heilsugransking í Føroyum inn undir Fólkaheilsustýrið.

Harumframt eigur heilsuvísindalig gransking at vera óheft og ikki tengd at, hvat politiski myndugleikin ynskir. Heilsugranskingin skal ikki verða stýrd, hvørki av almennum ella privatum áhugapørtum.

Í løtuni eru omanfyrinevndu heilsugranskarar staðsettir á Fróðskaparsetur Føroya, í Granskingarlonini hjá Ílegusavninum, á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og innan Sjúkrahúsverkið. Avbjóðingin hesum viðvíkjandi er, at um stutta tíð skal Granskingarlonin niðurleggjast, Fróðskaparsetrið ikki hevur nokk av plássi at hýsa teimum í løtuni, og Campusið á Fróðskaparsetrinum, har ætlanin var, at heilsugranskarar skuldu staðsetast, ikki er bygt enn.

Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu viðmerkir, at um gransking ikki skal vera partur av Fólkaheilsustýrinum, er ein onnur avbjóðing í mun til granskingarpartin av Deildini fyri Arbeiðs-og Almannaheilsu. Greiða má fáast á, hvar granskingarparturin, t.v.s. verandi verkætlanir og granskingarstarvsfólk á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu skulu fara, og hvussu verandi og planlagdar verkætlanir kunnu halda fram, um granskarar á Deildin

fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu skulu flyta úr Sigmundargøtu og infrakervið harvið verður tikið burtur, t.d. klinikk at taka móti fólki, laboratoriuhentleikar, frystarakapasitetur til blóðroyndir og KT-kervið, sum hýsir dáta. Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu vísir á, at greiða má fáast á hesum, áðrenn Fólkaheilsustýri verður ein veruleiki við Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu sum einum parti. Annars fær tað vanlukkuligar avleiðingar fyri stóran part av fyrrverandi og núverandi heilsugransking, sum gongur fyri seg á Deildini fyri Arbeiðs-og Almannaheilsu.

Ein onnur avbjóðing er, at føroyska Sjúkrahúsverkið ikki enn er góðkent sum universitets-sjúkrahús. Í serfrøðingabólkinum hevur verið ført fram, at onnur smærri sjúkrahús í Danmark eru vorðin góðkend sum universitetssjúkrahús. Serfrøðingabólkurin er á einum máli um, at arbeiðast skal fram ímóti, at Sjúkrahúsverkið verður góðkent sum universitetssjúkrahús.

Í serfrøðingabólkinum hevur verið umrøtt, at um heilsugranskingin í Føroyum varð staðsett sama stað, í sama bygningi, hevði borið til at fingið eitt granskingarumhvørvi, har granskarar høvdu møguleika til at sparra saman, deilt vitan og royndir, og á tann hátt fingið eina sínamillum synergieffekt. Á henda hátt hevði borið til at fingið lyft heilsugranskingina í Føroyum upp á eitt hægri støði, enn hon er í dag.

Um heilsugranskingin varð staðsett á leið sama stað, sum Fólkaheilsustýrið, hevði eisini borið til at fingið eina synergieffekt ímillum heilsugranskingina og Fólkaheilsustýrið.

Umrøtt hevur verið, hvar óhefta heilsugranskingin í Føroyum skuldi verið staðsett, um hon skuldi verið savna á einum stað. Eitt uppskot frá serfrøðingabólkinum er at staðseta heilsugranskingina sum eina deild í Sjúkrahúsverkinum, t.d. í niðurløgdu psykiatrisku deild omanfyri vegin á Landssjúkrahúsinum. Tá ið talan er um kliniska gransking, er undir øllum umstøðum neyðugt at henda gransking er staðsett í Sjúkrahúsverkinum við atgongd til klinikk og biobanka. Hetta uppskot krevur umrøðu við Sjúkrahúsverkið.

Serfrøðingabólkurin er samdur um, at um heilsugranskararnir flyta í eina granskingardeild undir Sjúkrahúsverkinum, eigur at verða arbeitt fram ímóti, at Sjúkrahúsverkið verður góðkent sum universitetssjúkrahús. Serfrøðingabólkurin hevur ført fram, at tað ber væl til at skipa Sjúkrahúsverkið í Føroyum sum universitetssjúkrahús, tí smærri sjúkrahús í Danmark eru vorðin góðkend sum universitetssjúkrahús. Tey, sum hava luttikið í tilgongdini við hesi ætlan taka undir við uppskotinum hjá serfrøðingabólkinum.

Tey, sum hava luttikið í hesum arbeiðinum, eru samd við serfrøðingabólkinum í, at tað hevði verið heilsugranskingini í Føroyum at frama, at savna heilsugranskingina í sama stað, t.d. sum ein deild í Sjúkrahúsverkinum, og at tað í hesum sambandi eigur at arbeiðast fram ímóti, at Sjúkrahúsverkið verður góðkent sum universitetssjúkrahús.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at arbeitt verður fram ímóti at staðseta heilsugranskingina í Føroyum samlað á einum stað, helst innan Sjúkrahúsverkið, nær økinum, har Fólkaheilsustýrið er staðsett. Hetta soleiðis, at Fólkaheilsustýrið og heilsugranskingin kunnu fáa ágóðan hvør av øðrum. Mett verður tó ikki, at heilsugranskingin í síni heild skal verða partur av Fólkaheilsustýrinum.*

*Mælt verður samstundis til, at arbeitt verður fram ímóti at Sjúkrahúsverkið verður góðkent sum universitetssjúkrahús, og at ein langtíðarætlan fyri heilsugransking í Føroyum verður gjørd.*

Í arbeiðinum at tilevna Ætlan um Fólkaheilsustýrið eru øll á einum máli um, at heilsugranskingin í Føroyum er í stórari menning og tað er sera týdningarmikið, at heilsugranskingin ikki fer fyri bakka við hesum arbeiðinum. Mælt verður tí til, at tey praktisku viðurskiftini viðvíkjandi bæði Fólkaheilsustýrinum og omanfyrinevndu heilsugranskingini eru komin uppá pláss áðrenn 1. januar 2022, tá ið Fólkaheilsustýrið eftir ætlan skal setast á stovn.

## Í hvønn mun kann heilsugransking vera partur av Fólkaheilsustýrinum

Um Fólkaheilsustýrið skal kunna gera tilmælir til politiska myndugleikan um ráðlegging innan heilsuøkið og veita heilsufakliga ráðgeving til politiska myndugleikan og heilsustarvsfólki, er neyðugt, at tey starvsfólk, ið starvast í Fólkaheilsustýrinum, hava høga fakliga vitan innan viðkomandi økið m.a. heilsuøkið. Tey, sum hava luttikið í tilgongdini at orða hesa ætlan leggja stóran dent á, at tað er týdningarmikið, at starvsfólkini í Fólkaheilsustýrinum eru vælskikkað, hava neyðugar fakligar førleikar og viðkomandi starvsroyndir til at røkja tær uppgávur, sum verða lagdar til Fólkaheilsustýrið. Vælskikkað starvsfólk eru ein fortreyt fyri, at Fólkaheilsustýrið kann røkja sínar uppgávur á einum høgum fakligum støði og kann veita dygdargóða heilsufakliga ráðgeving til bæði landsmyndugleikar, kommunalar myndugleikar, heilsustarvsfólk og almenningin.

Ein fyrimunur við at hava heilsugransking í Fólkaheilsustýrinum er, at fleiri vælskikkað fólk, við vitan og drúgvum royndum innan heilsuverkið, koma at starvast í Fólkaheilsustýrinum. Tey starvsfólk, sum starvast í Fólkaheilsustýrinum, kunnu leita sær ráð og vegleiðing hjá heilsugranskarunum um ymisk evni, soleiðis at hesi saman kunnu lyfta stovnin uppá eitt hægri heilsufakligt støði. Hetta kann geva stovninum ta virðing og fakligu tyngd, ið stovnurin hevur tørv á. Tað hevði eisini borið munandi betri til at gagnnýtt granskingarvitanina innan heilsu í Føroyum til ráðgeving og vegleiðing, um heilsugransking varð partur av Fólkaheilsustýrinum.

Munur er á óheftari heilsugransking og so heilsugransking, ið verður framd við tí endamálið at ráðgeva politiska myndugleikanum. Í Danmark verður heilsugransking, ið hevur til endamáls at ráðgeva politiska myndugleikanum, kallað: „forskningsbaseret myndighedsbetjening“. Sundhedsministeriet hevur gjørt eina avtalu við Statens Institut for Folkesundhed, sum hevur við sær, at Statens Institut for Folkesundhed bindur seg til at granska í og veita ráðgeving innan ávís økir á heilsuøkinum. Í løtuni granska tey í heilsuatburði hjá fólkinum, heilsustøu, sjúku, deyða og heilsuátøkum í kommunum og regiónum. Avtalan bindur eisini Statens Institut for Folkesundheds til at monitorera og kortleggja heilsustøðuna hjá fólkinum og sjúku við t.d. at gerða stórar kanningar av fólkinum. Avtalan hevur við sær, at Statens Institut for Folkesundhed luttekur í altjóða arbeiðsbólkum og nevndum vegna Sundhedsministeriet. Myndugleikatænastan hjá States Institut for Folkesundhed er grundað á granskingina hjá Statens Institut for Folkesundhed og veitir óhefta vitan sum grundarlag undir samfelagsligum avgerðum, við tí endamáli at tryggja, at avgerðirnar kunnu takast út frá upplýstum grundarlagi, við at draga inn nýggjastu vitanina og granskingarúrslit á økinum.

Ein máti at býta heilsugranskingina upp uppá, er at lata ta gransking, ið gongur fyri seg í løtuni, í høvuðsheitum halda fram uttanfyri Fólkaheilsustýrið, sum mælt til omanfyri, ímeðan heilsuvísindalig ráðgeving til politiska myndugleikan, kundi verið avgreidd í Fólkaheilsustýrinum. Tað vil siga, at í tann mun politiski myndugleikin ynskir, at granska verður í ávísum øki, kann Fólkaheilsustýrið fáa granskarar settar í starv til at lýsa hesi viðurskifti. Hetta t.d. við at granskarin í einum verkætlanartíðarskeiði, ella í hálvari arbeiðstíð í eitt ávíst tíðarskeið, kundi arbeitt fyri Fólkaheilsustýrið við at lýsa hesi viðurskifti. Avtala kundi verið gjørd ímillum Heilsumálaráðið og Fólkaheilsustýrið um hesa granskingargrundaðu myndugleikatænastuna. Besta loysnin hevði verið, um Fólkaheilsustýrið og heilsugransking uttanfyri Fólkaheilsustýrið, kundu verið staðsett nærhendis hvør øðrum, soleiðis at synergi-

effektin ímillum stovnarnar hevði havt við sær, at heilsufakligi kunnleikin í Føroyum varð lyftur upp á eitt hægri stig.

Fólkaheilsuráðið hevur ført fram, at ein góður háttur at vinna sær nýggja vitan er at seta ph.d. verkætlanir í gongd innan økir, ið ynskiligt er at lýsa nærri. T.d. kundi hugsast at ein ph.d. verkætlan kundi verið gjørd um at menna hagtøl innan heilsugransking. Við hesum verður vitanin á økinum økt og kostnaðurin er ikki høgur av einari ph.d. verkætlan. Í løtuni eru fleiri ymiskar ph.d. verkætlanir innan heilsugransking í gongd á Fróðskaparsetrinum.

***Tilmæli***
*Mælt verður til, at granskingargrundað ráðgeving til politiska myndugleikan ella granskingargrundað myndugleikatænasta (forskningsbaseret myndighedsbetjening) verður partur av virkseminum í Fólkaheilsustýrinum. Hetta soleiðis, at granskarar í styttri tíðarskeið, granska innan ávís øki, ið politiski myndugleikin hevur biðið um. Mælt verður til, at Heilsumálaráðið og Fólkaheilsustýrið gera avtalu um hesa granskingargrundaðu myndugleikatænastu.*

## Ílegugransking

Ílegugransking fevnir um gransking í mannaílegum, sum er tengd at ættartræi. Ílegugransking í Føroyum er skipað undir Ílegusavninum, sum hevur einkarætt til at útvega sær, goyma og handfara vevnað og diagnosur til ílegugransking. Ílegusavnið umsitur og varðar av Vevnaðarskránni, Diagnosuskránni og Ættarbandsskránni. Vevnaðarskráin er ein biobanki, ið inniheldur vevnað frá menniskjum; Diagnosuskráin er ein skrá av diagnosum, sum heilsuverkið hevur diagnostiserað, umframt upplýsingar, sum eru vunnar úr vevnaði og Ættarbandsskráin er eitt ættartræ yvir allar føroyingar. Upplýsingar og vevnaður úr hesum skráum verður nýttur til ílegugransking.

Í sambandi við granskingarverkætlanir innan ílegur, hevur Ílegusavnið heimild at handa tann neyðuga vevnaðin og upplýsingar til granskingarverkætlanir til gransking. Ílegusavnið skal í sáttmálum altíð tryggja sær, at upplýsingar og vevnaður einans verða nýtt til ta avtalaðu verkætlanina. Harumframt skal tryggjast, at vevnaður eftir nýtsluna til verkætlanir, antin verður sendur aftur til Ílegusavnið ella burturbeindur.

Ein granskingarverkætlan innan ílegur skal, sum aðrar heilsugranskingarverkætlanir, hava góðkenning frá Vísindasiðseminevndini, umframt kunnað samtykki frá granskingarluttakara, áðrenn granskingarverkætlanin kann fara í gongd.

Harumframt skal ein granskingarverkætlan innan ílegur hava góðkenning frá Ílegusavninum, áðrenn granskingarverkætlanin kann fara í gongd. Hetta inniber, at granskarin sendir umsókn til Ílegusavnið um loyvi at granska í upplýsingum í omanfyrinevndu skráum. Ílegusavnið viðger umsóknina og ger sáttmála við granskaran um gransking í upplýsing í skráunum hjá Ílegusavninum.

Orsøkin til, at sáttmáli skal gerast við Ílegusavnið áðrenn granskingarverkætlan innan ílegur fer í gongd, er, at talan er um sera viðkvæmar heilsuupplýsingar, ið hava tørv á serligari verju.

Ætlanin er, at virksemið hjá Ílegusavninum skal skipast undir Fólkaheilsustýrinum. Tað vil siga, at Fólkaheilsustýrið eftir stovnsetan, tann 1. januar 2022, skal umsita uppgávurnar, ið eru lagdar til Ílegusavnið sambært ílegulógini. Av tí, at talan er um serstaka uppgávu, verður mett ráðiligt, at umsitingin av teimum trimum skráunum hjá Ílegusavninum og sáttmáli við granskarar um nýtslu av upplýsingum og vevnaði í skráunum, eigur at liggja í einari deild í Fólkaheilsustýrinum.

*Tilmæli*
*Mælt verður til, at ílegugransking í Føroyum, herundir granskingarverkætlanirnar hjá FarGen, verða skipaðar í omanfyrinevndu heilsugranskingareind, samstundis sum Fólkaheilsustýrið verður skipað.*

*Mælt verður til, at umsitingin av teimum trimum skráunum hjá Ílegusavninum: Vevnaðarskráin, Diagnosuskráin og Ættarbandsskráin, umframt sáttmálar við granskarar um nýtslu av upplýsingum og vevnaði í skráunum, verður skipað undir Fólkaheilsustýrinum.*

### 5.4.4. KUNNINGAR TØKNI

Mett verður, at tað er týdningarmikið at uppraðfesta og styrkja kunningartøkni í Fólkaheilsustýrinum. Kunningartøknin skal styrkja felags kós, ætlan og avrik í mun til talgildan, dáta, tøkni, skráir, hagtøl, dátugoymslu og nýskapan innan heilsuøkið, í víðastu merking. Hetta verður gjørt við m.a. skipanum til KT-arkitektur, stýring, skipanarumsiting og vandamálsgreining. Mett verður, at arbeiðið við at umsita KT, krevur 1 ársverk.

*Tilmæli*
*Mælt verður til, at kunningartøkni verður raðfest og styrkt í Fólkaheilsustýrinum.*

## 5.5. STOVNSETA FÓLKAHEILSUSTÝRIÐ

Ætlanin er, at Fólkaheilsustýrið skal fara til verka 1. januar 2022. Ein fortreyt fyri, at Fólkaheilsustýrið kann fara til verka tá er, at komið er á mál við at skipa tey praktisku viðurskiftini viðvíkjandi Fólkaheilsustýrinum, so sum at seta stjóra og finna hølir. Harumframt er ein fortreyt fyri, at Fólkaheilsustýrið kann fara til verka, at tey praktisku viðurskiftini viðvíkjandi tí heilsugransking, sum í dag fer fram á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Sjúkrahúsverkinum, Ílegusavninum, Fólkaheilsuráðnum og á Fróðskaparsetrinum, eru fingin uppá pláss, herundir umsiting og hølir.

Í arbeiðinum við at tilevna Ætlan um Fólkaheilsustýrið eru øll á einum máli um, at heilsugranskingin í Føroyum er í stórari menning og at tað er sera týdningarmikið, at heilsugranskingin ikki fer fyri bakka í hesum arbeiðinum.

*Tilmæli*
*Mælt verður tí til, at tey praktisku viðurskiftini viðvíkjandi Fólkaheilsustýrinum og tey praktisku viðurskiftini viðvíkjandi omanfyrinevndu heilsugransking eru komin uppá pláss samstundis, tann 1. januar 2022, tá ið Fólkaheilsustýrið eftir ætlan skal setast á stovn.*

# 6. UPPGÁVUR HJÁ STOVNUM OG RÁÐI, SUM KUNNU FLYTAST TIL FÓLKAHEILSUSTÝRIÐ

## 6.1. INNGANGUR

Í arbeiðssetninginum stendur, at ynski er um at leggja uppgávur frá ymiskum stovnum saman í ein stovn, so verandi orka kann verða nýtt meira skynsamt til frama fyri heilsuøkið og til at betra um heilsustøðu føroyinga. Í hesum kapitli verður umrøtt, hvørjir partar av Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Fólkaheilsuráðnum, Ílegusavninum, Heilsutrygd, Apoteksverkinum, Sjúkrahúsverkinum og Heilsumálaráðnum møguliga kunnu leggjast til Fólkaheilsustýrið, so uppgávurnar, nevndar í kapitli 5, kunnu verða loystar.

## 6.2. UPPGÁVUR, SUM KUNNU FLYTAST

Mett verður, at alt virksemið hjá Fólkaheilsuráðnum við starvsfólkum, kann flyta til Fólkaheilsustýrið, tá tað er stovnsett. Tað vil siga, at ein fulltrúi, ein skrivari/samskipari, ein samskipari og starvsfólk í tíðaravmarkaðum starvi, kunnu flyta í Fólkaheilsustýrið.

Mett verður somuleiðis, at virksemið hjá Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu kann flytast til Fólkaheilsustýrið, tá tað verður stovnsett. Mett verður, at tey starvsfólk, ið eru sett í starv á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu eiga at verða flutt til Fólkaheilsustýrið. Hesi eru: ein yvirlækni, ein fíggjarleiðari, ein skrivari og eitt hálvtíðar reingerðingarfólk. Mett verður tó, at kliniska uppgávan innan arbeiðs- og umhvørvislæknafrøði, ið verður loyst a deildini í dag, eigur at verða flutt til Sjúkrahúsverkið. At Fólkaheilsustýrið tekur sær av yvirskipaðum uppgávum, ímeðan Sjúkrahúsverkið tekur sær av kliniskum uppgávum.

Mett verður, at teir granskarar, ið eru staðsettir í Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu í ymiskum granskingarverkætlanum, eiga at verða fluttir í felags hølir saman við granskarunum í Ílegusavninum, nærhendis Fólkaheilsustýrinum, soleiðis sum mælt verður til í kapitli 5. Neyðugt er, at kliniska granskingin verður staðsett innan Sjúkrahúsverkið.

Mett verður, at virksemið hjá teimum starvsfólkum, ið eru sett í starv í Ílegusavninum eigur at verða flutt til Fólkaheilsustýrið. Tað vil siga, at tey tvey starvsfólkini, ið starvast á Ílegusavninum, kunnu flyta til Fólkaheilsustýrið. Hetta eru ein stjóri, ein hálvur samskipari og eitt hálvt hjálparfólk. Tær skráir, ið Ílegusavnið umsitur: Diagnosuskrá, Ættarbandsskrá og Vevnaðarskrá, verða sostatt umsitnar í Fólkaheilsustýrinum. Virksemið, ið er, heldur áfram og eigur at verða styrkt.

Mett verður, at teir granskarar, ið eru staðsettir í Ílegusavninum í ymiskum granskingarverkætlanum eiga at verða fluttir saman við granskarunum á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, sum ein eind í felags hølum, nærhendis Fólkaheilsustýrinum, soleiðis sum mælt verður til í kapitli 5. Neyðugt er, at kliniska granskingin verður staðsett innan Sjúkrahúsverkið. Mett verður eisini, at granskingarverkætlanirnar hjá FarGen kunnu flyta til heilsugranskingareindina. Tað vil siga, at ein verkætlanarleiðari, ein laboratoriusamskipari, eitt hálvt kunningarfólk/samskipari kunnu flyta til heilsugranskingareindina.

Heilsumálaráðið umsitur í løtuni heilsutilbúgving, altjóða og norðurlendskt samstarv á heilsuøkinum og ávísar frágreiðingar, t.d. árligu tannlæknafrágreiðingina við tilhoyrandi játtan. Mett verður, at heilsutilbúgving, á uppgávur innan altjóða og norðurlendskt samstarv

á heilsufakøkinum umframt ávísar frágreiðingar, sum Heilsumálaráðið varðar av, kann flyta til Fólkaheilsustýrið.

Apoteksverkið og heilivágsøkið eru yvirtikin sum føroysk málsøkið. Tað hevur tí verið umrøtt, hvørt uppgávur hjá Landsapotekaraembætinum skulu flytast til Fólkaheilsustýrið. Her verður serliga hugsað um eftirlitsuppgávuna við apotekunum og heilivágsøkinum, sum í dag liggur hjá Landsapotekaranum. Mett verður, at uppgávur hjá Landsapotekaranum, herundir eftirlitsuppgávan, sum frálíður kann flyta til Fólkaheilsustýrið.

Heilsutrygd umsitur í løtuni góðkenning og eftirmeting av rúsviðgerðarstovnum og hevur eftirlit við kommunulæknaviðtalum. Mett verður, at hendan uppgávan, sum frálíður, kann flyta í Fólkaheilsustýrið.

Sjúkrahúsverkið umsitur í løtuni Krabbameinsskránna. Mett verður, at hendan uppgávan kann flyta til Fólkaheilsustýrið. Mett verður annars, at tað, sum frálíður, kann takast støða til, um aðrar uppgávur kunnu flyta úr Sjúkrahúsverkinum til Fólkaheilsustýrið.

# 7. ÍVERKSETAN OG TÍÐARÆTLAN

## 7.1. INNGANGUR

Hesin kapittulin snýr seg um, hvussu Fólkaheilsustýrið kann verða íverksett. Kapittulin tekur støði í kapitli 5 sum lýsir, hvørjar uppgávur mælt verður til at leggja til Fólkaheilsustýrið. Íverksetanin í hesum kapitli er serliga ítøkilig fyri tíðarskeiðið 2022-2028. Hóast heilsugransking ikki verður partur av virkseminum hjá Fólkaheilsustýrinum, er tað týdningarmikið, at Fólkaheilsustýrið og heilsugranskingareindin verða stovnsett samstundis, og tí verða viðurskifti viðvíkjandi heilsugranskingareindina eisini viðgjørd í hesum kapitli.

## 7.2. ÍVERKSETAN UNDIR EINUM

Sambært arbeiðssetninginum skal Fólkaheilsustýrið røkja eina røð av uppgávum. Innihaldið í uppgávunum og fortreytir fyri at kunna røkja hesar uppgávur, er neyvt lýst í kapitli 5. Bæði í serfrøðingabólkinum og hoyringarbólkinum er breið semja um, at tað er skilabest at íverkseta Fólkaheilsustýrið undir einum. Við hesum fer at bera til at fáa eitt Fólkaheilsustýri, sum kann veita eina dygdargóða heilsufakliga tænastu á einum høgum fakligum støði beinanvegin frá stovnsbyrjan.

Hoyringarbólkurin og serfrøðingabólkurin halda, at tað eru fleiri vansar við at íverkseta Fólkaheilsustýrið í stigum, sum røkka yvir fleiri ár. Meginvansin er, at tað fer at taka langa tíð at íverkseta Fólkaheilsustýrið. Av somu orsøk fer tað at taka óneyðuga drúgva tíð, áðrenn Fólkaheilsustýrið kann fara undir fleiri av teimum uppgávum, ið eru ásettar í arbeiðssetninginum, og sum breið semjað er um, eru týdningarmiklar at fara undir. Við hesum verður Fólkaheilsustýrið ikki fult virkisført fyrr enn um fleiri ár. Í bólkunum eru tey stúrin um, at dregur tað út við at íverkseta Fólkaheilsustýrið, og stýrið tískil ikki verður ført fyri at røkja fleiri av teimum uppgávum, sum ætlanin er, at tað skal gera, kann tað fara at hava við sær, at undirtøkan fyri/álitið á Fólkaheilsustýrið minkar bæði millum myndugleikar, stovnar, heilsustarvsfólk, almenningin o.s.fr.

## 7.3. ÍVERKSETAN Í STIGUM

Samskipanarbólkurin hevur samskift við serfrøðingabólkin og hoyringarbólkin um, hvussu Fólkaheilsustýrið kann verða íverksett í stigum, um tað ikki ber til at íverkseta tað í einum. Bæði serfrøðingabólkurin, hoyringarpartarnir og samskipanarbólkurin eru samd um, at verður Fólkaheilsustýrið skipað í stigum, er neyðugt, at stigini verða skipað og samskipað á ein slíkan hátt, at tað ber til at fara frá einum stigi til tað næsta, uttan forðingar. Hetta merkir, at arbeiðið, sum er sett í verk undir einum stigi, kann halda fram undir komandi stigum. Nevndu partar leggja dent á, at tað er neyðugt at raðfesta, nær og í hvørji røð tær ymsu uppgávurnar verða lagdar til Fólkaheilsustýrið. Hetta kemst av, at tað er ikki líkamikið, hvussu uppgávurnar verða raðfestar og lagdar til Fólkaheilsustýrið. Orsøkin er, at tað er av alstórum týdningi, at byrjað verður við teimum uppgávum, sum eru ein fortreyt fyri, at Fólkaheilsustýrið kann røkja sínar uppgávur. Her verður serliga hugsað um at menna hagtøl og skráir. Eftir hetta verða aðrar uppgávur lagdar til Fólkaheilsustýrið so hvørt, sum fíggjarlig orka og starvsfólkaorka fæst til tess.

Serfrøðingabólkurin og samskipanarbólkurin hava umrøtt, hvørjar uppgávur kunnu verða lagdar til hvørt av stigunum, og hava partarnir gjørt niðanfyristandandi uppskot til uppgávur og tíðarætlan.

Á heysti 2021 verður farið undir tilgongdina at søkja eftir stjóra til Fólkaheilsustýrið og útvega stýrinum hølir. Fólkaheilsustýrið byrjar virksemið sítt 1. januar 2022, og samstundis kemur í gildi lóg um Fólkaheilsustýri.

**Tíðarætlan fyri tey fýra stigini:**

- Stig 1 – 1. januar 2022 – 31. desember 2023
- Stig 2 – 1. januar 2024 – 31. desember 2025
- Stig 3 – 1. januar 2026 – 31. desember 2027
- Stig 4 – 1. januar 2028 ->

## Stig 1 – 1. januar 2022 – 31. desember 2023

Fyrsta stigið í íverksetanini tekur tvey ár og fevnir um tíðarskeiðið 1. januar 2022 – 31. desember 2023. Undir hesum stigi verður talan bæði um at halda fram við verandi virksemi og seta skjøtul á nýtt virksemi.

***Uppgávur í stig 1***

- Stovnseta Fólkaheilsustýrið
- Skráir
- Hagtøl
- Fólkaheilsuarbeiði
- Uppgávur, ið eru lagdar til Ílegusavnið sambært ílegulógini
- Heilsufaklig ráðgeving
- Ráðlegging innan heilsuverkið

Uppgávurnar í stigi 1 verða býttar í tríggjar høvuðspartar, t.e. stovnsetan, verandi uppgávur og nýggjar uppgávur.

### *Stovnsetan*

Fólkaheilsustýrið fer til verka 1. januar 2022. Tað fyrsta, sum verður gjørt undir hesum stigi, er at skipa Fólkaheilsustýrið. Hetta er ein fortreyt fyri, at Fólkaheilsustýrið kann fara til verka.

### *Verandi uppgávur*

Frá 1. januar 2022 at rokna verða Ílegusavnið, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Fólkaheilsuráðið formliga skipað í Fólkaheilsustýrið. Hesi røkja longu eina røð av uppgávum innan teirra virkisøkið. Ætlanin er, at meginparturin av uppgávunum, sum hoyra undir virkisøkini hjá teimum halda fram, tá tey verða flutt í Fólkaheilsustýrið. Starvsfólkini flyta somuleiðis til Fólkaheilsustýrið. Allir partar, sum hava verið við í arbeiðinum at orða hesa ætlan, hava víst á tørvin at uppraðfesta fólkaheilsuarbeiðið sum heild og hava víst á, at hetta økið eigur støðugt at verða styrkt komandi árini.

### *Nýggjar uppgávur*

Tær nýggju uppgávurnar fevna um skráir, hagtøl, heilsufakliga ráðgeving og ráðlegging innan heilsuverkið. Serliga uppgávurnar at skipa, samskipa og menna skráir og hagtøl eru týdningarmiklar, tí tað er neyðugt at hava eitt grundleggjandi vitanargrundarlag um viðurskifti viðvíkjandi heilsustøðu føroyinga, heilsuøkið og heilsuverkið sum heild. Hetta er somuleiðis

ein fortreyt fyri, at tænasturnar og ráðgevingin frá Fólkaheilsustýrinum kunnu byggja á eitt dygdargott fakligt grundarlag. Hesar uppgávurnar eru somuleiðis týdningarmiklar í sambandi við gransking. Av tí, at hagtøl og skráir eru ein grundleggjandi fortreyt fyri virkseminum hjá Fólkaheilsustýrinum, eru serfrøðingabólkurin og samskipanarbólkurin samd um, at tað eigur at vera farið undir hesar báðar uppgávurnar beinanvegin, tá Fólkaheilsustýrið verður skipað.

Sum greitt frá í kapitli 5, er tað av alstórum týdningi at fara undir arbeiðið at skipa eina Landssjúklingasskrá. Av tí, at tað er eitt stórt og víðfevnt arbeiði at fara undir at skipa eina Landssjúkligaskrá, eigur hetta arbeiðið at verða skipað í eini sjálvstøðugari verkætlan við egnari játtan undir Fólkaheilsustýrinum. Fyrireikingarnar til hesa verkætlan eiga at byrja í 2022. Í løtuni er ov tíðliga at siga, nær rokkið verður á mál við verkætlanini. Tá Landssjúklingaskráin er skipað, verður farið undir framhaldandi arbeiði at menna hana. Harumframt eigur skjøtul at verða settur á arbeiðið at fáa upplýsingar um føroyingar í donskum skráum til Føroyar.

### *Starvsfólkatørvur*

Tá tað snýr seg um verandi virksemi, verður skotið upp, at tey starvsfólkini, sum longu eru í starvi á Ílegusavninum, Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og í Fólkaheilsuráðnum flyta í Fólkaheilsustýrið, og koma tey at starvast innan verandi virkisøkið hjá teimum. Tó verður skotið upp, at starvsfólkini í granskingarverkætlanum hjá FarGen flyta til komandi heilsugranskingareindina. Tað fara ikki at standast øktar starvsfólkaútreiðslur hesum viðvíkjandi. Tó eigur fólkaheilsuarbeiðið, herundir heilsufremjan og sjúkufyribyrging, at verða uppraðfest, og harvið fer eisini at verða tørvur á eyka starvsfólkaorku innan hetta økið komandi árini.

Fortreytin fyri at Fólkaheilsustýrið kann fara undir tær uppgávur, sum ikki verða gjørdar undir verandi skipan, t.d. at fáa til vega hagtøl og uppbyggja ymsar skráir, er, at vælskikkað starvsfólk verða sett at gera hesar nýggju uppgávurnar. Av tí, at talan er um uppgávur, sum stórt sæð ikki verða gjørdar í dag, er tað ein fortreyt, at nýggj størv verða stovnað til hesar nýggju uppgávurnar. Serfrøðingabólkurin og samskipanarbólkurin eru samd um, at til tess at røkja tær uppgávur, sum verða lagdar í stig 1, verður tørvur á at seta starvsfólkini í mynd 1 í starv afturat teimum starvsfólkum, sum longu røkja verandi uppgávur.

Av tí, at tað kann taka tíð at stovnseta Fólkaheilsustýrið verður hildið, at stig 1 kann verða býtt í tveir undirpartar, sum fevna um ávikavist ár 2022 og 2023, sí mynd 2.

Sum tað fyrsta undir stigi 1, verður ein stjóri settur, sum m.a. fær til uppgávu at skipa Fólkaheilsustýrið. Ætlanin er, at ein stjóri verður settur so skjótt sum gjørligt eftir, at játtan til stovnin er fingin til vega á fíggjarlógini, og lógaruppskot er sett í gildi. Talan er um eitt nýtt starv. Serfrøðingabólkurin hevur umrøtt, um tað eiga at ásetast ávíst krøv um útbúgving hjá stjóranum í Fólkaheilsustýrinum. Sum dømi kann nevnast, at stjórarnir í ávikavist danska Sundhedsstyrelsen og norska Folkehelseinstituttet eru læknar, men tað er ikki ein treyt fyri at røkja stjórastørvini, at viðkomandi er lækni. Tað verður ikki hildið at vera rætt, at seta eitt slíkt krav um ávísa útbúgving, tí hetta kann avmarka talið á umsøkjarum óneyðuga nógv. Øll eru tó samd um, at tað er tørvur á, at ein lækni verður settur í starv í Fólkaheilsustýrinum frá stovnsbyrjan. Um stjórin verður lækni, verður ikki neyðugt at seta ein lækna afturat í starv beinanvegin.

Til at røkja uppgávuna við hagtølum og skráum, er tørvur m.a. á biohagfrøðingi og heilsubúskaparfrøðingi. Skotið verður upp, at í 2022 verður biohagfrøðingur settur í starv, og heilsubúskaparfrøðingur verður settur í starv í 2023. Tørvur er á einum KT-frøðingi til ymsu KT-skipanirnar í Fólkaheilsustýrinum.

Í kapitli 5 verður mælt til, at fólkaheilsuarbeiðið verður uppraðfest. Við støði í hesum,

verður skotið upp, at ein fólkaheilsufrøðingur verður settur í starv í 2022 at taka sær av fólkaheilsuøkinum.

Umframt tey starvsfólk, sum verða sett í fast starv í Fólkaheilsustýrinum, verður tørvur á starvsfólkum til ávísar tíðaravmarkaðar uppgávur, sum skulu stuðla undir heilsufakliga innihaldinum í arbeiðinum í Fólkaheilsustýrinum. Í slíkum førum kann talan verða um heilsustarvsfólk (læknar, kliniskur genetikari, sjúkrarøktarfrøðingar, sálarfrøðingar o.s.fr.) ella ph.d. lesandi.

### Mynd 1: Starvsfólk og starvsfólkatørvur í stig 1 – 2022

| Verandi starvsfólk | Nýggj starvsfólk |
|---|---|
| **Ílegusavnið** | Stjóri |
| Stjóri | Biohagfrøðing |
| Skrivari/samskipari (parttíð) | (Lækni) |
| Skrivstovufólk | Fólkaheilsufrøðing |
| **Fólkaheilsuráðið** | |
| Fulltrúi | |
| Samskipari/skrivari (parttíð) | |
| Samskipari (tíðaravmarkað) | |
| **Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu** | |
| Yvirlækni | |
| Skrivstovufólk – KT | |
| Fíggjarleiðari | |
| **Felags** | |
| Reingerð | |

### Mynd 2: Starvsfólkatørvur í stig 1 – 2023

| |
|---|
| KT-frøðing |
| Heilsubúskaparfrøðing |
| Starvsfólk til ávísar tíðaravmarkaðar uppgávur (t.d. heilsustarvsfólk ella ph.d. lesandi) |

### Stig 2 – 1. januar 2024 – 31. desember 2025

Arbeiðið, sum verður sett í verk undir stigi 1, heldur fram undir stigi 2. Afturat hesum verða lagdar tær uppgávur, sum eru nevndar undir stigi 2. Talan verður í høvuðsheitum um nýggjar uppgávur, sum verða lagdar til Fólkaheilsustýrið. Harafturat koma nakrar uppgávur, sum longu heilt ella partvíst verða gjørdar í avmarkaðan mun á verandi

stovnum og í Heilsumálaráðnum. Stig 2 fevnir um tíðarskeiðið 1. januar 2024 – 31. desember 2025.

*Uppgávur í stig 2*

- Kunning til borgarar og almenning, herundir eisini Heilsuportal.fo
- Vegleiðingar
- Heilsugransking/granskingargrunda myndugleikatænasta
- Heilsutilbúgving

## *Nýggjar uppgávur*

Breið semja er um, at kunning til borgarar og almenning, orðaðar vegleiðingar til heilsustarvsfólk, heilsugransking/granskingargrundað myndugleikatænasta og heilsutilbúgving eru týdningarmiklar uppgávur, sum eiga at verða raðfestar frammarlaga at fáa sett í verk. Av tí, at talan er um nýggjar uppgávur, verður tørvur á at økja starvsfólkaorkuna í Fólkaheilsustýrinum samsvarandi.

## *Starvsfólkatørvur*

Tá farið verður undir stig 2, víðkast virkisøkið hjá Fólkaheilsustýrinum, og harvið verður tørvur á ymsum starvsfólkum afturat. Talan verður bæði um at seta starvsfólk í fast starv og seta fólk til ávísar uppgávur í tíðaravmarkað størv.

Stórur tørvur er á at fara undir arbeiðið at orða vegleiðingar. Ein løgfrøðingur eigur at verða settur at gera hetta arbeiðið. Harafturat verður tørvur á, at ymisk heilsustarvsfólk luttaka í m.a. hesum arbeiði. Í sambandi við granskingargrundaðu myndugleikatænastuna, verður tørvur á at seta starvsfólk í tíðaravmarkaði størv. Undir hesum stignum verða hagtalsparturin og fólkaheilsuarbeiðið eisini styrkt.

Aðrar av uppgávunum undir stigi 2 kunnu starvsfólk røkja, sum eru sett í starv í Fólkaheilsustýrinum undir stig 1.

### Mynd 3: Starvsfólkatørvur í stig 2 – 2024

| |
|---|
| Løgfrøðingur |
| Fólkaheilsufrøðingur |
| Starvsfólk til ávísar tíðaravmarkaðar uppgávur (t.d. heilsustarvsfólk og ph.d. lesandi) |

### Mynd 4: Starvsfólkatørvur í stig 2 – 2025

| |
|---|
| Biohagfrøðingur |
| Heilsustarvsfólk |
| Starvsfólk til ávísar tíðaravmarkaðar uppgávur (t.d. heilsustarvsfólk og ph.d. lesandi) |

## Stig 3 – 1. januar 2026 – 31. desember 2027

Hetta stig byggir á tað arbeiðið, sum varð sett í verk undir teimum báðum undanfarnu stigunum. Uppgávurnar undir stigi 3 verða lagdar afturat verandi uppgávum hjá Fólkaheilsustýrinum. Stig 3 fevnir um tíðarskeiðið 1. januar 2026 – 31. desember 2027.

***Uppgávur í stig 3***

- Eftirmetingar
- Góðkenningar
- Eftirlit
- Dygdarmenning yvirskipað
- Lýsingar og greiningar
- Norðurlendskt og altjóða heilsufakligt samstarv

### *Verandi uppgávur*

Lýsingar, greiningar og norðurlendskt heilsufakligt samstarv eru uppgávur, sum verða røktar í ein ávísan mun undir verandi skipan. Ætlanin er, at hesar uppgávur flyta til Fólkaheilsustýrið undir stigi 3. Tó fara partar av summum av hesum uppgávum longu at flyta í Fólkaheilsustýrið undir stig 1, tá Ílegusavnið, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Fólkaheilsuráðið verða skipað í Fólkaheilsustýrið.

Sum lýst í kapitli 5, eru nakrar myndugleikauppgávur innan heilsuøkið undir føroyskum málsræði. Hesar myndugleikauppgávur verða fluttar til Fólkaheilsustýrið undir stigi 3. Ítøkiliga snýr hetta seg um myndugleikauppgávur innan virkisøkið hjá ávikavist Landsapotekaranum og Heilsutrygd. Undir verandi skipan er landsapotekarastarvið tvíbýtt, t.v.s., at Landsapotekarin er bæði stovnsleiðari og eftirlitsmyndugleiki. Tann parturin av landsapotekarastarvinum, sum fevnir um myndugleikauppgávur, verður fluttur í Fólkaheilsustýrið. Samstundis eigur hetta økið at verða uppraðfest. Undir virkisøkinum hjá Heilsutrygd eru eftirlitsuppgávur innan viðurskifti í kommunulæknaskipanini. Harumframt skal Heilsutrygd góðkenna rúsviðgerðarstovnarnar. Hesar uppgávur verða fluttar til Fólkaheilsustýrið.

### *Nýggjar uppgávur*

Breið semja er um, at yvirskipað dygdarmenning innan heilsuverkið er ein týdningarmikil uppgávu at fáa sett í verk. Í juni 2021 varð atlimaskapur Føroya í WHO staðfestur. Tann heilsufakligi parturin av hesum samstarvinum verður lagdur til Fólkaheilsustýrið, meðan Heilsumálaráðið framvegis fer at taka sær av tí heilsupolitiska partinum av hesum samstarvinum. Av tí, at talan er um nýggjar uppgávur, verður tørvur á at økja starvsfólkaorkuna samsvarandi.

Av tí, at eftirmetingar bert verða gjørdar í ein sera avmarkaðan mun, verður hetta greinað, sum ein nýggj uppgáva, ið verður løgd til Fólkaheilsustýrið.

### *Starvsfólkatørvur*

Ein stjórnmálafrøðingur við hollum kunnleika til samfelagsviðurskifti sum heild eigur at verða settur, sum í samstarvi við onnur starvsfólk í Fólkaheilsustýrinum, ger lýsingar og greiningar um m.a. viðurskifti viðvíkjandi heilsustøðu føroyinga. Tá myndugleikauppgávan hjá Landsapotekaranum verður skipað í Fólkaheilsustýrinum, verður tørvur á at seta ein farmaseut í starv. Hetta økið eigur at verða uppraðfest sum frálíður.

Ein fólkaheilsufrøðingur eigur at verða settur afturat, sum liður í strembanini at uppraðfesta fólkaheilsuarbeiðið. Eitt heilsustarvsfólk eigur at verða sett afturat.

Í løtuni verður ikki roknað við, at Fólkaheilsustýrið fer at hava tørv á eyka starvsfólkum at gera eftirmetingar. Hetta kemst av, at summi av teimum starvsfólkunum, sum longu eru sett í starv í Fólkaheilsustýrinum undir teimum báðum undanfarnu stigunum, eiga at kunna gera hesa uppgávu sum part av teirra arbeiði.

### Mynd 5: Starvsfólkatørvur í stig 3 – 2026

| |
|---|
| Stjórnmálafrøðingur e.l. |
| Farmaseutur |
| Heilsustarvsfólk |
| Starvsfólk til ávísar tíðaravmarkaðar uppgávur (t.d. heilsustarvsfólk og ph.d. lesandi) |

### Mynd 6: Starvsfólkatørvur í stig 3 – 2027

| |
|---|
| Fólkaheilsufrøðingur |
| Eftirlitsførleiki |
| Góðkenningarførleiki |
| Starvsfólk til ávísar tíðaravmarkaðar uppgávur (t.d. heilsustarvsfólk og ph.d. lesandi) |

### Stig 4 – 1. januar 2028 ->

Hetta stigið er tað seinasta í røðini og byggir á arbeiðið, sum varð sett í verk undir teimum undanfarnu stigunum. Stig 4 byrjar 1. januar 2028 og fevnir um tað framhaldandi arbeiðið í Fólkaheilsustýrinum. Av tí, at hetta er tað seinasta stigið í sambandi við, at Fólkaheilsustýrið verður íverksett, verður ikki ásett ein dagseting fyri, nær arbeiðið í hesum stigi skal verða lokið.

***Uppgávur í stig 4***

- Menna Fólkaheilsustýrið víðari fram á leið,
- Menna aðrar skipanir, herundir:
  - Vevnaðarnýtsluskrá (Vævsanvendelsesregister)
  - Viðgerðartestamentsskrá (Behandlingstestamentsregister)

### *Nýggjar uppgávur*

Vevnaðarnýtsluskráin og viðgerðartestamentsskráin eru skráir, sum ikki eru yvirtiknar sum føroyskt málsøki og tískil hoyra undir danskar myndugleikar. Til ber at stovnseta føroyskar skráir viðvíkjandi vevnaðarnýtslu og viðgerðartestamenti, men politiski myndugleikin hevur ikki tikið støðu til, um føroyskar skráir skulu setast á stovn hesum viðvíkjandi. Verður

farið undir at stovnseta føroyskar skráir á hesum øki, eigur hetta arbeiðið at verða skipað í hvør síni verkætlan. Verkætlanirnar verða tá skipaðar sum sjálvstøðugar verkætlanir undir Fólkaheilsustýrinum.

### *Starvsfólkatørvur*

Av tí, at uppgávurnar eru undir donskum málsræði, verður ikki mett um starvsfólkatørvin á hesum sinni.

> ***Tilmæli***
> *Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið verður íverksett undir einum. Um hetta ikki letur seg gera, verður mælt til, at Fólkaheilsustýrið verður íverksett í stigum við tí innihaldi, starvsfólkaorku og tíðarætlan, sum lýst omanfyri.*

## 7.4. FÓLKAHEILSUSTÝRIÐ OG HEILSUGRANSKINGAREINDIN MUGU STOVNSETAST SAMSTUNDIS

Undir verandi skipan fer heilsugransking m.a. fram á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Ílegusavninum og Fólkaheilsuráðnum. Í kapitli 5 verður mælt til, at heilsugranskingin, sum fer fram á hesum eindum, verður flutt til eina heilsugranskingareind, sum verður staðsett tætt við Fólkaheilsustýrið, møguliga sum ein deild undir Sjúkrahúsverkinum.

Serfrøðingabólkurin og heilsugranskarar hava boðað frá, at tað er avgerandi neyðugt, at tey praktisku viðurskiftini viðvíkjandi heilsugranskingini verða fingin upp á pláss beinanvegin, so nýstovnaða granskingardeildin og Fólkaheilsustýrið verða stovnsett samstundis, t.v.s. 1. januar 2022. Um tað ikki ber til at stovnseta granskingardeildina 1. januar 2022, mæla tey til at útseta stovnsetanina hjá Fólkaheilsustýrinum, til heilsugranskingardeildin kann verða stovnsett.

Grundgevingin hjá serfrøðingabólkinum og heilsugranskarum er, at eru tey praktisku viðurskiftini viðvíkjandi heilsugranskingini ikki fingin upp á pláss, tá Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Ílegusavnið og Fólkaheilsuráðið verða skipað í Fólkaheilsustýrið, dettur heilsugranskingin niðurfyri. Ein slík støða hevur við sær vanlukkuligar avleiðingar fyri stóran part av fyrrverandi og núverandi heilsugransking, sum fer fram í Føroyum.

Serfrøðingabólkurin hevur boðað frá, at hann tekur bert undir við at stovnseta Fólkaheilsustýrið, um viðurskiftini kring granskingardepilin eru fingin upp á pláss áðrenn Fólkaheilsustýrið verður sett á stovn. Undirtøka teirra er sostatt treytað av, at Fólkaheilsustýrið og granskingardepilin undir Sjúkrahúsverkinum verða stovnsett samstundis.

> ***Tilmæli***
> *Mælt verður til, at farið verður undir arbeiðið at skipa heilsugranskingareindina í heyst, samstundis, sum farið verður undir at skipa Fólkaheilsustýrið. Somuleiðis verður mælt til, at Fólkaheilsustýrið og heilsugranskingareindin verða stovnsett samstundis.*

# 8. FÍGGJARLIG LÝSING

## 8.1 INNGANGUR

Í hesum kapitli verður tann fíggjarligi parturin av at seta Fólkaheilsustýrið á stovn lýstur. Kapittulin byrjar við at lýsa verandi játtanir hjá teimum eindum, sum verða lagdar til Fólkaheilsustýrið 1. januar 2022. Eftir hetta verða útreiðslurnar, sum hoyra til fyrstu trý stigini, lýstar. Tað kann vera trupult at gera nágreiniligar kostnaðarmetingar innan tey ymsu stigini, og tí er neyðugt at taka eitt ávíst fyrivarni viðvíkjandi teimum fíggjarligu metingunum. Tað ber heldur ikki til at siga, hvørjar útreiðslur møguliga kunnu lækka, sum úrslit av virkseminum hjá Fólkaheilsustýrinum, og tí eru tær heldur ikki tiknar við í hesi fíggjarligu lýsingini. Viðvíkjandi starvsfólkalønum er støðið tikið í endastiganum í lønartalvunum hjá viðkomandi fakfeløgum.

## 8.2 JÁTTAN TIL VERANDI EINDIR – LØGTINGSINS FÍGGJARLÓG 2021

Tær eindirnar, sum ætlanin er at leggja til Fólkaheilsustýrið frá 1. januar 2022 at rokna, eru Ílegusavnið, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Fólkaheilsuráðið. Sambært galdandi skipan hava hesar eindirnar hvør sína játtan á Løgtingsfíggjarlógini. Um hesar játtanir verða lagdar saman í eina játtan á fíggjarlógini, verður henda játtanin undir Fólkaheilsustýrinum 7,4 mió. kr. Í mynd 7 eru játtanirnar hjá teimum trimum eindunum neyvt lýstar.

### Mynd 7: Játtan 2021 á Løgtingsins fíggjarlóg

| Verandi játtan í tús. kr. | Ílegusavnið | Deildin fyri Arb.-Almannaheilsu | Fólkaheilsuráðið | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Lønir vm | 1.434 | 1.981 | 2.361 | 5.776 |
| Keyp av vørum og tænastum | 385 | 232 | 870 | 1.487 |
| Útbúnaður | 100 | 40 | 30 | 170 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 100 | 2 | 106 | 208 |
| Søla | -200 | 0 | 0 | -200 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 0 | 2 | 0 | 2 |
| Tilsamans | 1.819 | 2.257 | 3.367 | 7.443 |

## 8.3 JÁTTAN TIL FÓLKAHEILSUSTÝRIÐ

Bæði serfrøðingabólkurin og hoyringarpartarnir eru samd um, at ein fortreyt fyri, at Fólkaheilsustýrið kann røkka sínum endamáli, t.v.s. røkja sítt virkisøkið og tær uppgávur, sum

fara at verða lagdar til stýrið á ein fullgóðan hátt, er, at Fólkaheilsustýrið fær neyðugu orkuna til tess, t.v.s. bæði starvsfólkaorku og fíggjarliga orku. Harafturat koma stovningarútreiðslur.

Serfrøðingabólkurin og hoyringarpartarnir eru somuleiðis á einum máli um, at tað ber ikki til at røkka endamálinum við Fólkaheilsustýrinum við bert at leggja játtanirnar hjá Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Fólkaheilsuráðnum og Ílegusavninum saman í eina játtan. Til tað eru játtanirnar alt ov smáar. Hesar játtanir røkka bert til tað virksemið, sum longu er á nevndu eindum. Skal virksemið hjá Fólkaheilsustýrinum verða innan verandi játtan, eru bert tveir møguleikar:

- antin verður tað ikki møguligt at fara undir tær uppgávur, sum Fólkaheilsustýrið skal gera sambært arbeiðssetninginum,
- ella má virksemið á verandi eindum, t.v.s. Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Fólkaheilsuráðnum og Ílegusavinum, skerjast samsvarandi hesum.

Serfrøðingabólkurin og hoyringarpartarnir eru samd um, at fortreytin fyri, at Fólkaheilsustýrið kann gera tær uppgávur, sum eru nevndar í arbeiðssetninginum og sum politiski myndugleikin ynskir verða framdar er, at Fólkaheilsustýrið fær eina játtan, sum samsvarar hesum, t.v.s. eina játtan, sum er hægri enn verandi játtan.

Í kapitli 7 um íverksetan og tíðarætlan verður mælt til, at Fólkaheilsustýrið verður skipað í fýra stigum. Fyrsta stigið verður fíggjað við at leggja játtanirnar hjá Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Fólkaheilsuráðnum og Ílegusavninum til Fólkaheilsustýrið, umframt at tørvur verður á eyka játtan til tær uppgávur, sum verða lagdar afturat 1. stigi. Undir teimum fylgjandi stigunum verður tørvur á at hækka játtanina til Fólkaheilsustýrið samsvarandi nýggju uppgávunum og økta virkseminum, sum stendst av hesum.

Í teimum niðanfyristandandi brotunum verða tær útreiðslur lýstar, sum fara at standast av at fara undir tey fýra stigini.

### 8.3.1 STIG 1 – 1. JANUAR 2022 – 31. DESEMBER 2023

Fyrst í hesum stigi verður talan um nýggjar útreiðslur til stovningarútreiðslur, hølisútreiðslur, nýggjar rakstraruppgávur, KT og nýggj starvsfólk o.s.fr. Hetta stig verður partvíst fíggjað við verandi játtan hjá Ílegusavninum, Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Fólkaheilsuráðnum og partvíst við øktari játtan til nýtt virksemi. Tá Fólkaheilsustýrið verður skipað, verður tørvur á einum búmerki og eini heimasíðu. Roknað verður við, at kostnaðurin av hesum verður umleið, 150.000 kr. Undir verandi skipan hava Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Ílegusavnið og Fólkaheilsuráðið hvør sína heimasíðu. Tá Fólkaheilsustýrið er sett á stovn, verður bert tørvur á at hava eina heimasíðu í staðin fyri tríggjar. Hetta fer at hava við sær nakað av minni útreiðslum, og kann sparda upphæddin sostatt verða við til at fíggja part av nýggja virkseminum hjá Fólkaheilsustýrinum.

#### *Stovnsetan*

Útreiðslur fara at standast av at stovna Fólkaheilsustýrið. Í løtuni ber tó ikki til at siga neyvt, hvørjar hesar útreiðslur fara at verða. Hetta fer at verða gjørt á heysti 2021, tá farið verður undir ítøkiliga fyrireikingararbeiðið við at skipa Fólkaheilsustýrið.

#### *Hølisviðurskifti*

Ætlanin er, at Fólkaheilsustýrið fer at húsast í einum av verandi bygningum undir málsræðinum hjá Heilsumálaráðnum. Á heysti 2021 fer Heilsumálaráðið at taka støðu til staðsetingina. Av tí, at hølir ikki eru fingin til vega til komandi Fólkaheilsustýrið, ber ikki til at siga neyvt, hvørjar hølisútreiðslurnar verða. Hóast talan verður um at húsast í einum av verandi bygningum, kann

roknast við nakað av hølisútreiðslum, tí tørvur kann fara at verða á at gera smærri ella størri umvælingar, so hølini verða egnað til virksemið hjá Fólkaheilsustýrinum. Tað er tó greitt, at talan verður ikki um at byggja ella keypa nýggjan bygning til endamálið.

### *Innbúgv*

Tá ein stovnur verður skipaður, verður tørvur á innbúgvi v.m. til starvsfólk. Støða skal tá takast til, um nýtt innbúgv skal keypast til øll starvsfólkini ella um tey kunnu endurnýta verandi innbúgv. Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Ílegusavnið og Fólkaheilsuráðið hava innbúgv. Verður hetta innbúgv flutt til Fólkaheilsustýrið, fara ikki at standast útreiðslur av at útvega verandi starvsfólkum innbúgv. Tá verður bert neyðugt at útvega innbúgv til tey starvsfólk, sum verða sett afturat í Fólkaheilsustýrinum. Í mynd 8 er eitt yvirlit yvir stovningarútreiðslur.

### Mynd 8: Fíggjarlig lýsing stig 1 – stovningarútreiðslur – 2022 (tús. kr.)

| | |
|---|---:|
| Hølisútreiðslur (el, olja, leiga, reingerð) | 200 |
| Umskipa journal | 100 |
| Eyka innbúgv | 60 |
| Heimasíða | 100 |
| Búmerki | 50 |
| **Tilsamans** | **510** |

### *KT*

KT-økið mennist støðugt, og tí fer tað at verða ein framhaldandi tørvur á játtan, bæði til útgerð og starvsfólk innan hetta økið. Av tí, at tað ikki er neyvlýst, hvør twørvurin verður innan KT, er tað ov tíðliga longu nú at siga, hvørjar útreiðslur fara at standast av hesum komandi árini.

### *Starvsfólk*

Tá Fólkaheilsustýrið verður sett á stovn, flyta starvsfólkini sum eru í starvi í Ílegusavninum (undantikið granskingarverkætlanir hjá FarGen), Fólkaheilsuráðnum og Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu til Fólkaheilsustýrið. Harafturat verður tørvur á at seta viðkomandi starvsfólk afturat í starv. Talan verður um ávikavist ein stjóra, ein biohagfrøðing, ein fólkaheilsufrøðing og møguliga ein lækna. Hesi starvsfólk eru ein fortreyt fyri, at Fólkaheilsustýrið kann røkja tær uppgávur, sum hoyra til stig 1. Lønin hjá stjóranum veldst um, hvørjum sáttmála viðkomandi er løntur eftir. Í mynd 9 er støði tikið í lønini hjá einum yvirlækna. Nýggja og økta virksemið fer at hava við sær útreiðslur til øktan rakstur. Í mynd 9 er eitt yvirlit yvir tey starvsfólk, sum tørvur verður á at seta í starv í 2022, og útreiðslurnar, sum fara at standast av hesum.

### Mynd 9: Fíggjarlig lýsing stig 1 – nýggjar raðfestingar – 2022 (tús.kr.)

| | |
|---|---:|
| Stjóri | 850 |
| Biohagfrøðingur | 700 |
| (Lækni) | (850) |
| Fólkaheilsufrøðingur | 700 |
| Øktur rakstur | 400 |
| **Tilsamans** | 2.650/(3.500) |

Um Fólkaheilsustýrið t.d. verður sett á stovn 1. juli 2022 í staðin fyri 1. januar sama ár, verða útreiðslurnar fyrsta árið samsvarandi lægri. Í mynd 10 eru útreiðslurnar lýstar, um Fólkaheilsustýrið verður sett á stovn 1. juli 2022.

### Mynd 10: Fíggjarlig lýsing stig 1 – nýggjar raðfestingar – 2022 (tús.kr.)

| | |
|---|---|
| Stjóri | 425 |
| Biohagfrøðingur | 350 |
| (Lækni) | (425) |
| Fólkaheilsufrøðingur | 350 |
| Øktur rakstur | 200 |
| **Tilsamans** | 1.325/(1.750) |

Í 2023 verður tørvur á at seta tvey fólk afturat í starv. Talan er um ein KT-frøðing og ein heilsubúskaparfrøðing. Harumframt verður tørvur á at seta starvsfólk til ávísar tíðaravmarkaðar uppgávur (t.d. heilsustarvsfólk ella ph.d. lesandi). Økta virksemið fer at hava við sær øktar útreiðslur, sí mynd 11. Undir stigi 1 verður mælt til at fara undir arbeiðið við eini landssjúklingaskrá. Ætlanin er, at hetta verður gjørt sum ein verkætlan við egnari játtan á fíggjarlógini. Av tí, at mælt verður til at skipa arbeiðið við at gera eina landssjúklingaskrá, sum eina sjálvstøðuga verkætlan við egnari játtan undir Fólkaheilsustýrinum, eru útreiðslurnar hesum viðvíkjandi ikki tiknar við í mynd 11.

### Mynd 11: Fíggjarlig lýsing stig 1 – nýggjar raðfestingar – 2023 (tús. kr.)

| | |
|---|---|
| KT-frøðingur | 700 |
| Heilsubúskaparfrøðingur | 700 |
| Starvsfólk til ávísar tíðaravmarkaðar uppgávur (t.d. heilsustarvsfólk ella ph.d. lesandi) | 500 |
| Øktur rakstur | 400 |
| **Tilsamans** | 2.300 |

## 8.3.2 STIG 2 – 1. JANUAR 2024 – 31. DESEMBER 2025

Í 2024 verður mælt til at fara undir stig 2. Hetta hevur við sær, at virkisøkið hjá Fólkaheilsustýrinum verður víðkað til at fevna um fleiri uppgávur. Víðkaða virkisøkið hevur við sær, at tørvur verður á at seta starvsfólk at taka sær av hesum uppgávum. Mælt verður til, at tvey starvsfólk verða sett í starv, umframt starvsfólk til ávísar tíðaravmarkaðar uppgávur. Talan er um ávikavist ein løgfrøðing og ein fólkaheilsufrøðing. Víðkaða virkisøkið fer at hava við sær øktar útreiðslur, sí mynd 12.

### Mynd 12: Fíggjarlig lýsing stig 2 – nýggjar raðfestingar – 2024 (tús. kr.)

| | |
|---|---|
| Løgfrøðingur | 700 |
| Fólkaheilsufrøðingur | 700 |
| Starvsfólk til ávísar tíðaravmarkaðar uppgávur (t.d. heilsustarvsfólk og ph.d. lesandi) | 500 |
| Øktur rakstur | 400 |
| **Tilsamans** | 2.300 |

Undir hesum stignum verður mælt til at styrkja hagtalspartin, og tískil verður tørvur á at seta ein biohagfrøðing afturat í starv. Somuleiðis verður mælt til, at seta eitt heilsustarvsfólk í starv at taka sær av heilsufakligum uppgávum. Av tí, at tað er ov tíðliga at neyvlýsa hesar uppgávur, ber ikki til at siga, hvat slag av heilsustarvsfólki talan verður um. Sum undir undanfarnum árum verður tørvur á at seta starvsfólk til ávísar tíðaravmarkaðar uppgávur.

### Mynd 13: Fíggjarlig lýsing stig 2 – nýggjar raðfestingar – 2025 (tús. kr.)

| | |
|---|---|
| Biohagfrøðingur | 700 |
| Heilsustarvsfólk | 850 |
| Starvsfólk til ávísar tíðaravmarkaðar uppgávur (t.d. heilsustarvsfólk og ph.d. lesandi) | 500 |
| Øktur rakstur | 400 |
| **Tilsamans** | 2.450 |

### 8.3.3 STIG 3 – 1. JANUAR 2026 – 31. DESEMBER 2027

Í 2026 verður farið undir triðja stigið. Undir hesum stignum verður tann partur av landsapotekaraembætinum, sum snýr seg um myndugleikauppgávur, fluttur til Fólkaheilsustýrið. Játtanin hjá Apoteksverkinum til hesa uppgávu flytur somuleiðis til Fólkaheilsustýrið. Í kapitli 5 verður mælt til, at uppraðfesta myndugleikauppgávuna undir landsapotekaraembætinum, og hevur hetta við sær øktar útreiðslur. Hvørjar hesar útreiðslur verða, er tengt at, hvussu økið verður uppraðfest. Landsapotekarin hevur avtalu við Lægemiddelstyrelsen um at fremja eftirlit við Apoteksverkinum. Kostnaðurin av hesum er mettur at verða umleið 200.000 kr. triðja hvørt ár.

Tá farið verður undir lýsingar og greiningar, verður tørvur á at seta ein stjórnmálafrøðing e.l. í starv. Somuleiðis verður tað hildið at verða skilagott at styrkja Fólkaheilsustýrið við einum heilsustarvsfólki í føstum starvi. Afturat hesum koma tey starvsfólk, sum verða sett til ávísar uppgávur.

### Mynd 14: Fíggjarlig lýsing stig 3 – nýggjar raðfestingar – 2026 (tús.kr.)

| | |
|---|---|
| Farmaseutur | 900 |
| Stjórnmálafrøðingur e.l. | 700 |
| Heilsustarvsfólk | 850 |
| Starvsfólk til ávísar tíðaravmarkaðar uppgávur (t.d. heilsustarvsfólk og ph.d. lesandi) | 500 |
| Øktur rakstur | 400 |
| **Tilsamans** | 3.350 |

Í 2027 verður mælt til at styrkja fólkaheilsuarbeiðið við einum fólkaheilsufrøðingi afturat. Undir hesum stigi verða eisini eftirlitsuppgávur og góðkenningar lagdar til Fólkaheilsustýrið. Enn er ov tíðliga at siga, hvørjar útreiðslur standast av at flyta hesar uppgávur til Fólkaheilsustýrið, tí tað veldst um, hvørt slíkur førleiki finst í Føroyum ella tørvur verður á at keypa henda førleika uttanlands. Av somu orsøk eru útreiðslurnar hesum viðvíkjandi ikki tiknar við á hesum sinni. Økta virksemið undir hesum stigi, fer somuleiðis at hava við sær øktar útreiðslur til rakstur, sí mynd 15.

### Mynd 15: Fíggjarlig lýsing stig 3 – nýggjar raðfestingar – 2027 (tús.kr.)

| | |
|---|---|
| Fólkaheilsufrøðingur | 700 |
| Øktur rakstur | 400 |
| **Tilsamans** | 1.100 |

## 8.3.4. STIG 4 – 1. JANUAR 2028 ->

Av tí, at mælt verður til at skipa arbeiðini við ávikavist Vevnaðarnýtsluskránni og Viðgerðartestamentsskránni í sjálvstøðugum verkætlanum við egnari játtan undir Fólkaheilstýrinum, eru útreiðslurnar til hesar verkætlanir ikki tiknar við á hesum sinni.

# 9. LÓGARVERK OG LÓGARBROYTINGAR

## 9.1. INNGANGUR

Í hesari ætlan verður mælt til, at ein røð av uppgávum skulu leggjast til Fólkaheilsustýrið, antin beinanvegin ella sum frá líður. Við støði í hesum, verður í hesum kapitli viðgjørt, hvørt tað er neyðugt at tillaga lógarverkið samsvarandi ætlaðu broytingunum, og hvørjar lógarbroytingar talan kann verða um at fremja.

## 9.2. LÓGARUPPSKOT UM FÓLKAHEILSUSTÝRI

Í hesari ætlan verður mælt til, at Fólkaheilsustýrið verður stovnað sum sjálvstøðugur stovnur undir Heilsumálaráðnum. Mælt verður til, hvat innihaldið í stovninum skal vera.

Mett verður, at tað er neyðugt í heyst at tilevna eitt løgtingslógaruppskot um Fólkaheilsustýri, har ásett verður, hvat innihaldið í stovninum verður.

Tað er møguligt at seta niðanfyristandandi lógarbroytingar inn í gildiskomuásetingina í lógaruppskotinum um Fólkaheilsustýri.

## 9.3. LÓGARBROYTINGAR Í MUN TIL DEILDINA FYRI ARBEIÐS- OG ALMANNAHEILSU

Í § 1, stk. 3 í løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið,við seinni broytingum, er ásett, at serligir stovnar hoyra til sjúkrahúsverkið. Sambært viðmerkingunum til hesa grein (løgtingsmál 80/2004) hoyra Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Sjúklingahotellið Tórshavn eisini til sjúkrahúsverkið.

Av tí, at tað í § 1, stk. 3 í lógini ikki er ásett, hvørjir serligir stovnar hoyra til sjúkrahúsverkið og Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu bert er nevnd í viðmerkingunum til lógina, verður tað ikki mett at vera neyðugt at broyta lógina fyri at staðseta Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu í Fólkaheilsustýrinum.

Ásetingar eru tó um uppgávur hjá Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu í § 9, stk. 5 í løgtingslóg nr. 49 frá 14. mai 2013 um eftirløn; §§ 9, 10 og 11 í kunngerð um læknakanning av kavarum og í §§ 6, 10 og 12 í kunngerð um læknakanning av sjófólkum. Mælt verður til, at „Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu“ í hesum ásetingum verður broytt til: „Fólkaheilsustýrið“ ella „Sjúkrahúsverkið“ frá 1. januar 2021 at rokna.

## 9.4. LÓGARBROYTINGAR Í MUN TIL FÓLKAHEILSURÁÐIÐ

Ásetingar um Fólkaheilsuráð eru í løgtingslóg nr. 56 frá 10. mai 2000 um Fólkaheilsuráð, við seinni broytingum. Sambært hesi lóg er Fólkaheilsuráðið ráð undir landsstýrisfólkinum og hevur sum uppgávu at styrkja tiltøk fyri heilsufremjing, sjúku- og vanlukkufyribyrging, bæði í almanna- og heilsuverkinum. Í lógini eru ásetingar um, hvussu ráðið verður valt.

Í § 6 í lógini stendur, at landsstýrismaðurin skipar fyri, at ráðið fær neyðuga skrivarahjálp og avgerð, um sjálvstøðug skrivstova skal setast á stovn. Av tí, at tað ikki er ásett í lógini, at Fólkaheilsuráðið skal hava sjálvstøðuga skrivstovu, men at ráðið skal hava neyðuga



skrivarahjálp, ber tað til at flyta skrivstovuhaldið hjá Fólkaheilsuráðnum til Fólkaheilsustýrið, uttan at lógarbroyting verður framd.

Í hesari ætlan verður mælt til, at uppgávurnar hjá Fólkaheilsuráðnum verða fluttar til Fólkaheilsustýrið. Mælt verður tí til, at løgtingslóg um Fólkaheilsuráð verður sett úr gildi og uppgávurnar hjá Fólkaheilsuráðnum skipaðar í Fólkaheilsustýrinum.

## 9.5. LÓGARBROYTINGAR Í MUN TIL ÍLEGUSAVNIÐ

Ásetingar um Ílegusavnið eru at finna í løgtingslóg nr. 62 frá 17. mai 2005, um gransking í mannaílegum. Sambært § 3 í lógini verður heimilað landsstýrismanninum at stovnseta stovn, nevndur Ílegusavnið. Í lógini eru ásetingar um Vevnaðarskránna, Diagnosuskránna og Ættarbandsskránna, umframt um innsavnan til Ílegusavnið; goymslu í og nýtslu av skráunum.

Um Ílegusavnið og skráir tess verða skipaðar í Fólkaheilsustýrinum, má lógarbroyting gerast, soleiðis at uppgávurnar hjá Ílegusavninum og Vevnaðarskráin, Diagnosuskráin og Ættarbandsskráin verða lagdar til Fólkaheilsustýrið. Mælt verður til, at hetta verður ásett í løgtingslóg um Fólkaheilsustýri.

Í løtuni er verkætlan í gongd viðvíkjandi endurskoðan av ílegulógini. Ætlanin er at leggja fyri Løgtingið endurskoðaða ílegulóg á vári 2022. Mælt verður til, at tað í arbeiðinum við endurskoðan av ílegulógini verður tikin hædd fyri, at uppgávurnar hjá Ílegusavninum verða skipaðar undir Fólkaheilsustýrinum.

Umframt virksemið, ið er ásett í lóg, fer granskingarvirksemi fram á Ílegusavninum. Mett verður, at lógarbroyting ikki krevst fyri at flyta granskingarvirksemið, sum er staðsett á Ílegusavninum, til annað stað.

## 9.6. LÓGARBROYTINGAR Í MUN TIL LANDSAPOTEKARAEMBÆTIÐ

Ásetingar um Landsapotekaran eru í løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág við seinni broytingum. Sambært § 50 í hesi lóg, hevur Landsapotekarin eftirlit við, at lógin og ásetingar við heimild í lógini verða hildnar.

Um uppgávur hjá Landsapotekaranum, herundir eftirlit, skulu leggjast til Fólkaheilsustýrið, má lógarbroyting gerast í løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág. Síðani má Fólkaheilsustýrið gera avtalu við Lægemiddelstyrelsen um at fremja eftirlit við Apoteksverkinum í Føroyum.

## 9.7. LÓGARBROYTINGAR Í MUN TIL STOVNAR, IÐ VEITA RÚSVIÐGERÐ

Í §§ 2, 3, 6 og 7 í løgtingslóg nr. 53/2019 um virksemi á stovnum, ið veita rúsviðgerð, er ásett, at Heilsutrygd skal góðkenna stovnar, ið veita rúsviðgerð. Ásett er, hvørjar mannagongdir eru í hesum sambandi. Um eftirlitið, sum Heilsutrygd fremur í dag, skal flytast til Fólkaheilsustýrið, krevst, at § 6, stk. 2 í løgtingslóg um virksemi á stovnum, ið veita rúsviðgerð verður broytt samsvarandi hesum.

## 9.8 LÓGARBROYTINGAR Í MUN TIL KOMMUNULÆKNASKIPANINA

Í § 7, stk. 3 í løgtingslóg nr. 28 frá 23. apríl 1999 um kommunulæknaskipan, er ásett, at tað er landsstýrismaðurin sum hevur eftirlit við viðtaluhølunum hjá kommunulæknum. Hendan uppgávan er tó latin Heilsutrygd. Um uppgávurnar hjá Heilsutrygd sambært lógini, skulu leggjast til Fólkaheilsustýrið, má lógarbroyting gerast í løgtingslóg um kommunulæknaskipanina.

## 9.9. LÓGARBROYTINGAR Í MUN TIL BARNA- OG UNGDÓMSTANNRØKT

Í § 7, stk. 2 í løgtingslóg nr. 23/1998 um barna- og ungdómstannrøkt er ásett, at landsstýrismaðurin í heilsumálum skipar fyri, at hagtøl yvir virksemið hjá tannlæknum verða gjørd. Landskassin ber útreiðslurnar, ið standast av arbeiðinum við hagtølunum.

Vísandi til hesa áseting ger Heilsumálaráðið eina tannlæknafrágreiðing annað hvørt ár. Í løtuni rindar Heilsumálaráðið Tannlæknafelagnum fyri at gera frágreiðingina. Um hendan uppgáva verður flutt til Fólkaheilsustýrið, má omanfyristandandi lógaráseting broytast.

## 9.10. TILMÆLI

*Mælt verður til, at lógaruppskot um Fólkaheilsustýri verður lagt fyri Løgtingið í heyst, og at neyðugar tillagingar verða gjørdar í lóggávuni á heilsuøkinum.*

# 10. FYLGISKJØL

## FYLGISKJAL 1 – TILMÆLIR – EITT SAMLAÐ YVIRLIT YVIR ØLL TILMÆLINI

| Nr. | Tilmæli | Kapittul |
|---|---|---|
| 1 | Mælt verður til, at komandi Fólkaheilsustýrið í sínum arbeiði heldur seg til WHO-allýsingina um heilsu | 5.2. |
| 2 | Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið skal gera tilmæli til politiska myndugleikan um ráðlegging innan heilsuverkið | 5.3.1. |
| 3 | Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið skal hava um hendi fólkaheilsuarbeiðið, upplýsing og tiltøk innan fólkaheilsu sum heild og styrkja heilsufremjandi og fyribyrgjandi partin av arbeiðinum við fólkaheilsu. Herundir er eisini, saman við Heilsumálaráðnum og øðrum pørtum at leggja til rættis og regluliga eftirmeta eina heildarætlan fyri heilsufremjan og fyribyrging fyri allar Føroyar. Mælt verður til, at fólkaheilsuøkið verður styrkt komandi árini | 5.3.2. |
| 4 | Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið veitir heilsufakliga ráðgeving til landsstýrið, kommunur, primera og sekundera heilsugeiran. Hendan ráðgeving eigur at vera gjørd í tøttum samstarvi við Landslæknan. | 5.3.3. |
| 5 | Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu, saman við føroyskum myndug-leikum, at tilevna vegleiðingar til føroyska heilsulóggávu. Mælt verður eisini til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu, í samstarvi við Landslæknan, at tillaga vegleiðingar til donsku heilsulóggávuna í Føroyum til føroysk viðurskifti, soleiðis at hesar vegleið-ingar kunnu setast í gildi fyri Føroyar. | 5.3.3. |
| 6 | Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at kunna borgarar og almenning um heilsufaklig viðurskifti. Harumframt verður mælt til, at ein talgildur heilsuportalur, har borgarar fáa kunning um heilsuviðurskifti sum heild og fáa atgongd til sínar egnu heilsuupplýsingar talgilt, við tíðini verður mentur. Mælt verður til, at hesin heilsuportalur verður staðsettur antin í Sjúkrahúsverkinum ella í Fólkaheilsustýrinum | 5.3.3. |
| 7 | Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið luttekur í altjóða og norðurlendskum samstarvi innan heilsufakliga økið | 5.3.4. |
| 8 | Mælt verður til, at heilsutilbúgvingin og játtanin á fíggjarlógini til tilbúgvingina verður flutt til Fólkaheilsustýrið | 5.3.5. |
| 9 | Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at tilevna yvirskipaðar ætlanir til politiska myndugleikan um dygdarmenning innan heilsuverkið sum heild | 5.3.6. |

| | | |
|---|---|---|
| 10 | Mælt verður til, at eftirlitið við ávikavist Apoteksverkinum, rúsviðgerðar-stovnum og viðtaluhølum hjá kommunulæknum, sum frálíður, verður flutt til Fólkaheilsustýrið | 5.3.7. |
| 11 | Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið, sum frálíður fær til uppgávu at eftirmeta rúsviðgerðarstovnar og tilboð um sálarfrøðiliga viðgerð | 5.3.8. |
| 12 | Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið, sum frálíður, fær til uppgávu at góðkenna rúsviðgerðarstovnar og umsóknir um tilskot til heilivág | 5.3.9. |
| 13 | Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at skipa hagtøl á heilsuøkinum; at gera, viðgera og menna hagtøl innan heilsuøkið. Mælt verður samstundis til, at menningin av hagtølum, ið fer fram innan Sjúkrahúsverkið, heldur fram óbroytt. | 5.4.1. |
| 14 | Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at gera lýsingar, greiningar og heilsufrágreiðingar, herundir m.a. at gera eina árliga heilsulýsing um heilsustøðu føroyinga, umframt javnan at gera heilsufrágreiðingar innan serstøk økir, t.d. um serstakar sjúkur. | 5.4.1. |
| 15 | Mælt verður til, at Ílegusavnið við sínum skráum: Diagnosuskráin, Ættarbandsskráin og Vevnaðarskráin, verða fluttar til Fólkaheilsustýrið at umsita. | 5.4.2. |
| 16 | Mælt verður til, at tann parturin av FarGen verkætlanini, sum inniber gransking, verður staðsettur í tí heilsugranskingareindini, ið verður skipað í sambandi við hetta arbeiðið. Mælt verður til, at sjálvt undirstøðukervið verður verandi í Vevnaðarskránni, sum verður staðsett undir Fólkaheilsustýrinum. Dáturnar í undirstøðukervinum kunnu síðani verða nýttar til at menna skipanina við persónlagaðum medisini fyri allar føroyingar. | 5.4.2. |
| 17 | Mælt verður til, at Krabbameinsskrásetingin innan Sjúkrahúsverkið verður flutt til Fólkaheilsustýrið at umsita. | 5.4.2. |
| 18 | Mælt verður til at arbeiðið við heilsuskráum í Fólkaheilsustýrinum verður uppraðfest og styrkt komandi árini. Hetta fyri, at Fólkaheilsustýrið kann fáa haldgott grundarlag til at veita heilsufakliga ráðgeving og gera tilmælir um ráðlegging innan heilsuverkið v.m. | 5.4.2. |
| 19 | Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at standa fyri verkætlanini at uppbyggja og menna eina føroyska Landssjúklingaskrá. Mælt verður til, at Landssjúklingaskráin verður staðsett í Fólkaheilsustýrinum, og at upplýsingarnar í hesi skrá verða fingnar til vega úr teimum skráum, ið longu eru í Føroyum, umframt úr danska „Landspatientregisteret“. | 5.4.2. |
| 20 | Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu, í samstarvi við danskar myndugleikar, at fáa avrit av teimum upplýsingum um føroyingar, ið eru goymdar í Landspatientregisteret, til Føroya. Mælt verður til, at hesar upplýsingar verða goymdar í Fólkaheilsustýrinum og verða partur av Landssjúklingaskránni. | 5.4.2. |

| | | |
|---|---|---|
| 21 | Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið í samstarvi við Landslæknan, fær til vega avrit av verandi upplýsingum um føroyingar í dødsårsagsregister, fødselsregister og register om smitsomme sygdomme, soleiðis at hesar upplýsingar verða goymdar í Fólkaheilsustýrinum. Hetta av teirri orsøk, at talan er um yvirskipaðar heilsuskráir, ið fevna um upplýsingar um allar føroyingar. Mælt verður til, at hesar skráir í Fólkaheilsustýrinum javnan verða dagførdar við upplýsingum um deyðsorsøkir, føðing og smittandi sjúkur. | 5.4.2. |
| 22 | Mælt verður til, at skjøtul verður settur á arbeiðið at fáa upplýsingar um føroyingar í øðrum skráum uttanlands til Føroya. Upplýsingarnar eiga at verða varðveittar í skrá undir Fólkaheilsustýrinum. T.d. kundu upplýsingar um føroyingar í Misdannelsesregisteret og øðrum skráum uttanlands, møguliga verið partur av upplýsingunum í Landssjúklingaskránni. | 5.4.2. |
| 23 | Viðvíkjandi pappírsjournalunum hjá Gigni og kommunulæknum, sum eru staðsettar í Heilsutrygd, verður mælt til, at arbeiðið verður sett í verk at fáa tilfarið í hesum journalum skrásett talgilt, so at upplýsingar frá hesum skráum kunnu verða skrásettar í Landssjúklingaskránni. | 5.4.2. |
| 24 | Mælt verður ikki til, at elektroniska sjúklingajournalin hjá heilsuverkinum, Cosmic, umframt skipanir og skráir hjá Heilsutrygd og Apoteksverkinum verða fluttar til Fólkaheilsustýrið. | 5.4.2. |
| 25 | Hetta av tí, at sjúklingajournalin, Cosmic, er høvuðsarbeiðsamboðið hjá Sjúkrahúsverkinum, eitt amboð, sum teimum tørvar í dagliga arbeiðinum. Somuleiðis eru skráirnar hjá Heilsutrygd og Apoteksverkinum arbeiðsamboð hjá stovnunum. Mælt verður til, at samstarv verður ímillum Fólkaheilsustýrið og Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd og Apoteksverkið um at fáa neyðugar upplýsingar úr skráunum í Landssjúklingaskránna. Mælt verður til, at ein bíðilistaskrá verður staðsett og ment innan Sjúkrahúsverkið. | 5.4.2. |
| 26 | Mælt verður til, at ein borgaravend skrá: heilsuportal.fo verður ment, sum frálíður. Mælt verður til, at hesin heilsuportalur verður staðsettur antin í Sjúkrahúsverkinum ella í Fólkaheilsustýrinum. | 5.4.2. |
| 27 | Mælt verður til, at ein føroysk „Vevnaðarnýtsluskrá", „Viðgerðartestamentskrá" og skipan um ótilætlaðar hendingar í heilsuverkinum, verður staðsett í Fólkaheilsustýrinum, um politisk støða verður tikin til at stovnseta føroyska skrá ella skipan hesum viðvíkjandi | 5.4.2. |
| 28 | Mælt verður til, at granskingargrundað ráðgeving til politiska myndugleikan (forskningsbaseret myndighedsbetjening) verður partur av virkseminum í Fólkaheilsustýrinum. Hetta soleiðis, at granskarar í styttri tíðarskeið, granska innan ávís øki, ið politiski myndugleikin hevur biðið um. Mælt verður til, at Heilsumálaráðið og Fólkaheilsustýrið gera avtalu um hesa granskingargrundaðu myndugleikatænastu. | 5.4.3. |
| 29 | Mælt verður til, at arbeitt verður fram ímóti at staðseta heilsugranskingina í Føroyum samlað á einum stað, helst innan Sjúkrahúsverkið, nær økinum, har Fólkaheilsustýrið verður staðsett. Hetta soleiðis, at Fólkaheilsustýrið og heilsugranskingin kunnu fáa ágóða hvørt av øðrum. | 5.4.3. |
| 30 | Mælt verður samstundis til, at arbeitt verður fram ímóti, at Sjúkrahúsverkið verður góðkent sum Universitetssjúkrahús, og at ein langtíðarætlan fyri heilsugransking í Føroyum verður gjørd. | 5.4.3. |

| | | |
|---|---|---|
| 31 | Mælt verður til, at ílegugransking í Føroyum, herundir granskingarverkætlanirnar hjá FarGen, verða skipaðar í omanfyrinevndu heilsugranskingareind, samstundis sum Fólkaheilsustýrið verður skipað. | 5.4.3. |
| 32 | Mælt verður til, at umsitingin av teimum trimum skráunum hjá Ílegusavninum: Vevnaðarskráin, Diagnosuskráin og Ættarbandsskráin, umframt sáttmálar við granskarar um nýtslu av upplýsingum og vevnaði í skráunum, verður skipað undir Fólkaheilsustýrinum | 5.4.3. |
| 33 | Mælt verður til, at kunningartøkni verður raðfest og styrkt í Fólkaheilsustýrinum | 5.4.4. |
| 34 | Mælt verður til, at tey praktisku viðurskiftini viðvíkjandi Fólkaheilsustýrinum og tey praktisku viðurskiftini viðvíkjandi omanfyrinevndu heilsugransking eru komin uppá pláss samstundis, tann 1. januar 2022, tá ið Fólkaheilsustýrið eftir ætlan skal setast á stovn | 5.5. |
| 35 | Mælt verður til, at Fólkaheilsustýrið verður íverksett undir einum. Um hetta ikki letur seg gera, verður mælt til, at Fólkaheilsustýrið verður íverksett í stigum við tí innihaldi, starvsfólkaorku og tíðarætlan, sum lýst omanfyri. | 7.3. |
| 36 | Mælt verður til, at farið verður undir arbeiðið at skipa heilsugranskingar-eindina í heyst, samstundis, sum farið verður undir at skipa Fólkaheilsustýrið. Somuleiðis verður mælt til, at Fólkaheilsustýrið og heilsugranskingareindin verða stovnsett samstundis | 7.4. |
| 37 | Mælt verður til, at lógaruppskot um Fólkaheilsustýri verður lagt fyri Løgtingið í heyst, og at neyðugar tillagingar verða gjørdar í lóggávuni á heilsuøkinum | 9.10 |

## FYLGISKJAL 2 – VIRKISØKI HJÁ MYNDUGLEIKASTOVNUM OG STÝRUM UNDIR STJÓRNARRÁÐUM

Niðanfyri eru virkisøkini hjá nøkrum av myndugleikastovnunum og stýrunum undir stjórnarráðum í Føroyum lýst.

### *Jarðfeingi – Umhvørvis- og vinnumálaráðið*

Jarðfeingi er stovnur undir Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Endamálið hjá Jarðfeingi er at fyrisita, granska, ráðgeva og breiða út kunnleika um kolvetni og jarðfrøðilig náttúruvirði. Jarðfeingi fyrisitur lóggávuna innan leiting og framleiðslu av kolvetnum. Hetta merkir, at stovnurin ráðgevur landsstýrismanninum og almennum stovnum. Jarðfeingi granskar í jarðfrøði og náttúrulandafrøði á landi, á havbotninum og í undirgrundini. Jarðfeingi er jarðfrøðiligt savn fyri Føroyar sum merkir, at stovnurin røkir savn við føroyskum grót- og steinsløgum, umframt at stovnurin skipar fyri framsýningum og undirvísing.

### *Búnaðarstovan – Umhvørvis- og vinnumálaráðið*

Búnaðarstovan er stovnur undir Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Búnaðarstovan fyrisitur alla almenna jørð, ið ikki verður fyrisitin av ella er skrásett sum ogn hjá øðrum almennum stovni, herundir kommununum. Virksemið á Búnaðarstovuni fevnir eisini um landbúnaðarráðgeving, landbúnaðarroyndir og gransking og um undirvísing og skeiðvirksemi v.m. Harumframt umsitur Búnaðarstovan árligu studningsjáttanina til landbúnaðarvinnuna. Búnaðarstovan røkir eisini ymsar aðrar myndugleikauppgávur.

### *Sjóvinnustýrið – Umhvørvis- og vinnumálaráðið*

Sjóvinnustýrið (Skipaskrásetingin, FAS og Skipaeftirlitið) er stýrið undir Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Sjóvinnustýrið umsitur og hevur ábyrgd av føroyska regluverkinum, sum ásetur krøv til skip og bátar, skrásettir í føroysku báta- og skipaskrásetingunum. Føroyska regluverkið fevnir um altjóða krøv til skip og bátar, umframt serlig føroysk krøv. Stovnurin leggur áherðslu á at fylgja við í broytingunum í altjóða krøvum og at fáa hesi og serlig føroysk krøv í føroyska regluverkið. Sjóvinnustýrið hevur eisini ein samskipandi leiklut mótvegis øðrum almennum stovnum og áhugabólkum, soleiðis at hesi verða kunnað um virksemið, sum fer fram í altjóða felagsskapinum IMO (International Maritime Organization).

### *Umhvørvisstovan – Umhvørvis- og vinnumálaráðið*

Umhvørvisstovan er stovnur undir Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Virkisøkini fevna um umhvørvisvernd, umhvørvisgransking, orkumál og elveitingareftirlit, viðarlundir og frílendi, land- og sjókort, matrikul, tinglýsing og landsfólkayvirlit. Umhvørvisstovan virkar fyri burðardyggari samfelagsmenning við at verja vistskipanir, røkja náttúrutilfeingið og gera rættarbundnar staðfestingar. Umhvørvisstovan hevur matrikul- og verndarfyrisiting, umsitir land- og sjókort, veitir tænastur og granskar innan virki stovnsins. Umhvørvisstovan virkar fyri at røkja tær altjóða avtalur, sum Føroyar hava sett í gildi. Umhvørvisstovan er við í norðurlendskum og altjóða samstarvi. Stovnurin sær tað, at kunna borgaran, myndugleikar og áhugabólkar, sum ein týðandi lut í virksemi stovnsins, og verður hetta millum annað gjørt á heimasíðunum: us.fo og foroyakort.fo. Umframt nýggj virkisøki og tænastur, røkir Umhvørvisstovan tær uppgávur, ið fyrr vóru á Matrikulstovuni, Tinglýsingarstovuni, Landsfólkayvirlitinum, Skógrøkt Landsins, umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni og orkudeildini á Jarðfeingi. Orka gjørdist partur av Umhvørvisstovuni um árskiftið 2015/16, meðan hini virkisøkini vórðu løgd saman í nýggja stovnin á sumri 2007, sum fekk navnið Umhvørvisstovan.

### *Heilsufrøðiliga starvsstovan – Umhvørvis- og vinnumálaráðið*

Heilsufrøðiliga starvsstovan er stovnur undir Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Heilsufrøðiliga

starvsstovan umsitur lógir og kunngerðir viðvíkjandi matvørum, djórasjúkum, djóravernd og djóralæknavirksemi, herundir eftirlitsskyldu. Virksemið á Heilsufrøðiligu starvsstovuni er býtt í trý meginøki, samsvarandi reglugerðini fyri stovnin. Hesi trý meginøkini eru knýtt saman, tí tey byggja í stóran mun á sama fakliga førleika. Meginøkini eru: 1) fyrisitingarøkið; 2) kanningarstovuøkið og 3) granskingar- og menningarøkið.

### *Arbeiðs- og brunaeftirlitið – Umhvørvis- og vinnumálaráðið*

Arbeiðs- og brunaeftirlitið, ið er arbeiðs- og brunaeftirlitsmyndugleiki landsins, er stovnur undir Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Høvuðsuppgávurnar hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eru støðugt at betra arbeiðsumhvørvið á øllum føroyskum arbeiðsplássum, umframt at virka fyri brunatrygd. Arbeiðs- og brunaeftirlitið fremur eftirlitsvitjanir og leiðbeinir pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, stovnum, feløgum og persónum. Arbeiðs- og brunaeftirlitið skrásetur og granskar vanlukkutilburðir og ráðgevur landsstýrismanninum viðvíkjandi arbeiðsumhvørvismálum, brunatrygd v.m.

### *Havstovan – Fiskimálaráðið*

Havstovan er stovnur undir Fiskimálaráðnum. Havstovan hevur til endamáls at kanna føroyska havumhvørvið og tað livandi tilfeingið, har er; ráðgeva og kunna landsins myndugleikar og almenningin um hesi viðurskifti. Á hvørjum ári skal Havstovan lata Føroya landsstýri upplýsingar um støðuna í fiskastovnunum á føroysku landleiðunum og á sjóleiðum uttan fyri føroysku landleiðirnar, sum føroysk fiskifør gagnnýta. Skal har gera vísindaligar tilráðingar og metingar samsvarandi endamálinum í lógini um fyrisiting av sjófeingi. Fyri at røkka hesum setningi, ger Havstovan á hvørjum ári fiskirannsóknir og kannar veiðuna hjá fiskiskipum. Regluligar kanningar av havumhvørvinum verða gjørdar á hvørjum ári. Tær skulu lýsa broytingarnar frá einum ári til annað og hjálpa Havstovuni at skilja broytingarnar í livandi tilfeinginum. Kanningar eru ein treyt fyri at kunna meta um møguleikarnar fyri burðardyggari gagnnýtslu. Havstovan stendur eisini á hvørjum ári fyri fleiri verkætlanum innan „fiskivinnuroyndir“. Havstovan er við í norrønum og altjóða verkætlanum innan fiski- og havfrøði av ymsum slagi, og hevur eisini átikið sær fleiri kanningar av føroyska umhvørvinum og fiskiskapi undir Føroyum í sambandi við eina komandi oljuvinnu.

### *Dátueftirlitið og Dáturáðið – Løgmansskrivstovan*

Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarmyndugleiki undir Løgmansskrivstovuni. Dátueftirlitið er skipað við skrivstovu og dáturáði. Dátueftirlitið umsitur dátuverndarlógina. Dátueftirlitið hevur eftirlit við allari viðgerð, sum løgtingslógin fevnir um. Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum eru m.a. av sínum eintingum ella eftir klagu frá skrásetta at ansa eftir, at viðgerð av persónupplýsingum bert fer fram í samsvari við løgtingslógina og tær reglur, sum eru ásettar sbrt. løgtingslógini; styrkja almenna kunnleikan til dátuvernd; ráðgeva Føroya landsstýri og øðrum stovnum o.a. um lóggávu og umsitingarlig tiltøk dátuvernd til frama; styrkja kunnleikan hjá dátuábyrgdarum og dátuviðgerðum um teirra skyldur sbrt. hesi løgtingslóg; gera kanningar, har persónupplýsingar verða viðgjørdar; fylgja við í og kunna um gongdina í viðgerðini av persónupplýsingum í Føroyum og uttanlands, og gera eina ársfrágreiðing, sum skal almannakunngerast. Løgmaður setur Dáturáðið, sum hevur fimm limir. Forfólkið skal vera løgfrøðingur. Dáturáðið ásetir egna starvsskipan.

### *Hagstova Føroya – Fíggjarmálaráðið*

Hagstovan er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Hagstova Føroya er almenni hagtalsmyndugleikin í landinum. Tað er sostatt Hagstovan, sum kunnger almenn hagtøl í tann mun, sum tey eru tøk. Aðrir almennir myndugleikar, sum fremja hagtalsuppgerðir eiga at samskipa hetta virksemið við Hagstovuna. Í lógini um Hagstovu Føroya er tryggjað almenninginum, at hagtølini frá stovninum eru framd uttan politiska ávirkan. Somuleiðis tryggjar lógin, at tær upplýsingar, Hagstovan hevur um hendi, einans verða brúktar til hagtalsuppgerðir og ikki latnar øðrum – hvørki myndugleikum ella einstaklingum. Tey hagtølini, sum Hagstova Føroya serliga leggur dent á, eru tjóðarroknskapur, gjaldsjavni, uttanlandshandil, arbeiðsmarknaður, íbúgvaviðurskifti, vinnugreinahagtøl, inntøkuhagtøl og brúkaraprístal.

Ein avgerandi uppgáva hjá Hagstovuni er útgáva, t.v.s., at veita almenninginum lætta atgongd til dygdargóð hagtøl.

### *Landsbanki Føroya – Fíggjarmálaráðið*

Landsbanki Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Umframt fyrisitingarligu uppgávurnar er Landsbankin ein kunnandi og ráðgevandi stovnur. Landsbankin ráðgevur politisku skipanini í avgerðum, sum hava við fíggjarmarknaðin at gera. Harafturat hevur Landsbankin skyldu at savna, samansjóða og miðla upplýsingar, sum eru viðkomandi fyri føroyska fíggjarkervið. Landsbankin leggur seg eftir at miðla tilfar, sum bæði er viðkomandi fyri vinnu, politisku skipanina og borgaran. Landsbankin umsitur gjaldførið hjá landskassanum. Landsbankin tryggjar gjaldførið millum annað við at seta pening í virðisbrøv innanfyri góðtikin váðamørk. Landsbankin umsitur lántøkuna hjá landinum. Landsbankin virkar fyri, at Føroyar fáa so góða kredittmeting (og harvið so bílig lán), sum gjørligt. Landsbankin stendur fyri samskiftinum við Moody's og veitir eisini neyðugu upplýsingarnar, sum ratingfyritøkan hevur brúk fyri, fyri at kunna kredittmeta Føroyar. Landsbankin er skrivstova hjá Føroya Váðaráðið, sum hevur eftirlit við systemiskum fíggjarligum váðum í Føroyum. Landsbankastjórin virkar sum forfólk í Váðaráðnum. Harafturat ger landsbankin frágreiðingar og fyrireikar tilfar til fundir hjá Váðaráðnum. Landsbankin og TAKS umsita Samhaldsfasta (Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin), sum er ein pensjónsgrunnur, Landsbankin umsitur Búskapargrunnin.

www.hmr.fo

ISBN 978-99918-884-1-5